LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2011

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært §12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

OKTOBER 2012

Innihaldsyvirlit

0 INNGANGUR 7

1 ALMENNAR VIÐMERKINGAR 9

1.1 ÁBYRGD AV ROKNSKAPINUM 9
1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9
1.3 SKIPAN AV ROKNSKAPARHALDINUM 10
1.4 STÝRINGARMEGINREGLUR UM MÁL OG NÁDD ÚRSLIT 11
1.5 TRYGG HANDFARING AV UPPLÝSINGUM 12
1.6 MILLUMLANDA SAMSTARV 12

2 LØGMANSFYRISITINGIN 15

2.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (LG 2011/202-0111) 15
2.2 SAMSÝNINGAR TIL LANDSSTÝRISFÓLK (LG 2011/511-0000) 16
2.3 LØNIR TIL LØGMANSSTJÓRA OG AÐALSTJÓRAR (LG 2011/511-0000) 17

3 FÍGGJARMÁL 19

3.1 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI O.A. 19
3.1.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2011/100-0001) 19
3.1.2 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR O.T. (LG 2011/203-0181) 20
3.2 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2011/203-0111) 21
3.2.1 STÝRINGARMEGINREGLUR UM MÁL OG NÁDD ÚRSLIT 21
3.2.2 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI O.A. 22
3.2.3 UM ÁVÍSAR ÚTREIÐSLUR (LG 2011/203-0999) 23
3.3 AVSTEMMAN AV LØNUM (LØNARSKIPANIN) (LG 2011/511-0000) 24
3.4 FÍGGJARSTØÐAN 2011 (LG 2011/300-0000) 26
3.4.1 FÍGGJARSTØÐAN IKKI FULLFÍGGJAÐ 26
3.4.2 AVSTEMMAN AV FÍGGJARSTØÐUNI O.A. 26
3.4.3 HØVUÐSTØL 26
3.4.4 FÍGGJARLIGUR ÚTBÚNAÐUR (LG 2011/300-0102) 26
3.4.5 ÁOGN (LG 2011/300-0103) 32
3.4.6 GOYMSLUR 33
3.4.7 OGNIR OG ÚTBÚNAÐUR (LG 2011/300-0101) 33
3.4.8 TØKUR PENINGUR (LG 2011/300-0104) 34
3.4.9 SKULD (LG 2011/300-0201/0202) 35
3.5 UMSITING AV SKATTI, AVGJØLDUM O.Ø. 37
3.5.1 KASSAEFTIRLIT Á FLOGVØLLINUM (LG 2011/203-0151) 37
3.5.2 FAS INNKREVJING OG FAS-AFTURBERING (LG 2011/203-0351) 37
3.5.3 FERÐAAVGJØLD (LG 2011/220-0522) 39
3.5.4 MVG-EFTIRSTØÐUR (LG 2011/220-0522) 41
3.5.5 KERVISSKOÐAN (LG 2011/203-0151) 45
3.5.6 VÁÐAGREINING AV SKIPANUNUM HJÁ TAKS (LG 2011/203-0151) 47

4 FISKIVINNUMÁL 49

4.1 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2011/205-0342) 49
4.1.1 EYGLEIÐARASKIPANIN (LG 2011/205-0343) 55
4.2 HAVSTOVAN (LG 2011/205-0343) 56
4.2.1 UM VERKÆTLANIR 58
4.3 TRYGDARGRUNNUR FISKIVINNUNNAR (LG 2011/205-0344) 65
4.4 TRYGDARMIÐSTØÐIN – KEYP OG UMBYGGING (LG 2011/205-0351) 66

5 VINNUMÁL 67

5.1 VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2011/206-0111) 67
5.2 UMSITING AV VINNUSJÚKUGRUNNINUM (LG 2011/206-0211) 68
5.3 BRÚKARAUMBOÐIÐ (LG 2011/206-0371) 70
5.4 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2011/206-0373) 71

6 MENTAMÁL 73

6.1 HEILSUSKÚLI FØROYA (LG 2011/207-0233) 73
6.2 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (LG 2011/207-0233) 73
6.3 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2011/207-0236) 74
6.4 MUSIKKSKÚLASKIPANIN (LG 2011/207-0235) 77
6.5 STUDNI (LG 2011/207-0237) 79

7 HEILSUMÁL 83

7.1 HEILSUMÁLARÁÐIÐ (LG 2011/211-0111) 83
7.2 KT-ØKI HEILSUVERKSINS (LG 2011/211-0111) 85
7.3 PROFYLAKSIR (LG 2011/211-0201) 86
7.4 FÆIÐ Í FØROYSKU SJÚKRAKASSUNUM (LG 2011/211-0202) 89

8 ALMANNAMÁL 91

8.1 ALMANNASTOVAN (LG 2011/212-0211) 91
8.2 ELDRI OG BREKAÐ (LG 2011/212-0216) 92
8.2.1 ØKISDEPILIN FYRI SINNISVEIK 92
8.2.2 VERKSTAÐIÐ Á BAKKA 93
8.2.3 SAMBÝLIÐ Á BÁRÐARFLØTTI 94
8.2.4 HAMRAGARÐUR 94
8.2.5 ROKNSKAPARREGLUGERÐIR HJÁ STOVNUM UNDIR ALMANNAVERKINUM 96
8.3 VANLIG FORSORG (LG 2011/212-0217) 97
8.3.1 VANLIG FORSORG, HOYRITÓL 97
8.3.2 DAGFØRING AV FORSORGARLÓGINI O.A. 100
8.4 LØN, SETANIR O.A. Í NÆRVERKINUM (LG 2011/511-0000) 101

9 INNLENDISMÁL 105

9.1 INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (LG 2011/215-0111) 105
9.2 ÚTLENDINGASTOVAN (LG 2011/215-0141) 107
9.3 LANDSVERK (LG 2010/215-0381) 108
9.3.1 BYGGIDEILDIN 113
9.3.2 HVAT ER EIN ALMENNUR BYGNINGUR 115
9.3.3 BYGNINGSVERKÆTLANIR 117
9.3.4 GÓÐKENNING AV LEIGUMÁLUM 118
9.3.5 INNTØKUFÍGGJAÐ VIRKSEMI 119
9.3.6 INFRAKERVIÐ Á ÚTOYGGJ 123

0 Inngangur

Sambært § 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini og § 1, stk. 1, í løgtingslóg nr. 33 frá 23. mars 1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” skal Landsstýrið, í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok, leggja samlaða landsroknskapin fyri Løgtingið. Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 “um roknskaparverk landsins o.t.”

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

Sambært § 12, stk. 2, í lógini um grannskoðan skal roknskapargrannskoðanin, innan 10 mánaðir eftir fíggjarárslok, lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2011 fyri Løgtingið til samtyktar.

Fremst í frágreiðingini er eitt brot, sum er av almennum slag. Síðani verður, fyri hvørt málsøki sær, tikið samanum úrslitið av grannskoðanini. Frágreiðingin er skipað eftir sama málsøkjabýti sum Landsroknskapurin fyri 2011. Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk, sum nú umsita avvarðandi øki, til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2011 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2011 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. oktober 2012

Beinta Dam
landsgrannskoðari

1 Almennar viðmerkingar

1.1 Ábyrgd av roknskapinum

Aðalráð og stovnar

Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðunum, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Í ábyrgdini liggur eisini, at aðalráðini og stovnar teirra støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Gjaldstovan

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar, samsvarandi góðkendum ársroknskapum, tiknar við í landsroknskapin, sum Føroya Gjaldstova setur upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal, áðrenn juni mánaður er liðin, leggja fyri Løgtingið samlaða landsroknskapin.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2011 varð latin Løgtinginum 25. juni 2012.

1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Endamálið við grannskoðanini

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at ongin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
- at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheftur í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnarnar.[1]

[1] Undantikið roknskapirnar hjá teimum stovnum/játtanum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

Grannskoðanin skal fevna um:

- fíggjarliga grannskoðan: at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at ongin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.
- løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan: at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.
- fyrisitingargrannskoðan: at játtanin verður nýtt við atliti at sparsemi, produktiviteti og effektiviteti.

Harumframt skal Landsgrannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður í mest møguligan mun framd samsvarandi altjóða grannskoðanarstandardunum fyri almenna grannskoðan frá INTOSAI. [2]

Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti, ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av statuspostum, avstemman o.a.

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum, ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju, t.d. sjúkrahúsverkið. Privatir grannskoðarar grannskoða umleið 40 grunnar og stovnar, sum eru við í landsroknskapinum.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum.

1.3 Skipan av roknskaparhaldinum

Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” og K. nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.” áseta, hvussu roknskaparhaldið hjá landinum skal vera skipað. Ein týðandi partur er, at stovnar o.o. gera eina roknskaparreglugerð, hvussu roknskaparhaldið á stovninum skal vera fyriskipað, og at roknskaparreglugerðin verður dagførd. Stovnsleiðarin skal ansa eftir, at roknskaparreglugerðin við ábyrgdar- og heimildarreglum verður hildin.

[2] International Organization of Supreme Audit Institutions

Í tráð við § 4, stk. 2, í roknskaparkunngerðini hevur Fíggjarmálaráðið í februar 2001 sent út rundskriv við vegleiðingum um, hvussu roknskaparreglugerðirnar skulu verða gjørdar. Fyrst í roknskaparrundskrivinum er greitt frá, at

> *"Roknskaparreglugerðin, við skipaðum ábyrgdar- og heimildarreglum, er ein sundurgreining av tí ræðisrætti, sum Løgtingið hevur litið einum landsstýrismanni upp í hendi. Landsstýrismaðurin hevur skipað roknskaparøkið forsvarliga, tá ið allar roknskaparreglugerðir eru gjørdar og góðkendar, og tá ið eftirlit er við, at ásettu mannagongdirnar verða hildnar.*
>
> *Stovnsleiðarin hevur skyldu at kunna starvsfólkini um innihaldið í roknskaparreglugerðini og alsamt at dagføra reglugerðina samsvarandi broytingum á stovninum, virkisøki stovnsins og yvirskipaðu fyrisetingunum annars. Stovnsleiðarin skal eisini tryggja, at tey, sum arbeiða á roknskaparøkinum, hava nøktandi fakligan førleika."*

Landsgrannskoðanin staðfestir, at í dag eru roknskaparreglugerðir fyri at kalla øll roknskaparøki, sum roknskaparlógin fevnir um. Grannskoðan okkara síðstu árini vísir tó, at í alt ov nógvum førum verða roknskaparreglugerðirnar ikki dagførdar í mun til veruligu viðurskiftini. Havandi í huga at roknskaparreglugerðirnar eru ein sundurgreinað verksetan av ræðisrættinum fyri tey ymisku virkisøkini, eru roknskaparreglugerðirnar sera týðandi amboð hjá stovnsleiðslunum at stýra stovnunum út frá heimildum, herundir at fyribyrgja misnýtslu og ógreiðu.

Landsgrannskoðanin heldur tí, at ov nógvir stovnar og aðalráð taka ikki hesa ábyrgd í nóg stórum álvara. Landsgrannskoðanin mælir landsstýrinum til at tryggja og hava eftirlit við, at roknskaparreglugerðirnar verða dagførdar.

1.4 Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin víst á, at bert fáir stovnar hava sett í verk reglur um mál og nádd úrslit, sum ásett í § 7 í roknskaparkunngerðini, hóast tey hava havt meira enn 4 ár at seta reglurnar í verk.

Støðan er batnað nakað, men langt er eftir, til komið er á mál.

Sambært § 7 í roknskaparkunngerðini skulu aðalráðini og stovnar teirra í seinasta lagi 1. januar 2010 hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit o.t.

Í § 7, stk. 4, er ásett, at Fíggjarmálaráðið ger av, í samráði við aðalráðini og aðrar javnsettar myndugleikar, hvørjir stovnar skulu seta í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit.

Sambært § 7, stk. 5 skal Fíggjarmálaráðið áseta neyvari, hvussu stýringarmeginreglurnar skulu verða settar í verk. Fíggjarmálaráðið hevur ikki gjørt nakra vegleiðing ella nakað rundskriv í hesum sambandi.

Fíggjarmálaráðið hevur kunnað um, at ráðið støðugt arbeiðir við málum og avrikum við at spyrja aðalráðini, hvussu støðan er á teirra øki, og við at vísa á skyldurnar sambært roknskaparkunngerðini og játtanarskipanini o.a. Hóast ongar reglur eru fyri, hvussu stýringarmeginreglur skulu verða settar í verk, hevur tað ikki forðað fyri, at aðalráðini hava gjørt mál- og avrikssáttmálar. Soleiðis sum Fíggjarmálaráðið fatar støðuna, verða hesir sáttmálar í alt størri mun ein týðandi

lutur í at røkka endamálinum, at fáa sum mest burturúr almenna fíggjarliga tilfeinginum, og samstundis tryggja, at samanhang er millum politisk mál og tær uppgávur, stovnarnir skulu loysa. Fíggjarmálaráðið heldur, at hóast arbeiðið viðvíkjandi mál- og avriksstýring hevur tikið tíð, verður rætta leiðin gingin.

Landsgrannskoðanin kann samanumtikið bert staðfesta, at Fíggjarmálaráðið enn ikki hevur sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit, og hevur heldur ikki ásett neyvari reglur um, hvussu stýringarmeginreglurnar verða settar í verk, sambært § 7, stk. 5, í kunngerðini.

1.5 Trygg handfaring av upplýsingum

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur í rundskrivi 22. desember 2004 ásett, at leiðslurnar á øllum ábyrgdarøkjum í landsfyrisitingini hava ábyrgd av, fyri 1. februar 2006, at seta í verk KT-trygd, sum neyvari greinað í hesum rundskrivi. Sambært dagførdum rundskrivi 21. juni 2007 varð freistin longd til 1. apríl 2010.

Rundskrivið ásetur, at KT-trygdin er grundað á ISE/ISO 17799 og ISE/ISO 27001 standardin. Somuleiðis verður í rundskrivinum mælt til at nýta DS 484 til at seta í verk ISO 17799 standardin. Leiðslurnar á ábyrgdarøkjunum í landsfyrisitingini skulu gera eina ítøkiliga váðameting fyri egið ábyrgdarøki í sambandi við verksetan av ISO 17799 standardinum.

KT-trygd snýr seg í høvuðsheitum um trúnað við upplýsingum, rættleika við upplýsingum og viðgerð av teimum, umframt atgongd til upplýsingar og telduskipanir. Endamálið við rundskrivinum er at gera nýtsluna av kunningartøknini í landsfyrisitingini trygga.

Landsgrannskoðanin læt í november 2007 løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing "um stjórnan av KT og KT-trygd". Í sambandi við grannskoðan seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin m.a. spurt, um stovnarnir hava gjørt váðameting viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu, og um leiðslurnar hava orðað trygdarpolitikk.

Landsgrannskoðanin staðfestir, at alt ov fáir stovnar hava gjørt váðameting, tíansheldur verksett KT-trygd í tráð við ISO 17799 standardin. Vandi er tí fyri, at upplýsingar hjá almennum stovnum ikki verða handfarnir rætt, umframt at leiðslurnar ikki varnast møguliga misnýtslu av upplýsingum, ella at møgulig misnýtsla ikki verður fyribyrgd. Landsgrannskoðanin heldur tí, at ov nógvir stovnar og aðalráð taka ikki hetta týðandi mál í álvara.

1.6 Millumlanda samstarv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi og hevur í hesum sambandi í 2011 tikið lut í seminarum um fíggjargrannskoðan, um svik, og hevur eisini luttikið á fundi í norðurlendskum-baltiskum samstarvsforum.

Í oktober 2011 var Landsgrannskoðanin á ráðstevnu um "værdi af revision i den offentlige sektor", sum danska ríkisgrannskoðanin skipaði fyri. 142 fólk frá danska Fólkatinginum, almennum stovnum, privatum grannskoðaravirkjum umframt norðurlendskir ríkisgrannskoðarar vóru við.

Sum luttakari í donsku delegatiónini hevur Landsgrannskoðanin í 2010 og 2011 tikið lut á fundum í INTOSAI[3] og EUROSAI[4].

Landsgrannskoðanin miðar ímóti at útinna grannskoðanina í tráð við viðkomandi altjóða grannskoðanarstandardar - nevndir ISSAI[5].

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul til Northern Periphery Programme (NPP).

Í juni 2010 var samstarvsavtala undirskrivað millum ES og Føroyar um gransk-ingarsamstarv - sjeynda rammuskráin fyri gransking og tøkniliga menning, (FP7-Seventh Framework). Landsgrannskoðanin veitir hjálp, í tann mun tað er rímiligt og gjørligt, tá ið eftirlit/grannskoðanir verða framdar av ella undir vegleiðing av ES-nevndini ella ES-grannskoðaradómstólinum (Court of Auditors of the European Union).

Landsgrannskoðanin hevur harafturat umboð í nevndini, sum er í holt við at dag-føra norðurlendsku reglugerðina fyri grannskoðan av stuðli frá Norðurlanda-ráðnum “Revisionsreglemente för medel beviljade av de nordiska parlamenten till Nordiska Ministerrådet och Nordiska Rådet”.

[3] International Organization of Supreme Audit Institutions
[4] European Organisation of Supreme Audit Institutions
[5] International Standards of Supreme Audit Institutions

2 Løgmansfyrisitingin

2.1 Løgmansskrivstovan (LG 2011/202-0111)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu ársfrágreiðing á ávís viðurskifti á Løgmansskrivstovuni. Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin umsitingina vera trygga. Vit høvdu tó nakrar viðmerkingar og nøkur tilmæli, sum enn ikki eru komin upp á pláss.

Trygdarpolitikkur/trygdartiltøk

Løgmansskrivstovan hevur ikki orðað yvirskipaðan trygdarpolitikk.

Í mars 2011 mælti Landsgrannskoðanin Løgmansskrivstovuni til at orða ein yvirskipaðan trygdarpolitikk fyri Løgmansskrivstovuna. Sama mánað boðaði Løgmansskrivstovan frá, at hon var samd við Landsgrannskoðanina.

Sambært Løgmansskrivstovuni hava tey ikki viðkvæmar upplýsingar. Tey hava skrivligar mannagongdir um, hvussu starvsfólk skulu bera seg at í sambandi við KT, bæði innan- og uttanhýsis, herímillum eisini nýtsluna av fartelefonum o.ø.

Í 2011 helt Løgmansskrivstovan seg hava haldgott grundarlag fyri at seta í verk størri KT-trygd, enn hon hevði, m.a. við at taka atlit at tilmælunum í váðametingini hjá Vinnumálaráðnum. Tá ið tað var gjørt, hildu tey, at hóskandi var at fremja eina váðameting fyri Løgmansskrivstovuna.

Í juli 2012 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at neyðugt hevur verið at endurskoða arbeiðið við at orða trygdarpolitikk o.a., eftir at Uttanríkisráðið og Løgmansskrivstovan vórðu løgd saman seint í 2011.

Samanleggingin hevur havt við sær, at økið er vorðið størri og meira fjøltáttað. Harafturat hevur tað verið neyðugt at nýta nógva orku til sjálva samanleggingartilgongdina. Løgmansskrivstovan er tí meira ella minni farin undir hetta arbeiði av nýggjum og roknar við, at komið er væl áleiðis um ársskiftið.

Matstova

Í frágreiðingum okkara seinastu árini hevur verið umrøtt, at almennir stovnar rinda raksturin av matstovum.

Løgmansskrivstovan er samd við Landsgrannskoðanina um, at rættast hevði verið at fingið dagførdar reglur fyri hesum virksemi. Løgmansskrivstovan hevur heitt á Fíggjarmálaráðið, sum umsitur økið, um at skipa fyri, at reglur verða gjørdar fyri matstovuvirksemi hjá tí almenna.

Løgmansskrivstovan hevur í 2011, og aftur í 2012, mint Fíggjarmálaráðið á at gera reglur fyri matstovuvirksemi hjá tí almenna.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at Fíggjarmálaráðið, næstan sjey ár eftir at málið er reist, enn ikki hevur gjørt nakrar reglur.

2.2 Samsýningar til landsstýrisfólk (LG 2011/511-0000)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað samsýningar o.a. hjá løgmanni og landsstýrisfólkunum. Samanumtikið var onki at finnast at.

Samsýningarnar vórðu grannskoðaðar við støði í útreiðslunum til lønir, borðfæ og kostnaðarendurgjøld fyri desember 2011, umframt við at samanbera hesar útreiðslur fyri alt árið 2011 hjá landsstýrinum við samsvarandi útreiðslur av somu fólkum í Løgtinginum.

Samsýningar til løgmann og landsstýrisfólk eru ásettar í Ll. nr. 10/1993 og verða javnaðar við somu vanligu viðbótum, sum tænastumenn fáa. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum dagførir yvirlitið yvir hesar samsýningar. Seinast javnaðu árligu upphæddirnar eru frá 1. oktober 2010. Sambært lønartalvu hjá Tænastumannafelagnum og yvirliti frá Lønardeildini eru tær, í krónum:

	Løgmaður	Lands-stýrisfólk	Viðmerking
Mánaðarløn	57.814,82	49.191,18	§ 1, stk.1, § 7
Árligt borðfæ	85.410,68	28.470,23	§ 1, stk.2, §§ 7-8
Árligt kostnaðarendurgjald sambært § 1, stk.4 (í mun til bústað):			§ 1, stk.4, §§ 7-8
Suðurstreymoy, undantikið Tórshavn, Argir, Hoyvík, Hvítanes	56.940,45	56.940,45	
Norðstreymoy	78.293,12	78.293,12	
Eysturoy	99.645,79	99.645,79	
Sandoy og Vágar	142.351,13	142.351,13	
Aðrastaðni	163.703,80	163.703,80	
Árligt kostnaðarendurgjald smb. § 1, stk. 5 (umframt frí hús):	17.082,14	17.082,14	§ 1, stk.5, §§ 7-8

Fer landsstýrisfólk frá, verður viðkomandi samsýntur í 3 ella 6 mánaðir alt eftir, um setanartíðarskeiðið hevur verið styttri ella longri enn 1 ár.

Samsýningarnar o.a. til løgmann og landsstýrisfólk fyri desember 2011 vóru goldnar frammanundan, síðst í november 2011, og vóru tilsamans 718 t.kr. Nýtt landsstýri tók við í november 2011 við sitandi løgmanni. Í fráboðan nr. 148/2011 “um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar” eru tey frá-farandi landsstýrisfólkini og tey settu nevnd. Lønir eru goldnar hesum fólkum, meðan bert sett landsstýrisfólk hava fingið borðfæ og kostnaðarendurgjald.

Samanumtikið er niðurstøðan av grannskoðanini, at lønir og samsýningar, sum eru goldnar landsstýrisfólkum fyri desember 2011, eru sambært galdandi reglum og avtalum.

2.3 Lønir til løgmansstjóra og aðalstjórar (LG 2011/511-0000)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað lønir o.a. hjá løgmansstjóranum og aðalstjórunum. Samanumtikið vísir grannskoðanin, at útreiðslurnar eru goldnar sambært galdandi ásetingum. Tó er ymiskt, hvussu fráfarnir aðalstjórar verða løntir.

Grannskoðanin av lønum o.ø. til løgmansstjóran og aðalstjórarnir varð gjørd við støði í útreiðslunum fyri desember mánað 2011. Lønirnar, tilsamans 490 t.kr., vórðu goldnar út forút, síðst í november. Landsgrannskoðanin hevur eisini við stakroyndum kannað nakrar ferðauppgerðir hjá løgmansstjóranum og aðalstjórunum. Onki var at finnast at.

Løgmansstjórin og aðalstjórarnir verða løntir ávikavist sambært 40. og 39. lønarflokki í semju millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið. Í semjuni millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið frá 2001 varð viðbót løgd afturat lønini. Upphæddirnar eru seinast javnaðar 1. oktober 2010 og eru mánaðarliga, í krónum:

	Løgmansstjóri	Aðalstjórar
Mánaðarløn	57.814,82	52.660,64
Aðalstjóraviðbót	4.955,08	4.955,08

Løgmansstjórin og aðalstjórarnir eru settir í starv sum tænastumenn sambært Ll. nr. 31/1971 “um tænastumenn landsins” v.s.b. Tá ið grannskoðanin varð framd, vóru tvey størv røkt av fyribilssettum aðalstjórum, annað síðani mai 2011 og hitt síðani mars 2012.

Nakrir persónar, sum áður hava verið aðalstjórar, røkja nú onnur størv í almennu fyrisitingini. Teirra lønir eru ymiskar, úr 36. lønarflokki, 40.796,19 kr. um mánaðin, upp í 39. lønarflokk, 52.660,64 kr. um mánaðin.

Spurdur, hvør ásetur lønirnar hjá fráfarnum aðalstjórum, og eftir hvørjum reglum tær verða ásettar, hevur løgmaður greitt frá, at tá ið aðalstjórar eru farnir frá, uttan sjálvir at hava sagt seg úr starvi, hava umstøðurnar verið ymiskar.

Í hvørjum føri sær er serstøk avtala gjørd millum setanarmyndugleikan og viðkomandi aðalstjóra grundað á støðuna, ið hevur verið. Slíkar avtalur verða gjørdar í samráði við viðkomandi landsstýrismann, og avtalurnar verða vanliga ikki staðfestar, uttan at tær hava verið umrøddar ella viðgjørdar saman við lønardeildini. Felags fyri tær semjur, ið eru gjørdar fyri fráfarnar aðalstjórar, er, at aðalstjórarnir hava varðveitt somu eftirlønarskipan, ið var galdandi, meðan teir vóru aðalstjórar.

Røkir ein fyribils settur starvið sum aðalstjóri, verður hann løntur samsvarandi ta løn, sum ein aðalstjóri í føstum starvi fær, eisini um hann ikki er tænastumaður.

3 Fíggjarmál

3.1 Roknskaparviðurskifti o.a.

3.1.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2011/100-0001)

Seinastu nógvu árini hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum.

Landsstýrismaðurin sigur orsøkina vera eina ógvusliga mótstøðu frá grunnum og stovnum at koma við í fíggjarlóg og í landsroknskap. Ein avleiðing er, at ikki hevur borið til at fingið politiska semju um spurningin.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at arbeitt verður fram ímóti, at tað verður avlagdur roknskapur í trimum geirum, land, kommunur og sosialar skipanir/grunnar, sum samlað verður almenni roknskapurin.

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava aftur og aftur víst á fleiri grundleggjandi ivaspurningar, tá ið ræður um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti:

- um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum,
- um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum,
- um allir skattir/øll gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini,
- um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini, og
- um roknskapirnir hjá øllum stovnum og grunnum verða grannskoðaðir og lagdir fyri Løgtingið sambært galdandi lóggávu.

Í august 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið hevði tikið støðu í málinum, so grunnar o.o., sum stríð hevði staðist um, fóru at verða tikin við í landsroknskapin. Sambært § 2, stk. 2, í Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” kann Landsstýrið gera av, at lógarinnar reglur um roknskaparhald og reglur, sum eru gjørdar sambært lógini, skulu galda fyri stovnar, feløg, grunnar o.o.:

- hvørs útreiðslur ella roknskaparlig hall verður goldið við landsstudningi ella við gjøldum, avgjøldum ella aðrari inntøku sambært lóg, ella
- sum fáa kapitalinnskot, studning, lán, veðhald o.t. ella annan stuðul frá landinum ella frá einum stovni, sum kemur undir nr. 1, um so er, at kapitalinnskotið hevur munandi týdning fyri móttakaran.

Sambært landsstýrismanninum fór Fíggjarmálaráðið at krevja av almennum grunnum, at teir fylgdu roknskaparreglunum, og at teir hvønn mánað, frá 1. januar 2010, skuldu senda Fíggjarmálaráðnum frágreiðing um roknskapartøl.

Í oktober 2010 kunnaði landsstýrismaðurin um, at onki av týdningi var hent á hesum øki síðani seinastu frágreiðing frá Landsgrannskoðanini. Landsstýrismaðurin segði orsøkina vera eina ógvusliga mótstøðu frá grunnum og stovnum at koma við í fíggjarlógina og í landsroknskapin. Ein avleiðing var, at ikki hevði borið til at fingið politiska semju um spurningin.

Í uppskoti til samtyktar, um grannskoðan av almennum roknskapum fyri fíggjarárið 2009 (Lm. nr. 75/2010), hildu løgtingsgrannskoðararnir, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki kundi skúgva til viks ábyrgdina, at fáa viðurskiftini í rættlag, við at vísa til manglandi politiska semju.

Í januar 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"staðfestast kann, at sama støða enn er galdandi, at tað er ógvuslig mótstøða frá grunnum og stovnum at koma við í fíggjarlógina og í landsroknskapin. Ætlanin er at endurskoða, hvussu fullfíggjanin av landsroknskapinum kann fremjast í verki."*

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at *"arbeitt verður við einum triðja roknskapargeira fyri tað almenna. Ein geiri sum fatar um sosialar skipanir og grunnar. Arbeitt verður við at gera eina roknskaparkunngerð um henda geiran, soleiðis at tað frameftir verður avlagdur roknskapur fyri land, kommunur og sosialar skipanir/grunnar, sum samlað sæð er almenni roknskapurin. Við hesari skipan verða sosialu grunnarnir sostatt ikki tiknir við í landsroknskapin.*

Mett verður, at tað verður lættari at fáa undirtøku fyri hesi skipan hjá sosialu grunnunum, sum í dag eru uttanfyri landsroknskapin."

3.1.2 Tænastumannaeftirlønir o.t. (LG 2011/203-0181)

Í januar 2012 kunnaði landsstýrismaðurin um, at skrásetingin av tænastumannaeftirlønum hevði verið drúgvari enn væntað, men at um 90% var skrásett.

Aktuarur hevur í 2012 mett um skylduna. Hann er komin fram til, at 3,4 mia.kr. er upphæddin, sum tað hevði kostað landinum at keypt seg leysan frá skylduni. Skyldan mótvegis løgmonnum, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum er ikki við í hesari útrokning. Gjaldstovan arbeiðir við at skráseta og rokna ta skylduna.

Í frágreiðingum seinastu mongu árini hevur Landsgrannskoðanin víst á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum hevur ikki verið nøktandi.

Í september 2010 kunnaði landsstýrismaðurin um, at komið var á mál at skráseta eftirlønaraldurin hjá teimum, sum fáa eftirløn. Hjá teimum, sum eru í starvi, var ætlanin, at við árslok 2010 skuldi vera komið so væl áleiðis at skráseta eftirlønaraldur, at til bar við vissu at siga, hvussu stór eftirlønarskyldan hjá landskassanum fór at verða.

Í januar 2012 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umleið 90% var skrásett. Aktuarur hevði fingið tilfarið, og roknað varð við at hava eitt úrslit roknað upp á tey 90%-ini í mars 2012.

Á síðu 248 í landsroknskapinum 2011 undir "Veðhalds- og eftirlønarskyldur" stendur soleiðis:

> *"Landskassin hevur skyldu at rinda teimum eftirløn, sum hava verið tænastumenn, løgmenn, landsstýrismenn ella løgtingsmenn. Somuleiðis hevur landskassin partvísa/fulla eftirlønarskyldu fyri lærarar í fólkaskúlanum, á Sernámsdeplinum, í Adventistaskúlanum, teknisku skúlunum, handilsskúlunum, Føroya læraraskúla og pedagogum á forsorgarstovnum, umframt á øðrum økjum, sum landið hevur yvirtikið frá dønum.*
>
> *Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett tænastumannaskyldurnar og fingið ein aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skylduni nú. Úrslitið er 3,4 mia.kr.*

Komið er fram til talið soleiðis: Skyldan fyri teir tænastumenn, sum eru gjørdir upp higartil, er 3,5 mia.kr. Av hesum verður mett, at danir eiga 400 mió.kr. av skylduni. Nettoskylda landskassans er sostatt 3,1 mia.kr. Roknað verður við, at uml. 10% eru eftir at gera upp. Tey eru ikki við í hesum talinum. Verða 10% løgd afturat, er skyldan samanlagt 3,85 mia.kr. Tá ið danski parturin verður drigin frá, er hon 3,4 mia.kr.
Í talinum vantar skyldan mótvegis løgtingsmonnum og landsstýrismonnum. Arbeitt verður í løtuni við at skráseta og rokna ta skylduna. Tá ið skyldan er roknað, er roknað við eini uppgerðarrentu á 1%. Tað er rentan, sum aktuarurin hevur mett at vera mest sannlíka í løtuni. Rentan er roknað sum munurin millum tað avkastið, sum eitt lívstryggingarfelag hevði kunnað fingið burturúr, og mettu lønarhækkanina í tíðarskeiðinum. Rentustøðið, sum roknað verður við, ávirkar upphæddina ógvuliga nógv."

3.2 Fíggjarmálaráðið (LG 2011/203-0111)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur umrøtt málið um stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit við Gjaldstovuna. Av tí at ógreiða hevur verið um heitini í roknskaparkunngerðini, og hvussu meginreglurnar verða settar í verk, er ætlanin at dagføra ásetingarnar í roknskaparkunngerðini.

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað fyrisitingina í Fíggjarmálaráðnum.

3.2.1 Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Endamál, virksemi og uppgávur Fíggjarmálaráðsins eru orðaðar og lýstar í viðmerkingunum til fíggjarlógina.

Fíggjarmálaráðið hevur ikki enn sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit. Fíggjarmálaráðið hevur heldur ikki skrásetingar, sum í nøgd og góðsku kunnu lýsa, hvat ráðið avrikar, og hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til uppgávurnar hvør sær.

Umframt at Fíggjarmálaráðið skal hava egnar stýringarmeginreglur, hevur ráðið eisini eftirlit við, at onnur aðalráð gera mál- og avrikssáttmálar. Fíggjarmálaráðið ætlar í 2012 at fáa egnar sáttmálar gjørdar, samstundis sum hugt verður eftir, um hini aðalráðini gera mál- og avrikssáttmálar.

Sambært § 7, stk. 1, í kunngerð nr. 22/2007, sum Fíggjarmálaráðið sjálvt hevur sent út, skulu aðalráð og stovnar teirra í seinasta lagi 1. januar 2010 hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit o.t., og sambært § 7, stk. 5, í somu kunngerð skal Fíggjarmálaráðið áseta neyvari reglur um, hvussu stýringarmeginreglurnar skulu verða settar í verk. Fíggjarmálaráðið hevur ikki gjørt nakra beinleiðis vegleiðing ella rundskriv í hesum sambandi. Nakað av tilfari liggur á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni undir heitinum "mál og avrik". Hinvegin eru reglur partvíst gjørdar í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum frá 21. september 2011 "um eftirlit og at taka neyðug búskaparlig atlit", har hugtøkini sparsemi, framleidni, virkisføri og fíggjarstýring verða allýst.

Fíggjarmálaráðið hevur kunnað um, at ráðið støðugt arbeiðir við málum og avrikum við at spyrja aðalráðini, hvussu støðan er á teirra øki, og við at vísa á skyldurnar sambært roknskaparkunngerðini, játtanarskipanini o.a. Hóast reglur ikki eru gjørdar fyri, hvussu stýringarmeginreglur verða settar í verk, hevur tað

ikki forðað fyri, at aðalráðini gera mál- og avrikssáttmálar. Soleiðis sum Fíggjarmálaráðið fatar støðuna, verða hesir sáttmálar í alt størri mun ein týðandi lutur í at røkka endamálinum, at fáa sum mest burturúr almenna fíggjarliga tilfeinginum, og samstundis tryggja, at samanhang er millum politisk mál og tær uppgávur, stovnarnir skulu loysa. Fíggjarmálaráðið heldur, at hóast arbeiðið viðvíkjandi mál- og avriksstýring hevur tikið tíð, verður rætta leiðin gingin.

Landsgrannskoðanin kann samanumtikið bert staðfesta, at Fíggjarmálaráðið enn ikki hevur sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit, og hevur heldur ikki ásett neyvari reglur um, hvussu stýringarmeginreglurnar verða settar í verk, sambært § 7, stk. 5, í kunngerðini.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið hevur umrøtt stýringarmeginreglurnar um mál og nádd úrslit við Gjaldstovuna, sum byrjaði arbeiðið við mál- og avrikssáttmálum, og sum hevur orðað ásetingarnar í roknskaparkunngerðini. Gjaldstovan gjørdi fyri fleiri árum síðani reglurnar í vegleiðingini um mál- og avrikssáttmálar. Ætlanin er ikki at gera avrikssáttmálar fyri aðalráðini, men at aðalráðini gera avrikssáttmálar við stovnarnar, tey varða av.

Landsstýrismaðurin sigur víðari, at av tí at ógreiða hevur verið um hetta og heitini eru so ymisk, er ætlanin at dagføra ásetingarnar í roknskaparkunngerðini.

3.2.2 Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerð

Fíggjarmálaráðið hevur eina roknskaparreglugerð frá 2001, sum ikki er dagførd. Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiða tey við at dagføra hana.

Ognaryvirlit

Fíggjarmálaráðið hevur onki yvirlit yvir sínar ognir, sambært roknskaparkunngerðini og vegleiðing frá Føroya Gjaldstovu. Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiða tey við at gera ognaryvirlit.

Telefonútreiðslur hjá Fíggjarmálaráðnum

Fíggjarmálaráðið hevur avtalu við veitara um samskiftistænastur. Í arbeiði sínum hava øll starvsfólkini fartelefonir, sum tey eisini kunnu taka við sær til hús. Ráðið hevur ongar reglur um privata nýtslu av telefonunum, men ráðið arbeiðir í løtuni við at fáa skattligu viðurskiftini í rættlag.

Í rundskrivi frá Løgmansskrivstovuni eru ásettar reglur “um nýtslu av fartelefonum”. Sum meginregla skulu telefonirnar einans verða nýttar til samskifti, sum hevur við arbeiðsuppgávur stovnsins at gera, og telefonirnar skulu verða skrásettar sum ogn hjá arbeiðsgevaranum. Fíggjarmálaráðið fer at halda seg til rundskrivið, og samanumtikið heldur ráðið, at hetta rundskrivið kann nýtast.

Landsgrannskoðanin hevur gjørt Fíggjarmálaráðnum varugt við, at hava starvsfólk fría telefon frá Fíggjarmálaráðnum, áliggur tað, sambært skattalógini, ráðnum at geva TAKS hesar upplýsingar. Fíggjarmálaráðið hevur kunnað um, at ráðið fer at seta seg í samband við TAKS um skyldurnar viðvíkjandi fríari telefon.

Lønarumsiting

Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina í skipanina TotalView. Tey skráseta komu, fráveru, feriu o.a. Tey skráseta ikki, hvat arbeiðstíðin verður nýtt til.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønirnar hjá nøkrum starvsfólkum og samanhildið setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Onki var at finnast at.

KT-viðurskifti og váðameting

Allar skipanir hjá Fíggjarmálaráðnum eru undir Landsnet og koma undir tær nýtslu- og trygdarreglur, sum Landsnet hevur fyriskrivað.

Fíggjarmálaráðið hevur ikki gjørt sjálvstøðuga váðameting um KT-trygd, sambært rundskrivi Vinnumálaráðsins. Fíggjarmálaráðið arbeiðir við at gera váðameting.

Journalisering

Fíggjarmálaráðið hevur eina journalskipan, men hevur ikki gjørt nakra vegleiðing, hvussu hon skal verða nýtt. Ráðið arbeiðir við at gera vegleiðingina.

3.2.3 Um ávísar útreiðslur (LG 2011/203-0999)

Reglur um ferðing uttanlands

Hóast 10 ár eru liðin, síðani reglurnar um bonusstig vórðu orðaðar í rundskrivi, er onki ítøkiligt hent, og rundskrivið er óbroytt. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at rundskrivið um tænastuferðir uttanlands í næstum verður broytt, soleiðis at stovnarnir ikki longur skulu skráseta og brúka bonusstigini.

Rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum 1. januar 2003 “um tænastuferðir uttanlands” § 6, stk. 5, ásetur, at *“bonusstig, avsláttur o.l., ið verða vunnin á tænastuferðum hoyra til tænastustaðin, og mugu einans nýtast til tænastuferðir. Tænastustaðurin hevur skyldu at tryggja, at vunnin bonusstig, avsláttur o.l. verður brúktur soleiðis, at samlaðu ferðaútreiðslurnar hjá stovninum til tænastuferðir minka”.*

Seinnu árini hevur Fíggjarmálaráðið ásannað, at tað er nærum høpisleyst at umsita bonusskipanirnar, og at tað er torført at tryggja, at fríir ágóðar verða skattaðir. Fíggjarmálaráðið hevur umrøtt ávísar ætlanir. Onki ítøkiligt er hent, og rundskrivið er óbroytt.

Í januar 2012 boðaði landsstýrismaðurin frá, at *“viðvíkjandi ferðing uttanlands má ásannast, at onki nýtt er í málinum viðvíkjandi bonusstigum. Fíggjarmálaráðið hevur knýtt hetta saman við arbeiðinum um alment innkeyp. Enn er eingin sáttmáli um alment innkeyp annar enn tann hjá Heilsuverkinum gjørdur um millumlanda flúgving, men er ætlanin hjá Fíggjarmálaráðnum at fara eftir hesum øki í næstum.”*

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *“bíðað hevur verið eftir einum útspæli frá Atlantsflogi um avsláttarskipan fyri landið sum heildarkunda. Enn er onki útspæl komið. Tískil er avgjørt, at rundskrivið um tænastuferðir uttanlands verður broytt í næstum soleiðis, at ásetingin um bonusstig verður broytt til, at stovnarnir ikki longur nýtast at skráseta og brúka bonusstigini. Framhaldandi verður galdandi, at bonusstig og aðrar avsláttarskipanir fyri ferðaseðlar, sum landið hevur goldið fyri, ikki kunnu nýtast privat.”*

Reglur um fartelefon- og aðrar samskiftisútreiðslur

Flestu stovnsleiðarar og øll aðalráð hava latið starvsfólki sínum fartelefon ókeypis at nýta sum arbeiðsamboð, og fartelefonin verður vanliga tikin við heim til hús.

Í rundskrivi nr. 1/2002 frá Løgmansskrivstovuni er m.a. ásett, at fartelefon, sum verður latin starvsfólki ókeypis at nýta sum arbeiðsamboð, skal sum meginregla einans verða nýtt til samskifti, sum hevur beinleiðis við arbeiðsuppgávur stovnsins at gera.

Í rundskrivi nr. 2/2001, frá TAKS "um fartelefon" er ásett, at fartelefon, sum arbeiðsgevari letur starvsfólkum sínum at nýta ókeypis, meginregluliga er at rokna sum frí telefon, sambært reglunum um fríar ágóðar. Tekur løntakarin telefonina við til hús, talar alt fyri, at hon eisini verður nýtt privat.

Bert fáir stovnar hava skipaða mannagongd, sum tryggjar, at starvsfólk endurrinda møguliga privata nýtslu.

Fíggjarmálaráðið heldur, at sum meginregla eigur almennur arbeiðsgevari ikki at lata starvsfólki fartelefon ella aðra telefon at nýta ókeypis. Grundað á hesa meginreglu eiga nógvar fráboðanir ikki at vera til TAKS um fría telefon. Fíggjarmálaráðið heldur tað vera eina leiðsluuppgávu á hvørjum stovni ella ráði sær at tryggja, at misnýtsla ikki fer fram.

Í januar 2012 greiddi landsstýrismaðurin frá, at *"viðvíkjandi fartelefon- og øðrum samskiftisútreiðslum er tað hent, at aðalráðini á sumri 2011 bjóðaðu út fartelefontænastuna fyri 2 ára tíðarskeið. Soleiðis sum tænastan nú er skrúvað saman, so verður goldið fast mánaðargjald uttan mun til nýtslu fyri at tosa við fartelefon, senda sms og tosa við fastnet. Ætlanin er framvegis saman við Lønardeildini og TAKS at endurskoða verandi rundskriv, og verður hetta væntandi gjørt til várs."*

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"arbeitt verður við at fáa dagført rundskrivini hjá TAKS og Lønardeildini um fartelefon, og verða hesi í næstum broytt."*

3.3 Avstemman av lønum (Lønarskipanin) (LG 2011/511-0000)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu frágreiðing á, at spurningurin um ásetingina í § 118 í skattalógini, um at geva TAKS váttan um goldnar lønir, var ikki loystur. TAKS hevur í juni 2012 boðað frá, at avstemmanin, sum Gjaldstovan ger móti skattaskipanini, er nøktandi.

Í mai 2011 lat Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum eina frágreiðing um lønir, goldnar um Felags Lønarskipanina í 2009. Í hesum sambandi kannaði Landsgrannskoðanin m.a., hvussu lønirnar verða stemmaðar av.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2008, vístu løgtingsgrannskoðararnir m.a. á, at privatir grannskoðarar høvdu gjørt vart við, at tað ikki bar til longur hjá stovnum at stemma sínar lønir av við skattaskipanina, tí at øll løn hjá tí almenna varð goldin út umvegis sama V-tal.

Í § 118 í skattalógini eru reglur um, at øll, sum ávísa A-inntøku, skulu lata líkningarvaldinum upplýsingar til eftiransing við skattalíkningini. Skattalógin ásetur, hvørjar upplýsingar talan er um.

Sambært frágreiðingini hevði Gjaldstovan greiða transaktiónsslóð yvir goldnar lønir gjøgnum árið, og stemmaði hvønn mánað lønarflytingarnar av við Barsils-

skipanina, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Arbeiðsloysisskipanina. Harvið helt Gjaldstovan, at A-inntøkurnar eisini vórðu stemmaðar av mánaðarliga.

Leiðslan á Gjaldstovuni helt ikki, at nýtta arbeiðsorkan stóð mát við tað, sum fekst burturúr at stemma lønirnar av við skipanina hjá TAKS við ársenda.

Spurningurin um ásetingina í § 118 í skattalógini, at geva TAKS váttan um goldnar lønir, var tískil ikki loystur.

Í januar 2012 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Gjaldstovan og TAKS arbeiða við einari loysn, so spurningurin um at stemma av millum TAKS og Gjaldstovuna verður loystur.

Í skrivi til Gjaldstovuna í juni 2012 hevur TAKS váttað:

- at Gjaldstovan kann prógva, at Lønarskipanin hjá landinum stemmar við skattaskipanina hjá TAKS, og
- at Gjaldstovan skrivar inn í krøvini til at góðkenna mánaðarroknskapin, at stovnsleiðarin váttar, at lønir ikki verða goldnar uttanum lønarskipanina hjá landinum.

Lógardeildin og roknskapardeildin hjá TAKS eru samd um at góðkenna hesa avstemman, sum váttan um goldnar lønir sambært § 118 í skattalógini. Sostatt er spurningurin um avstemman sambært § 118 í skattalógini loystur.

Aðrir partar av frágreiðingini um Felags Lønarskipanina verða umrøddir undir Almannamálum.

3.4 Fíggjarstøðan 2011 (LG 2011/300-0000)

3.4.1 Fíggjarstøðan ikki fullfíggjað

Fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarstøðuni. Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum síðani fyrst í nítiárunum víst á, at vit halda tað vera ivasamt, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan verða hildnar.

3.4.2 Avstemman av fíggjarstøðuni o.a.

Í sambandi við kanning av postum í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum 2011 hava vit í stóran mun bygt á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

3.4.3 Høvuðstøl

Á talvuni eru samandráttir úr fíggjarstøðunum við árslok árini 2008 - 2011.

mió.kr.

	2008	2009	2010	2011
OGN				
Kapitalinnskot	544	478	509	538
Virðisbrøv	1.089	1.239	1.239	1.336
Útlán	649	642	638	687
Áogn o.a.	490	491	575	613
Tøkur peningur	2.508	2.038	2.509	2.869
Ogn tilsamans	**5.280**	**4.888**	**5.470**	**6.043**
SKULD				
Skuld	3.590	3.903	4.954	5.604
Útjavningarkonta	1.690	985	516	439
Skuld tilsamans	**5.280**	**4.888**	**5.470**	**6.043**

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og av skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot", og partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

3.4.4 Fíggjarligur útbúnaður (LG 2011/300-0102)

Kapitalinnskot

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	477.808	508.782	538.234

Kapitalinnskot fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

Í 2010 hækkaði kapitalognin 31 mió.kr., úr 477,8 mió.kr. til 508,8 mió.kr., og í 2011 hækkaði kapitalognin 29,4 mió.kr. til 538,2 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri fíggjarárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút. Gjaldstovan hevur boðað frá, at av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið fíggjarár ikki er tøkur, fyrr enn aftaná at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá

einari metan, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá Fíggingargrunninum. Sí talvu niðanfyri:

mió.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	2010	2011
Kapitalogn við ársbyrjan	477,8	508,8
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í rokn skapinum hjá Fíggingargrunninum	31,0	29,4
Kapitalogn við ársenda	**508,8**	**538,2**

Fíggingargrunnurin eigur nú 33,42% av partabrøvunum í P/f BankNordik. Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2011 er ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 267,4 mió.kr., sum svarar til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2011. Kursvirðið var 207,2 mió.kr. lægri enn við árslok 2010, tá ið kursvirðið var 474,6 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum árini 2010 og 2011, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í P/f BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

Í nógv ár hevur Løgtingið, í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin, mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Virðisbrøv

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	1.238.699	1.238.699	1.335.999

Ongin broyting er í virðisbrøvunum frá 2009 til 2010, men í 2011 eru tey hækkaði 97,3 mió.kr. Orsøkin er, at partapeningurin í P/f Vága Floghavn er hækkaður við hesari upphædd. Sambært roknskapinum hjá P/f Vága Floghavn 2011 er hækkingin ikki skrásett sum felagskapitalur, men sum “Inngoldin felagskapitalur – ikki skrásettur”, undir stuttfreistaðari skuld.

Yvirlit yvir partabrøv, sum eru skrásett í landsroknskapinum:

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2009	2010	2011	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	235.000	235.000	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	17.375	17.375	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	500	500	500	Ja
P/f Vága Floghavn	579.818	579.818	677.118	Ja
P/f Atlantic Airways	85.090	85.090	85.090	Ja *)
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	4.200	4.200	Ja
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	200	200	200	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	32.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
Partabrøv tilsamans	**1.238.699**	**1.238.699**	**1.335.999**	

*) Partabrøvini eru skrásett "elektroniskt" og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.

Í sambandi við umskipan av kapitalviðurskiftunum í P/f Smyril Line samtykti Løgtingið 23. september 2011, við Ll. nr. 128/2011 "um heimildir landsstýrismansins viðvíkjandi kapitalviðurskiftunum í P/f Smyril Line", at niðurskriva verandi partapening til innara virðið, og samstundis at sleppa kravinum um, at landið skal velja meirilutan av nevndini, og kravinum um, at landið skal hava atkvøðurætt fyri tey partabrøv, sum Framtaksgrunnurin fekk við umleggingini av ábyrgdarláninum. Samstundis tekna aðrir íleggjarar nýggjan partapening. Sambært viðmerkingunum til lógina hevur umleggingin ikki við sær útreiðslur ella inntøkur fyri landskassan, men landsins lutfalsligi partur og ávirkan minkar munandi.

Í sjey feløgum eigur landið allan partapeningin:

t.kr.

Roknskapartøl 2011	Brutto vinningur	Árs-úrslit	Samlað ogn	Eginpeningur
P/f Vágatunnilin	19.413	1.819	207.099	166.024
P/f Norðoyatunnilin	19.691	4.453	318.131	234.401
P/f Føroya Tele (samtak)	248.039	50.903	796.146	376.768
P/f Postverk Føroya	60.090	-9.217	215.112	23.474
P/f Fiskaaling	12.272	-1.248	28.503	18.248
P/f Føroya Lívstrygging (samtak)*)	349.774	-315.978	4.986.188	808.512
P/f Vága Floghavn	23.503	1.145	689.939	573.822
Tilsamans	**732.782**	**-268.123**	**7.241.118**	**2.201.249**

*)Tryggingargjøld fyri egna rokning tilsamans

Viðmerkjast skal, at parturin hjá minnilutapartaeigarunum av eginpeninginum í Føroya Tele var 9.964 t.kr. og í Føroya Lívstrygging 85.782 t.kr.

Samlaða úrslitið hjá hesum feløgum var eitt hall á 268,1 mió.kr. eftir skatt, og samlaði eginpeningurin var 2,2 mia.kr. Til samanberingar kann verða nevnt, at í

2010 var samlaða úrslitið hjá somu feløgum ein vinningur á 27,7 mió.kr., og eginpeningurin var 1,5 mia.kr.

Høvuðsorsøkin til samlaða hallið í 2011 er, at Føroya Lívstrygging hevði eitt hall á 316 mió.kr. Sambært roknskapinum hjá Føroya Lívstrygging fyri 2011 kemst hallið serliga av, at av lækkandi rentu á fíggjarmarknaðinum eru lívstryggingar-avsetingar hækkaðar. Eisini er upplýst í roknskapinum hjá Føroya Lívstrygging fyri 2011, at kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 "um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum" frá Tryggingareftlitinum er broytt við virknaði frá 2011 soleiðis, at virðisjavnan av landskassaveðhaldi ikki longur skal førast yvir raksturin, men skal bókast beinleiðis á eginognina. Roknskapurin fyri 2011 er nógv merktur av, at innroknaða virðið á landskassaveðhaldinum við árslok 2011 var serstakliga stórt. Niðanfyri er talva yvir broytingina av eginognini í 2011:

t.kr.

Føroya Lívstrygging - samtak	
Eginogn 1. januar 2011	89.304
Úrslit 2011	-315.978
Javning av landskassaveðhaldi	949.404
Partur hjá Føroya Lívstrygging	**722.730**
Minnilutapartaeigarar	85.782
Samlað eginogn 31. desember 2011	**808.512**

Samlaða eginognin 1. januar 2011, íroknað minnilutapartaeigarar, var 171.058 t.kr.

Yvirlit yvir samlaðu roknskapartølini árini 2008 - 2011 fyri feløg, sum landið eigur allan partapeningin í, síggjast á talvuni niðanfyri:

t.kr.

Roknskapartøl samlað, landið eigur allan partapeningin	**Brutto vinn-ingur/søla**	**Ársúrslit**	**Samlað ogn**	**Egin-peningur**
2008	925.524	-42.241	5.005.434	1.300.876
2009	695.048	-23.045	5.185.597	1.421.735
2010	714.585	27.672	5.983.268	1.524.940
2011	732.782	-268.123	7.241.118	2.201.249

Vinnumálaráðið kunnaði í 2010 um, at tað var farið undir eina tilgongd at einskilja P/f Føroya Lívstrygging í samsvari við Ll. nr. 59/2006 "um at einskilja P/f Føroya Lívstrygging".

Í mai 2011 varð keypsavtala gjørd millum Føroya Landsstýri og BankNordik, at BankNordik skuldi keypa helvtina av Føroya Lívstrygging fyri 35 mió.kr. við tí fyrivarni, at kappingarmyndugleikarnir góðtóku handilin. Í august 2011 góðkendi Kappingareftirlitið handilin.

Í tíðindaskrivi í mars 2012 boðaðu BankNordik og Vinnumálaráðið frá, at semja var um, at handilin við partabrøvunum varð av ongum, og at sølan tí var avlýst. Sambært tíðindaskrivi frá BankNordik var orsøkin, at viðurskiftini fyri lívs-tryggingarvirksemi vóru broytt heilt nógv. Føroya Landsstýri heldur tí fram sum eigari av Føroya Lívstrygging.

Virðismeting

Gjaldstovan hevur sett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Sama er galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2011 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

Innara virðið/kursvirðið, sambært ársfrásagnunum 2011 hjá 11 feløgum, samanborið við keypsvirðið:

t.kr.

2011	Keypsvirðið smb. landsroknskapinum	Innara virðið/ kursvirðið *)
P/f Vágatunnilin	160.300	166.024
P/f Norðoyatunnilin	235.000	234.401
P/f Vága Floghavn	677.118	573.822
P/f Føroya Tele	77.948	376.768
P/f Postverk Føroya	43.000	23.474
P/f Fiskaaling	17.376	18.248
P/f Føroya Lívstrygging	500	808.512
P/f Atlantic Airways	85.090	73.506
P/f Virðisbrævamarknaður Føroya	4.200	5.332
P/f Elektron	2.347	9.603
P/f Smyril Line	32.760	34.353
Partabrøv, tilsamans	**1.238.339**	**2.324.043**

*) Á talvuni er innara virðið brúkt í øllum fyritøkunum uttan í P/f Atlantic Airways, sum er skrásett á keypsskála. Har er brúkt kursvirðið 31. desember 2011 á íslendska keypsskálanum.

Sum víst á í yvirlitinum, er keypsvirðið í fleiri førum munandi lægri enn innara virðið-/kursvirðið. Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar av almennum fyritøkum hava vit mælt til at endurskoða verandi roknskaparreglur, og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið/kursvirðið.

Fíggjarmálaráðið kunnaði í oktober 2005 um, at ráðið ætlaði at nýta innara virðið í landsroknskapinum 2005. Tað varð ikki gjørt tá, og er heldur ikki gjørt í landsroknskapunum eftirsíðan.

Sambært landsstýrismanninum hevur Gjaldstovan slept ætlanini at nýta innara virðið í landsroknskapinum, í øllum førum fyribils.

Í 2008 kannaði Landsgrannskoðanin, um partabrøvini, í teimum førum har “pappírs” partabrøv eru, vóru til skjals. Landsgrannskoðanin fekk goymsluyvirlit frá Værdipapircentralen, har partabrøvini bert eru elektroniskt skrásett. Síðani hevur Landsgrannskoðanin bert kannað broytingar í partabrævagoymsluni.

Vinningsbýti hjá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

t.kr.

	2009	2010	2011
Føroya Tele	5.000	6.000	6.000

Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	185.390	224.286	253.997

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, lán til sjálvsognarstovnar og studningslán sambært Ll. nr. 34/1993, Ll. nr. 48/1964, Ll. nr. 42/1976 og Ll. nr. 26/1997.

Rentu- og avdráttarfríu lánini eru hækkað 29,7 mió.kr. netto í 2011. Studningslán eru veitt sambært Ll. nr. 48/2009 "um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli" til ellis- og røktarheimið í Vági, ellis- og røktarheimið í Vestmanna, røktarheim í Tórshavn og røktarheim í Klaksvík, tilsamans 33,1 mió.kr. Allar 33,1 mió.kr. eru støðlaðar. Í 2011 er ein frágongd av rentu- og avdráttarfríum lánum á 3,4 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir tilgongdunum í 2011 í rentu- og avdráttarfríu lánunum. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

Útlán

t.kr.

	2009	2010	2011
Áogn landskassans	675.297	632.939	653.714
Sett av ímóti tapi	-218.575	-219.315	-220.628
Sambært roknskapinum	**456.722**	**413.624**	**433.086**

Talan er um eitt gjaldførislán til Ríkisstjórn Íslands á 300 mió.kr., umframt veðhaldsútlegg, lestrarlán, lán til Húsalánsgrunnin, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán.

Sett er av ímóti tapi. Virðið á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum er sett til kr. 0. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Útlánini eru hækkað 19,5 mió.kr. netto í 2011. Høvuðsorsøkin til hækkingina er, at 18 mió.kr. eru veittar í nýggjum láni til at byggja ellis- og røktarheim í Vági. Broytingar annars eru bert smærri tilgongdir og vanligt afturgjald.

Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir broytingum frá árslok 2010 til árslok 2011. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

3.4.5 Áogn (LG 2011/300-0103)
Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

	2009	2010	2011
Áogn landskassans	321.070	384.337	383.229
Sett av	-115.383	-124.517	-60.260
Sambært roknskapinum	**205.687**	**259.820**	**322.969**

Broytingin frá 2010 til 2011 er, at skuldararnir eru øktir 63,1 mió.kr. netto. Størstu broytingarnar kunnu útgreinast soleiðis:

t.kr.

Broytingar 2010 – 2011	
Vanligur landsskattur	43.489
Meirvirðisgjald	34.499
Tollavgjøld	5.878
Kapitalvinningsskattur	-8.600
Felagsskattur	-15.740

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Landsverk, Kringvarpinum, sjúkrahúsunum og øðrum stovnum. "Aðrir skuldarar" eru m.a. ikki avroknað yvirskot (føroyski parturin) frá danska Tjóðbankanum, endalig uppgerð av ríkisstuðli umframt aðrar inntøkur og endurgjøld, sum vanliga verða tíðaravmarkað fyri at geva eina rætta mynd av áognini. Eisini er talan um millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunum o.a.

Niðan fyri er ein útgreining av størstu upphæddunum:

t.kr.

	2009	2010	2011
Landsverk, inntøkufíggjað virksemi	11.861	20.204	40.071
Kringvarp Føroya	15.221	17.316	22.114
Apoteksverkið	19.511	13.989	20.705
Kapitalvinningsskattur	22.741	22.399	14.844
Yvirskot Danmarks Nationalbank	10.161	14.010	14.603
Útgoldið yvirskot frá Landsbanka Føroya	17.417	15.359	13.473
Føroya Realkreditstovnur	0	47.597	0
Ymiskir skuldarar	141.033	104.801	101.088
Tilsamans, sambært roknskapinum	**237.945**	**255.675**	**226.898**

Broytingin frá 2010 til 2011 er netto ein lækking á 28,6 mió.kr. Í høvuðsheitum stavar lækkingin frá, at tær 47,6 mió.kr., sum í 2010 blivu bókaðar sum "skuldarar", tí Føroya Realkreditstovnur í 2011 hevði yvirtikið gjaldførislán (Ll. nr. 35 frá 3. maj 1984) við virknað frá 2010, eru umbókaðar í 2011. Harafturat eru tíðaravmarkingar lækkaðar 8,9 mió.kr. og áogn av kapitalvinningsskatti lækkað 7,6 mió.kr. Hinvegin er áognin av inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverk hækkað 19,9 mió.kr. og áognin hjá Apoteksverkinum hækkað 6,7 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur tikið stakroyndir av tænastu, vøru- og øðrum skuldarum fyri árið 2011 at kanna, um upphæddirnar eru rættar og rætt bókaðar. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

3.4.6 Goymslur

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	47.875	59.212	62.579

Talan er um vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum Landsins, Nám (Útgávuvirksemi), Landsverk, og Tekniska skúla í Klaksvík.

Í landsroknskapinum er goymslan viðvíkjandi inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverk 7.019 t.kr. við árslok 2011. Talan er um goymsluvirðið á Bitumengoymsluni í Hósvík. Sambært serstøkum roknskapi fyri Bitumengoymsluna, sum Grannskoðaravirkið Spekt hevur gjørt í oktober 2012, var goymsluvirðið 6.199 t.kr. við árslok 2011, ella ein munur á 820 t.kr.

Í grannskoðanarprotokollini greiðir grannskoðaravirkið frá, at virðið á goymsluni, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins við ársenda 2011, er sett 820 t.kr. ov høgt. Høvuðsorsøkin er, at Landsverk í sínari uppgerð hevur broytt prísásetingina á petroleum.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið bókaðu goymsluna í landsroknskapinum við goymsluna í serstøkum roknskapum hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Strandfaraskipum Landsins og inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverk. Roknskapirnir hjá Apoteksverkinum og Tekniska Skúla í Klaksvík vóru ikki tøkir, og hinir stovnarnir gera ikki serstakan roknskap. Við undantaki av muninum á goymsluvirðinum av inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverk, stemmaðu roknskapirnir. Sí eisini viðmerking í parti 9.3.5.

3.4.7 Ognir og útbúnaður (LG 2011/300-0101)

Hóast meira enn 16 ár eru liðin, síðani kravið um at skráseta almennar ognir kom í gildi, hava bert fáir stovnar dagført ognaryvirlit.

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum 1. februar 2001 um roknskaparreglugerðir skulu allir stovnar hava yvirlit yvir innbúgv, maskinur, bøkur og annan virðismiklan útbúnað við støði í roknskaparskjølum, og skulu yvirlitini m.a. fevna um slag, útveganarvirði, livitíð, og hvar ognin er. Vit hava fleiri ferðir víst á, at bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

Í sambandi við vitjanir á stovnum í 2011 staðfestu vit aftur, at enn eru fleiri stovnar, sum ikki hava dagførd yvirlit yvir ognir og útbúnað.

Í januar 2012 greiddi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at Gjaldstovan seinasta heyst gjørdi eitt átak mótvegis stovnunum undir Mentamálaráðnum, fyri at fáa teir at skráseta bygningar sínar í Búskaparskipan landsins. Úrslitið var, at flestu stovnar hava sent Gjaldstovuni upplýsingar um bygningar at skráseta.

Fíggjarmálaráðið ætlaði saman við Gjaldstovuni at greina økið, soleiðis at meira málrættað átøk kunnu verða framd.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at tað er framvegis ætlanin, at Fíggjarmálaráðið saman við Gjaldstovuni skal fremja málrættað átøk fyri at fáa stovnar landsins at hava dagførd ognaryvirlit. Sum liður í hesum, er ætlanin at lækka smálutakravið til ognaryvirlit. Tískil verður lagt upp

til, at § 20, stk. 2 í roknskaparkunngerðini verður strikað og stk. 3 broytt samsvarandi hesum. Sambært § 20, stk. 2 í roknskaparkunngerðini skulu stovnarnir hava eitt yvirlit yvir útbúnað o.t., hvørs keypsvirði er minni enn 75 t.kr. Í yvirlitinum skal eisini vera útbúnaður, sum er á stovninum, men sum onnur enn stovnurin eiga.

3.4.8 Tøkur peningur (LG 2011/300-0104)

Inniogn í Landsbankanum

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	1.466.629	1.880.890	2.514.389
Harav minstainnlán	1.780.000	1.870.000	1.780.000
Munur	**-313.371**	**10.890**	**734.389**

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um saldurnar á bankakontunum hjá landskassanum stemma við landsroknskapin. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

Sambært § 6 í Ll. nr. 57/1978 “um Landsbanka Føroya” er Landsbankin bankasamband landskassans. Landsstovnar kunnu eisini nýta bankan sum bankasamband. Sambært § 2 í Ll. nr. 31/1995 “um landskassans innlán og lán í Landsbankanum” skulu innlánini í Landsbankanum í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni árið frammanundan. Viðmerkjast kann, at sambært Hagstovu Føroya er bruttotjóðarúrtøkan fyri 2010 12,9 mia.kr. Sostatt skuldi minstainnlánið í Landsbanka Føroya í 2011 verið um 1,9 mia.kr.

Sambært yvirlitinum frammanfyri var inniognin í Landsbankanum 313,4 mió.kr. minni enn roknaða minstainnlánið í 2009, í 2010 var inniognin 10,9 mió.kr. størri enn roknaða minstainnlánið og í 2011 var inniognin 734,4 mió.kr. størri enn roknaða minstainnlánið.

Banka-, giro- og kassapeningur

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	571.039	628.704	354.603

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv “landið” tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar, við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsbókhald, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Upphæddin í 2011 kann sundurgreinast í tær banka- og girokontur, sum Gjaldstovan umsitur, og tann partin av banka- og girokontum, sum aðrir stovnar umsita (vanligir landsstovnar og landsfyritøkur). Gjaldstovan umsitur 192,5 mió.kr. (ella um 54%) av upphæddini.

Almannastovan, Kringvarp Føroya, Apoteksverkið, Akstovan og Rúsdrekkasøla Landsins hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Tilsamans høvdu hesir stovnar meira enn 130 mió.kr. standandi á peningastovnskontum við árslok 2011.

3.4.9 Skuld (LG 2011/300-0201/0202)

Innanlandsskuld, langfreistað

Í 2011 vórðu meginreglurnar fyri, hvussu lánsbrøv og broytingar í kursvirðum verða viðgjørd, broyttar. Farið er at nýta amortiseringsmeginregluna ístaðin fyri marknaðarvirðið.

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	2.707.697	3.708.227	4.346.098

Við árslok 2011 var talan um 4 lánsbrævarøðir:

- Ein lánsbrævarað (FO-LB 120610), áljóðandi 1.155 mió.kr., sum fall til gjaldingar 11. juni 2012.
- Ein lánsbrævarað (FO-LB 140407), áljóðandi 1.650 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 7. apríl 2014.
- Ein lánsbrævarað (FO-LB 160622), áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 22. juni 2016.
- Ein lánsbrævarað (FO-LB 180610), áljóðandi 127 mió.kr., sum verður niðurgoldin fram til 10. juni 2018.

Sambært landsroknskapinum eru meginreglurnar, hvussu lánsbrøv og broytingar í kursvirðum verða viðgjørd, broyttar í 2011, soleiðis at skuldin ikki sum áður verður tikin upp til marknaðarvirði. Í staðin er farið yvir at nýta amortiserings-meginregluna. Hetta merkir, at lánsbrøv verða tikin við í fíggjarstøðuna við áljóðandi virði, og møguligir kursmunir, sum koma í sambandi við útgávuna, verða avskrivaðir liniert yvir ætlaðu afturgjaldstíðina. Verður partur av lánsbrævarað keyptur aftur fyri tíð, verður tann parturin av útgávukursmuninum, sum hoyrir til henda partin, avskrivaður í afturgjaldsárinum. Sambært lands-roknskapinum er endamálið við broytingini, at rentuútreiðslur landskassans, har kursmunir eisini verða bókaðir, ikki skulu verða merktar av teimum sveiggjum, sum leypandi kursbroytingar í kursvirðunum kunnu hava við sær.

Brævalánini verða seld uttanlands, og óvist er, hvør "keyparin" er. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Annars kann verða viðmerkt, at sambært Búskaparskipan landsins hevur Landsbanki Føroya í juni 2012 tikið eitt nýtt lánsbrævalán á 1.128 mió.kr. (FO-LB 150611). Hinvegin hevur Landsbankin eisini, fyri tíð, í juni 2012 afturgoldið 52,8 mió.kr. av FO-LB 180610.

Uttanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	500.000	500.000	500.000

Talan er um eitt lán á 500 mió.kr., sum stavar frá avtaluni 10. juni 1998 ímillum donsku stjórnina og Landsstýrið. Sambært avtaluni er lánið rentu- og avdráttar-frítt við teimum treytum, sum standa í lánsavtaluni: "Afviklingen af lånet aftales i takt med eventuelle indtægter fra fremtidig råstofudvinding. Dog afskrives gælden efter 20 år, såfremt der ikke på det tidspunkt er startet udvinding af rå-stoffer."

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	574.453	20.957	1.171.100

Sambært Landsbanka Føroya blivu veruligu afturgjøldini:

- Í 2010 fullu 565 mió.kr. til gjaldingar eftir skránni, og eyka vórðu goldnar 99 mió.kr. Tilsamans vórðu goldnar 664 mió.kr. av FO-LB 180610. Í landsroknskapinum stóðu 574 mió.kr. til at falla til gjaldingar í 2010.
- Í 2011 fullu 16 mió.kr. til gjaldingar eftir skránni, og eyka vórðu goldnar 745 mió.kr. Tilsamans vórðu goldnar 761 mió.kr. av FO-LB 120610. Í landsroknskapinum stóðu 21 mió.kr. til at falla til gjaldingar í 2011.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru í juni 2012 goldnar tilsamans 68,9 mió.kr. av FO-LB 180610, harav eru 52,8 mió.kr. goldnar eyka. Harafturat eru í juni 2012 goldnar eftir skránni 1.155 mió.kr. av FO-LB 120610. Tilsamans eru 1.224 mió.kr. goldnar pr. oktober 2012. Í landsroknskapinum standa 1.171 mió.kr. til at falla til gjaldingar í 2012.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

	2009	2010	2011
Sambært roknskapinum	695.210	745.711	757.835

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað stuttfreistaða skuld, um upphæddirnar eru rættar, og um tær eru bókaðar rætt. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

Útjavningarkonta (LG 2011/300-0203)

t.kr.

	2009	2010	2011
Salda 1. januar	1.606.458	1.063.784	515.753
RLÚ-úrslit	-688.101	-566.574	-312.006
Ymiskar broytingar	66.530	18.543	235.076
Salda 31. desember	**984.887**	**515.753**	**438.823**

Saldan á útjavningarkontuni við ársbyrjan 2010 samsvarar ikki við salduna við árslok 2009. Munurin er 78,9 mió.kr., sum stavar frá, at saldan 1. januar 2010 er javnað í mun til salduna við ársenda 2009. Høvuðsorsøkin er, at í 2011 er meginreglan broytt fyri, hvussu kursmunir í sambandi við útgávu av lánsbrævarøðum verða viðgjørdir. Har kursmunirnir áður við hvørt ársskifti hava verið tiknir við í landsroknskapin eftir marknaðarvirði, verða teir nú tiknir við eftir amortiseringsmeginregluni, t.v.s. at teir nú í sambandi við útgávu verða skrásettir og síðani avskrivaðir liniert yvir afturgjaldstíðina. Sambært landsroknskapinum hevur broytingin við sær eina javning í útjavningarkontuni á 79,9 mió.kr. í 2010. Hinvegin er eisini ein javning av útjavningarkontuni á 1 mió.kr., av tí at meginreglan fyri, hvussu Føroya Handilsskúli og Tekniski Skúli í Tórshavn viðgera lønir, er broytt.

"Ymiskar broytingar" fevnir um broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskaparmeginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Útjavningarkontan líkist ikki "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Aktivini í landsroknskapinum verða virðismett øðrvísi, og materiell støðisogn, t.d. bygningar, skip, vegir o.t., eru ikki virðismett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

3.5 Umsiting av skatti, avgjøldum o.ø.

3.5.1 Kassaeftirlit á flogvøllinum (LG 2011/203-0151)

Í mars 2012 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá tolleftirlitinum hjá TAKS á flogvøllinum. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

3.5.2 FAS innkrevjing og FAS-afturbering (LG 2011/203-0351)

Í 2012 grannskoðaðu vit innkrevjingina av FAS skatti og FAS afturbering til reiðaravirki. Niðanfyri hava vit tikið samanum grannskoðanina.

Lógargrundarlagið

Sambært § 63a í Ll. nr. 86 frá 1. september 1983 um "landsskatt og kommunuskatt" v.s.b. kunnu reiðaravirki fáa afturbering fyri ta løn, frítíðarløn, samsýning o.a., sum verður rindað persónum, skattskyldugum í Føroyum, fyri tænastu umborð á skipi, sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni FAS. Sambært hesari lóg ásetur Landsstýrismaðurin í skattamálum afturberingarprosentið við kunngerð.

Sambært K. nr. 120/2008 um "áseting av afturberingarprosenti til reiðaravirki, sum hava skip, ið eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni" er árliga afturberingarprosentið ásett at vera 35%.

Játtan og roknskapur

Játtanin til FAS-endurgjald "FAS-afturbering" er skrásett á høvuðskontu 3.35.1.05. Í fíggjarlógini 2011 vóru upprunaliga játtaðar 105 mió.kr., men við eykajáttan í november 2011 á 25 mió.kr. og aftur við eykajáttan í desember 2011 á 15 mió.kr. bleiv samlaða játtanin í 2011 til FAS afturberingina 145 mió.kr.

Innkravdi skatturin, sum skal berast aftur, er skrásettur undir høvuðskontu 20.52.1.01 "Vanligur landsskattur" á undirkontu 06 "Skattainntøka frá FAS-skipanini". Samsvarandi játtanini til FAS-endurgjald vórðu í fíggjarlógini 2011 upprunaliga játtaðar 105 mió.kr., men við eykajáttanum bleiv samlaða játtanin 145 mió.kr.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum kunnað um, at í sambandi við fíggjarlógina fyri 2012 varð játtanin til FAS-endurgjald flutt frá høvuðskontu 3.35.1.05, fyri í framtíðini at verða skrásett undir § 20 Inntøkur. Sambært landsstýrismanninum gevur hetta eina greiðari mynd av játtanini á § 3 Fíggjarmál og § 20 Inntøkur, enn tað var frammanundan.

Sambært landsroknskapinum er munur á skattainntøkuni frá FAS skipanini og tí, sum er borið aftur í FAS endurgjaldi. Á talvuni niðanfyri sæst, at til 2010 varð meira goldið út enn kravt varð inn, meðan í 2010 og 2011 varð meira tikið inn í skatti, enn borið varð aftur í FAS skipanini. Sambært talvuni er talan um 37 t.kr. fíggjarárið 2011.

t.kr.

	2006	2007	2008	2009	2010	2011
FAS endurgjald (konta 3.35.1.05)	45.894	61.806	51.645	77.968	104.879	146.680
FAS skattainntøka (konta 20.52.1.01-06)	-40.505	-51.124	-39.391	-76.375	-107.245	-146.717
Munur	**-5.389**	**-10.682**	**-12.254**	**-1.593**	**2.366**	**37**

Orsøkin til munirnar er sambært TAKS, at tvey feløg av órøttum hava fingið ov stóra FAS afturbering. TAKS skal tískil heinta nakað av peningi innaftur, sum er goldin ov nógv út í FAS afturbering.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum kunnað um, at tiltøk eru sett í verk viðvíkjandi muninum í goldnum skatti. Feilurin er íkomin, tí at lønarrættingar verða gjørdar aftur um ársskiftið. Við árligari koyring á Elektron, sum tekur hædd fyri lønarrættingunum, verða feilirnir kannaðir.

Upptøka í FAS skipanina

Reiðaravirki, sum lúka treytirnar í § 63a í skattalógini, kunnu biðja um at sleppa undir FAS. Við at gjalda lønir og samsýningar umvegis FAS afturberingar-skipanina, fáa reiðaravirkini 35% afturborið av øllum lønum, frítíðarlønum, samsýningum o.ø., sum er goldið umvegis FAS V-talið hjá reiðaravirkinum.

Fyri at fáa afturbering, skal skipið hjá reiðaravirkinum vera skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini.

Í avrokningini fyri februar 2012 vóru 51 parta- og smápartafeløg skrásett í FAS skipanini. 33 teirra fingu afturbering goldna.

Lønarflytingar

Lønir frá reiðaravirkjum verða goldnar um A-skattaskipanina, og V-talið, sum verður brúkt, ger av skattaprosentið. Skattur verður trektur av allari løn, frítíðarløn, samsýningum o.ø., sum verður goldið umvegis FAS V-talið hjá reiðaravirkjunum. Lønávísarin skal eisini gjalda til ALS og Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnin.

Útlendingar, sum mynstra umborð á FAS skipi, skulu hava fyribils p-tal – pseudo p-tal. Lønin skal flytast umvegis hetta fyribils p-talið og FAS V-talið.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um kravdu skjølini hava ligið við, tá ið útlendingar við FAS skipum hava søkt um pseudo p-tal. Onki var at finnast at.

Afturberingin

TAKS í Saltangará tekur sær av avrokningini av FAS afturberingini. Trý starvsfólk hava afturberingina um hendi, og funktiónsskilnaðurin í útgjaldsskipanini hjá Gjaldstovuni tryggjar, at persónssamanfall ikki kemur fyri.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um manningarnar umborð á FAS skipum hava rindað rættan skatt, og hevur eisini kannað, um afturberingin til reiðaríini samsvarar við goldna skattin. Onki var at finnast at.

Eftirlit

Sambært TAKS hevur stovnurin eisini eftirlit við FAS endurgjøldunum. TAKS boðar frá frammanundan, tá ið tey fara út á skrivstovurnar hjá reiðaríunum. Har verða skjølini kannað, m.a. verða manningarlistar samanbornir við persónarnar, sum hava fingið løn um skattaskipanina.

TAKS hevur greitt frá, at eingi eftirlit av FAS afturberingini eru gjørd í 2010 og 2011.

Landsgrannskoðanin hevur kannað 11 tilvildarliga vald mál fyri árið 2009. Í 9 málum var ongin frágreiðing skrivað, og í einum máli var onki skjal skrásett. Í einum máli var frágreiðing og skjøl, sum skjalfestu eftirlitið. Sambært TAKS verður arbeitt fram ímóti, at eftirlitini verða skjalfest betur.

Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum hevur í oktober 2012 kunnað um, at *"tey gjørdu eftirlitini eru sambært TAKS merkt av at vera mest vegleiðandi, og tískil er avmarkað, hvussu nógvar rættingar gjørdu eftirlitini hava havt við sær. TAKS skal frameftir tryggja, at okkurt skrivligt verður skrásett í journalskipanini, sum vísir, at vitjanin er gjørd"*.

3.5.3 Ferðaavgjøld (LG 2011/220-0522)

Í 2012 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað inntøkurnar av ferðaavgjøldum og kannað mannagongdirnar fyri innkrevjingini av avgjøldunum. Niðanfyri hava vit tikið samanum grannskoðanina.

Lógargrundarlag og leiðreglur

Heimild at krevja inn ferðaavgjøld er í Ll. nr. 37 frá 26. mai 1988 "um ferðaavgjald", v.s.b. Sambært § 1 skal fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt av landinum, rindast 120 kr. í landskassan. Tó skal, sambært § 3, avgjald ikki rindast fyri børn undir 12 ár, sum ferðast loftvegis, og fyri børn undir 16 ár, sum ferðast sjóvegis. Ferðafólk, sum eru í Føroyum í transit, og ferðafólk, sum ferðast við fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning, skulu ikki rinda ferðaavgjald.

Í § 2, stk. 1, í lógini er ásett, at avsláttur í ferðaavgjaldinum kann verða veittur. Spurd, svaraði TAKS, at tey vistu ikki, hvat meint var við í hesum brotið, og ongin avsláttur verður latin. Sambært § 2, stk. 2, ásetur landsstýrismaðurin neyvari reglur um, hvørjar avsláttarskipanir geva rætt til avsláttur í ferðaavgjaldinum. Reglurnar eru ikki gjørdar.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 kunnað um, at samgongan ætlar, at endurskoða skipanina við ferðaavgjøldum í hesum valskeiðinum. Fíggjarmálaráðið og Vinnumálaráðið hava í felag fingið ábyrgdina av at endurskoða ferðaavgjøldini. Í tí sambandi verður § 2 í lógini um ferðaavgjald eisini endurskoðað, og støða verður tá tikin til, hvørt ásetingarnar verða varðveittar ella ikki. Tí verða í løtuni ongar neyvari reglur ásettar sambært § 2, stk. 2.

Sambært § 1, stk. 3, skal uppgerð yvir ferðafólk vera TAKS í hendi í seinasta lagi 10. í øðrum mánaði eftir uppgerðarmánaðin, og ferðaavgjøldini skulu vera goldin í seinasta lagi 22. í øðrum mánaði eftir uppgerðarmánaðin. Í § 1, stk. 4, stendur,

at eru ferðaavgjøldini ikki goldin, tá ið freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum at rokna.

TAKS hevur í 2011 gjørt leiðreglur um avrokning av ferðaavgjøldunum.

Roknskapartøl

Inntøkur av ferðaavgjøldunum eru í landsroknskapinum skrásettar á høvuðskontu 20.52.2.25 "Ferðaavgjald". Inntøkurnar eru greinaðar á standardkontu 61 fyri inntøkur og standardkontu 67 fyri morarentur. Stovnsnummarið er 128501.

Niðan fyri er ein talva, sum vísir gongdina sambært landsroknskapinum 2007 – 2011:

t.kr.

	2007	2008	2009	2010	2011
Ferðaavgjald	13.330	15.323	14.121	13.974	13.691
Rentur	5	3	0	21	17
Tilsamans	**13.335**	**15.326**	**14.121**	**13.995**	**13.708**

Sum talvan vísir, eru inntøkurnar av ferðaavgjøldunum rættiliga støðugar, um 13 – 15 mió.kr. um árið.

Avrokning av avgjøldum

Tvey flutningsfeløg eru skrásett hjá TAKS at avrokna ferðaavgjøld.

Landsgrannskoðanin hevur kannað um upphæddirnar, sum flutningsfeløgini hava gjørt upp og goldið inn í 2011, eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Onki var at finnast at.

Eftirlit

Sambært leiðreglunum hevur MVG-deildin ábyrgdina og eftirlit við ferðaavgjøldunum. Á sumri 2011 var MVG-deildin á eftirlitsvitjan hjá báðum flutningsfeløgunum. TAKS kannaði ferðauppgerðir, men hugt varð ikki eftir skipanunum, sum upplýsingarnar um ferðafólkatal koma úr, ella eftir skjalatilfari.

TAKS heldur ikki at orsøk er til at halda, at skeivt er givið upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í oktober 2012 kunnað um, at sambært TAKS er eingin KT-grannskoðan farin fram, men upplýsingarnar, sum koma úr skipanini, eru kannaðar og eftirhugdar í sambandi við ferðaavgjaldið.

Tilmæli

Eftirlit við, um uppgerðirnar eru rættar

Sambært lógini um ferðaavgjøld § 4a hevur TAKS heimild at kanna roknskapartilfar, brævaskifti o.a. hjá flutningsfeløgunum. Hesa heimild hevur TAKS ikki nýtt til fulnar.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at TAKS kannar og tryggjar sær, at upplýsingarnar frá flutningsfeløgunum eru rættar.

Manuel renturokning

TAKS greiddi frá, at renturokningin av ov seint goldnum ferðaavgjøldum verður roknað manuelt. Kunnað varð eisini um, at ætlanin er at laga skipanina, sum er

gjørd at rokna rentur av MVG eftirstøðum, til eisini at kunna rokna rentur av gjaldkomnum ferðaavgjøldum.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at sjálvvirkandi renturokning verður sett í verk, ella at manuella renturokningin verður kannað av øðrum persóni. Í mai 2012 sigur TAKS, at miðað verður ímóti at hava renturokningina við í KT-raðfestingina fyri 2013.

Skráseting í journalskipan
Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at allar uppgerðir yvir ferðaavgjøld og undirskjøl verða journaliseraðar. Í mai 2012 hevur TAKS kunnað um, at í framtíðini verða allar uppgerðir skrásettar í journalskipanini.

3.5.4 MVG-eftirstøður (LG 2011/220-0522)

MVG-eftirstøðurnar hava ongantíð áður verið so stórar, sum í 2011. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at fleiri heimildir, sum vórðu settar í MVG-lógina í 1995, verða ikki brúktar í tann mun, ætlanin var.

TAKS hevur í 2012 fingið víðari heimildir at forða fyri, at eftirstøðurnar vaksa.

Løgtingsgrannskoðararnir heittu á Landsgrannskoðanina um at gera eitt notat, sum útgreinar MVG eftirstøðurnar. Notatið varð latið løgtingsgrannskoðarunum 26. juni 2012. Niðan fyri er notatið endurgivið, tó í styttum líki.

Øll virkir, sum sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 “um meirvirðisgjald” við seinni broytingum (MVG-lógin) eru MVG-skyldug, skulu skrásetast í Vinnuskránni hjá TAKS, og skulu lata TAKS MVG-uppgerðir sambært lógini og við teimum freistum, sum lógin ásetur.

Flestu virkir hava ársfjórðing sum avgjaldstíðarskeið, sum ásett í § 20, stk. 2, í MVG-lógini. Nøkur hava tó aðrar freistir, t.d. útflutningsfyritøkur og fyritøkur, sum av ávísum orsøkum hava fingið stytt avgjaldstíðarskeiðið.

MVG-uppgerðirnar skulu latast TAKS í seinasta lagi ein mánað og 10 dagar eftir, at avgjaldstíðarskeiðið er endað, sambært § 20, stk. 1, í MVG-lógini. Sambært § 22, stk. 1, í lógini skal avgjaldið vera rindað í seinasta lagi ein mánað og 10 dagar eftir at avgjaldstíðarskeiðið er endað.

Í notatinum er MVG-eftirstøða allýst sum MVG skuld, ið er fallin til gjaldingar, og er flutt í innheintingarskipanina. Rentur eru íroknaðar MVG-eftirstøðuni.

Samlaðu MVG-eftirstøðurnar seinastu árini

Árini 2006 til 2011 eru eftirstøðurnar øktar úr 70,9 mió.kr. í 119,4 mió.kr. Niðanfyri er ein talva yvir MVG eftirstøðurnar við árslok hesi árini:

t.kr.

	2006	2007	2008	2009	2010	2011
MVG eftirstøður	70.855	60.225	72.955	91.128	112.518	119.379

MVG-eftirstøðurnar býttar í støddarbólkar

Út frá tølum úr innheintingarskipanini hjá TAKS hevur Landsgrannskoðanin gjørt yvirlit yvir MVG-eftirstøðurnar, býtt í bólkar eftir stødd á skuld og tal á skuldarum:

Bólkur (í kr.)	**Eftirstøður í kr. 18.06.12**	**Tal á skuldarum**
0 – 10.000	688.768	219
10.001 – 50.000	6.091.712	227
50.001 – 100.000	8.649.798	119
100.001 – 500.000	37.091.664	167
500.001 – 1.000.000	18.745.806	26
1.000.001 – 2.000.000	15.343.342	10
2.000.001 – 5.000.000	7.137.086	3
5.000.001 -	14.265.807	2
Tilsamans	**108.013.983**	**773**

Sum tað sæst á talvuni, eru nógvar smærri eftirstøður. Samlaðu eftirstøðurnar hjá teimum virkjum/persónum, sum skylda upp til 100 t.kr., eru tilsamans 15,4 mió.kr., tað svarar til 14,3% av samlaðu eftirstøðunum. Hinvegin er talan um 565 virkir/persónar, ella 73,1% av øllum, sum eru í eftirstøðu.

Í bólkinum, sum skylda millum 100 t.kr. og 1 mió.kr. eru samlaðu eftirstøðurnar 55,8 mió.kr., býttar á 193 virkir/persónar. Her finna vit sostatt meira enn helvtina av samlaðu skuldini.

15 virkir/persónar skylda meira enn 1 mió.kr. hvør, ella tilsamans 36,7 mió.kr. Tað er ein triðingur av skuldini.

MVG-eftirstøðurnar settar í mun til MVG-inntøkurnar

Fyri at lýsa gongdina í MVG-eftirstøðunum í mun til inntøkur landskassans av MVG hava vit samanborið tær við samlaðu MVG-inntøkurnar í 10 ár, t.v.s. árini 2002 - 2011. Eftirstøðurnar eru lýstar, bæði sum eftirstøður við árslok og sum miðal eftirstøður í árinum. Inntøkurnar eru nettoinntøkur av meirvirðisgjaldi, t.e. MVG av innflutningi og av sølu í Føroyum ÷ keyps-MVG.

t.kr.

Ár	Inntøkur	Eftirstøður (árslok)	Eftirstøður (miðal árið)	Eftirstøður í mun til inntøkur árslok (miðal)
2002	924.295	47.886	44.746	5,2% (4,8%)
2003	968.047	59.560	49.764	6,2% (5,1%)
2004	941.436	61.679	57.699	6,6% (6,1%)
2005	989.238	62.425	62.533	6,3% (6,3%)
2006	1.148.828	70.855	60.228	6,2% (5,2%)
2007	1.297.848	60.225	60.575	4,6% (4,7%)
2008	1.240.192	72.955	61.255	5,9% (4,9%)
2009	1.149.699	91.128	78.506	7,9% (6,8%)
2010	1.182.288	112.518	102.496	9,5% (8,7%)
2011	1.173.212	119.379	112.437	10,2% (9,6%)

Tølini vísa, at árini 2002 til 2008 vóru eftirstøðurnar millum 4,6 og 6,6% av samlaðu inntøkunum, meðan tær í 2009 byrja at vaksa í mun til inntøkurnar. Við árslok 2009 vóru eftirstøðurnar 7,9%, í 2010 9,5% og í 2011 10,2% av MVG-inntøkunum.

Hvør skyldar MVG

Tað ber illa til at siga, at tað eru ávísir persónar ella ávís sløg av feløgum, sum skylda MVG. TAKS hevur greitt frá, at allar vinnur eru umboðaðar.

Í 2011 gjørdi TAKS eina kanning, sum vísti, at byggivinnan umboðaði 1/3 av MVG-eftirstøðunum. TAKS legði dent á, at kanningin ikki var 100% álítandi, tá ið ráddi um vinnugreinar, m.a. av tí at skrásetingarnar í Vinnuskránni eru ikki altíð rættar. Talan kann vera um ymiska definitión hjá myndugleikunum av vinnugreinum.

Aldursbýti – gamlar ella nýggjar eftirstøður

TAKS hevur greitt frá, at bókhaldsskipanin er ikki bygd út til at kunna býta skuldina eftir aldri. Tó ber til at fylgja saldunum á eftirstøðunum.

TAKS hevur kunnað um, at ofta eru MVG-eftirstøðurnar hjá virkjum ella persónum partur av einari størri skuld. Tá er dekningsraðfylgjan ásett eftir ávísum reglum. Tað kann vera ein av grundunum til, at MVG-skuldin verður eldri og eldri.

Samanumtikið kann sigast, at ein ávís gomul upphædd er, sum stavar frá fyrstu tíðini, eftir at lógin um meirvirðisgjald varð sett í gildi. Longu fyrsta árið, í 1993, var eftirstøðan 30 mió.kr.

Somu skuldarar

Landsgrannskoðanin gjørdi eina kanning í 2006. Tá kannaðu vit 15 innheinting-armál. Vit vístu tá á, at nakrar eftirstøður stavaðu frá fyrsta árinum, MVG-lógin var í gildi. Í 2012 eru fleiri av somu skuldarum framvegis millum størstu skuldarar.

Tó eru undantøk, ið stava frá, at onkur er deyður, onkur farin konkurs, fingið skuldarsanering og onkur hevur avroknað eftirstøðuna. Eftirstøðan hjá teimum, sum skyldaðu mest í 2005, er framvegis stór, men nakrir skuldarar í 2012 hava yvirhálað teir “eldru” skuldararnar.

Sambært TAKS verður skuldin pantað regluliga 5. hvørt ár, fyri at slíta fyrningarfreistina. Allar pantingarnar higartil hava verið úrslitaleysar. Skuldin økist hvønn mánað við rentutilskriving.

Avskrivingar av MVG-skuld

Árini 2005 til 2011 hevur TAKS avskrivað 64,7 mió.kr. av MVG-skuld:

kr.

	Avskriving
2005	4.136.106
2006	5.096.410
2007	8.706.640
2008	5.527.019
2009	7.651.853
2010	14.214.062
2011	19.385.373
Tilsamans	**64.717.463**

Møguleikarnir hjá TAKS at avskriva MVG-skuld eru bert til staðar, um skuldarin hevur fingið játtað skuldarumlegging í skuldarumskipanarnevndini, fingið skuldarsanering ella um felagið er strikað úr partafelagsskránni, av tí at tað er tikið av, og ongin peningur er at gjalda MVG-krøvini.

Sambært upplýsingum á heimasíðuni hjá Føroya Kærustovni eru treytirnar fyri at fáa skuld eftirgivna ella umskipaða stórt sæð tær somu, sum tá ið skiftirætturin tekur støðu til skuldarumskipan eftir konkurslógini. Soleiðis skal skuldarin t.d. prógva, at hann ikki er førur fyri, og heldur ikki innan fyri tey næstu árini hevur útlit fyri, at kunna lúka sínar skyldur til landskassan. Munandi misjavni skal vera staðfestir millum gjaldsevnini hjá skuldaranum og skuldina, hann hevur til tað almenna. Skuldarumskipan eftir hesari lóg skal vera avgjørt seinasti møguleiki at loysa skuldartrupulleikarnar við landskassan. Í ársfrágreiðingini í 2010 hjá nevndini er kunnað um, at tilsamans 333 t.kr. av MVG-skuld eru eftirgivnar.

TAKS hevur greitt frá, at avskrivingarnar fara at verða væl størri, av tí at fleiri feløg eru undir konkurs/tvingsilsavtøku. Tá ið hesi feløg eru strikað hjá Skráseting Føroya, roknar TAKS við at avskriva í minsta lagi 33 mió.kr. afturat, tí sannlíkt er, at ongin peningur er til skuld, sum t.d. MVG.

TAKS heldur, at tá ið henda eftirstøða er strikað, fer MVG-eftirstøðan at liggja um 60 – 70 mió.kr., sum TAKS heldur verða støðið, í mun til samlaðu inntøkuna.

Framtíðarútlit

Samanumtikið sæst, at MVG-eftirstøðan minkar ikki, hvørki í sjálvum sær ella tá ið borið verður saman við samlaða tilsvarið.

TAKS hevur kunnað um, at fleiri av størstu skuldarunum á listanum yvir størstu skuldarar, eru partafeløg og smápartafeløg undir konkursviðgerð. Restskuldin hjá teimum verður strikað, tá ið búgvið er gjørt upp og møgulig dividenda goldin.

Hjá teimum privatu vinnurekandi er støðan ein onnur. Skuldin verður verandi, sjálvt um virksemið er endað ella persónur er farin konkurs. Skuldin verður ikki strikað, so leingi ein persónur er á lívi.

Sum nevnt fleiri ferðir, m.a. á Løgtingið, so kann støðan, at virkir kunnu skylda MVG í langa tíð og framvegis virka í vinnuni, hava tað við sær, at kappingin millum virkir, sum rinda MVG rættstundis, og tey, sum lata vera, gerst avlagandi. Annars er tað helst ongin løtt loysn at fáa alla MVG-eftirstøðuna inn. Krøvini eru sokallað "simpul" krøv, t.v.s. at tey hava ikki nakra frammíhjá støðu, um virkið verður selt, tikið av el.a.

Sum nevnt gjørdi Landsgrannskoðanin í 2006 eina kanning av støðuni. Samskiftið við TAKS vísti tá, at tey amboð, sum TAKS hevur sambært § 23 a) og b) í MVG-lógini, vórðu ikki nýtt í serliga stóran mun. Hesar heimildir høvdu, sambært broytingunum í MVG-lógini frá 1995 (lm. nr. 174/1994), ikki havt ætlaðu ávirkanina, sum var at forða fyri eftirstøðum við at stytta avrokningartíðarskeiðið, og krevja virkir at seta peningatrygd. Harafturat var endamálið eisini at forða fyri kappingaravlagandi virksemi.

Eftirfylgjandi hava landsstýrismenn í fíggjarmálum víst á, at teir hava havt ætlanir at broyta MVG-lógina soleiðis, at heimildin hjá TAKS at áleggja nýggjum virkjum at seta trygd, skuldi víðkast til eisini at galda verandi virkir, ið ikki hildu krøvini um stytt avgjaldstíðarskeið ella ikki rættstundis høvdu rindað avgjøld og skyldaðu meira enn 25.000 kr.

Eisini skuldi TAKS fáa heimild til at taka MVG-skrásetingina frá virkjum, um tey skyldaðu landinum MVG. Harafturat skuldi TAKS hava heimild til at krevja skuldina inn við at halda aftur í A-inntøku.

Hesar heimildir hevur TAKS nú fingið í løgtingslóg nr. 49 frá 8. mai 2012, løgtingsmál nr. 184/2011: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (innkrevjing av MVG-skuld). Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur m.a. í almennu viðmerkingunum, at endamálið við lógarbroytingunum er at minka um eftirstøður og tap fyri landskassan av meirvirðisgjaldi og forða fyri, at vinnuliga kappingin verður avlagað, samstundis sum rættarkenslan hjá borgarunum verður styrkt.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið sigur landsstýrismaðurin, at avleiðingin av lógaruppskotinum ger innheintingina av MGV-eftirstøðum einfaldari. Við lógarbroytingini hevur TAKS eisini fingið víðkaðar heimildir at gera persónliga ábyrgd galdandi móti leiðsluni á einum virki, ið heldur fram ella byrjar rakstur av einum virki, hóast skrásetingin er tikin aftur ella noktað.

3.5.5 Kervisskoðan (LG 2011/203-0151)

Avtala um kervisskoðan hjá TAKS

Í mai 2004 góðkendu TAKS, Elektron, grannskoðarin hjá Elektron og innanhýsis kervisskoðarin á Elektron avtaluna um kervisskoðan av skipanunum hjá TAKS, sum eru á Elektron.

Avtalan fevnir um tann partin av teldukervinum, sum Elektron hevur ábyrgdina av, men ikki teir partar, sum eru á TAKS, so sum brúkaraumsiting, mannagongdir og annað, ið er neyðugt, fyri ein tryggan og munagóðan rakstur. Átekningar frá kervisskoðaranum og grannskoðaranum hjá Elektron eru tí treytaðar av, at mannagongdir og skipanir á TAKS annars eru tryggar.

Frágreiðingar um kervisskoðan

Fyri árið 2011 hevur TAKS útflýggjað Landsgrannskoðanini avrit av tveimum frágreiðingum. Tær eru:

- “Årsrapport fra Systemrevisionen 2011”, og
- “Generelle IT-kontroller 2011”.

Hóast tað í avtaluni um kervisskoðan stendur, at kervisskoðarin árliga skal skoða eina ávísa brúkaraskipan, er ongin slík skoðan gjørd síðan 2004.

Fyri árið 2004 varð serfrágreiðing gjørd um “Revision af innkrevjingarskipanini 2004”.

Fyri árið 2003 varð serfrágreiðing gjørd um “Revision af eToll, 2003”.

Tá ið vit lesa frágreiðingarnar frá kervisskoðaranum, skulu vit m.a. hava í huga:

at frágreiðingarnar snúgva seg bert um tann partin av KT-kervinum hjá TAKS, sum verður umsitin av Elektron, ikki um partin, sum TAKS sjálvt hevur beinleiðis ábyrgdina av,

at niðurstøðurnar hjá kervisskoðaranum eru allar treytaðar av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á TAKS eru nøktandi,

at tær serskipanir, sum higartil eru skoðaðar, eTollur og innkrevjingarskipanin, eru millum tær nýggjastu skipanirnar, og tískil millum tær tryggastu og frægast skjalfestu. Høvdu aðrar og eldri skipanir verið kannaðar, høvdu tað upp á seg verið fleiri viðmerkingar, og

at skattaskipanin, sum er tann elsta og týdningarmesta skipanin hjá TAKS, sum er á Elektron, er ikki skoðað.

Eru viðurskifti, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisskoðarin ítøkilig tilmæli.

Við árslok 2011 hevði kervisskoðarin á Elektron tilsamans 14 óloyst tilmæli. Av teimum høvdu 3 høga raðfesting, 5 høvdu miðal raðfesting og 6 høvdu lága raðfesting. Kervisskoðarin hevði 1 nýtt tilmæli í 2011, meðan 8 tilmæli vórðu avgreidd í 2011.

Í 2003 vóru 4 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár, í 2004 vóru 12 og frá 2005 til 2009 vóru milllum 20 og 22 óloyst tilmæli eldri enn eitt ár. Í 2011 vóru 14.

Kervisskoðarin er ikki nøgdur við, at so mong gomul tilmæli eru óavgreidd.

Av teimum sjey tilmælunum frá 2000, eru tvey framvegis óavgreidd. Eitt teirra er skjalfestingin av skattaskipanini, sum kervisskoðarin øll árini hevur sagt, hevur høga raðfesting.

Í ársfrágreiðingini fyri 2003 skrivar kervisskoðarin, at skipanarskjølini til fleiri skipanir eru ófullfíggjað, og at tað ger støðuna ótrygga. Hesa viðmerking hevur kervisskoðarin endurtikið í frágreiðingum síðani 2004.

Niðurstøðan hjá kervisskoðaranum er tó, at roknskapargrannskoðanin kann líta á, at dátu-, kervis- og rakstrartrygdin á Elektron er álítandi. Tað er tó treytað av, at arbeiðsgongdir og eftirlit á TAKS eru nøktandi.

Sum nevnt í frágreiðingini hjá Landsgrannskoðanini fyri 2008 vóru stórir veikleikar í innaneftirlitinum hjá TAKS. Ein innanhýsis váðameting hjá TAKS fyri 2010 er komin til sama úrslit.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greitt frá, at TAKS í 2012 miðvíst hevur arbeitt við at bøta um manglarnar, sum KT-grannskoðanin hevur

gjørt vart við viðvíkjandi kervisdokumentatión og kervisgrannskoðan, manglar, sum í nøkrum førum hava verið viðmerktir síðani 2004. TAKS hevur í samarbeiði við Elektron og KT-grannskoðanina gjørt ein dokumentatiónsfrymil, sum skal tryggja neyðugu dygdina fyri kervisdokumentatión í 2012. Harumframt hevur TAKS biðið um at fáa gjørt kervisdokumentatión og KT-grannskoðan fyri húsaleiguskatt eftir hesum nýggja frymli í 2012.

Sambært landsstýrismanninum arbeiðir TAKS støðugt við at loysa uppgávurnar, sum eru nevndar í tilmælunum frá kervisskoðaranum á Elektron. Í 2012 er eitt tilmæli við miðal raðfesting loyst.

Avtala um kervisskoðan hjá Gjaldstovuni

Í sambandi við at Gjaldstovan hevur útveitt KT–skipanirnar hjá Gjaldstovuni til Elektron, varð ein rakstrar- og viðlíkahaldsavtala (SLA) gjørd millum partarnar. Í tí sambandi varð í 2009 ein avtala um grannskoðan gjørd millum Gjaldstovuna, Elektron og innanhýsis kervisskoðanina á Elektron, sum m.a. ásetur, at ein gjøgnumgongd verður gjørd av generellu KT-eftirlitunum hvørt ár.

Kervisskoðarin á Elektron hevur fyri árið 2011 gjørt tvær frágreiðingar:

- "Årsrapport fra Systemrevisionen 2011", og
- "Generelle IT-kontroller 2011".

Úrslitið av kervisskoðanini var, at 8 manglar ella veikleikar vórðu staðfestir. Kervisskoðarin heldur, at 5 tilmæli hava miðal raðfesting og 3 hava lága raðfesting. Tvey tilmæli eru eldri enn eitt ár.

Hóast manglarnar er niðurstøðan hjá kervisskoðaranum, at sum heild er eitt nøktandi trygdar- og eftirlitsstøði um skipanir og dátur hjá Gjaldstovuni. Kervisskoðarin sigur eisini, at Elektron í 2011 hevur hildið krøvini í avtaluni partanna millum.

3.5.6 Váðagreining av skipanunum hjá TAKS (LG 2011/203-0151)

Í tíðarskeiðinum 18. februar til 19. mars 2010 hevur trygdarstápurin á Føroya Gjaldstovu[6] gjørt eina váðagreining av skipanunum á TAKS. Váðagreiningin er gjørd á tann hátt, at trygdarstápurin hevur havt samrøður við starvsfólk um váðarnar og hevur sett úrslitini í eina váðamatrisu, sum varð skipað til endamálið.

Trygdarstápurin sigur alment um váðamyndina, at TAKS hevur gamlar og væl kendar loysnir, ið verða riknar av Elektron, sum arbeiðir undir skipaðum viðurskiftum. Talan er ikki um nógva formalismu í samarbeiðinum, men har aftur ímóti óformligt samarbeiði við siðvenjum og áliti millum partarnar. Trygdarstápurin heldur tó, at slíkar óformligar loysnir hava eitt lýti, sum er, at tá ið persónar verða skiftir út, detta tær frá hvørjum øðrum. Hetta heldur trygdarstápurin vera støðuna hjá TAKS, nú flestu lyklapersónarnir eru skiftir út seinastu árini.

Samanumtikið vóru úrslitini av váðagreiningini:

- Eftirlit: Skipað eftirlit vanta í breiðum týdningi rundan um skipanirnar hjá TAKS. Talan er um eftirlit, sum vanligir áminningarlistar, ið skulu kompensera fyri vantandi funktionalitetum í skipanum, umframt vanligt roknskapareftirlit.

[6] Trygdarstápurin á Føroya Gjaldstovu hevur m.a. ta uppgávu at ráðgeva um KT-trygd á Fíggjarmálaráðnum, Gjaldstovuni og TAKS.

- KT-bygnaður: Ein yvirskipað KT-ætlan vantar fyri skipanirnar hjá TAKS. Umhvørvið er sundurbýtt (fragmenterað), og er ment eftir "knopp-skjótingar" meginregluni. T.d. fylgir markamótið til Búskaparskipan landsins ikki yvirskipaðum meginreglum, og harumframt uppfyllir loysnin við útgjaldsskipanini, perioduseringum og transaktiónsslóð ikki krøvunum í roknskaparkunngerðini.
- Vantandi funkur í skattaskipanini: Ávísir funktionalitetir mangla í skattaskipanini at rokna ávísar skattastøður hjá persónum. Í staðin fyri verður roknað út manuelt, uttan at tað verður tryggjað, at tað altíð er rætt.
- Morarenta: Útrokningin er torskild fyri borgaran, og er ikki altíð logisk. Ikki ber til at fáa eitt yvirlit, sum á greiðan hátt vísir, hvussu morarentan verður roknað út.
- Borgari/skuldari ikki grundarlag fyri eftirliti: Eitt týdningarmikið eftirlit er tað, sum borgararnir og fyritøkurnar sjálvar gera mótvegis myndugleikunum. Ein fyritreyt er, at borgararnir ella fyritøkurnar javnan fáa upplýsingar frá TAKS, sum TAKS hevur skrásett teir. Staðfestast kann, at úr fleiri skráum kunnu ikki verða framleiddar slíkar uppgerðir.
- TAKS stendur einsamalt eftir við mainframe plattforminum: Peningastovnarnir hava flutt sínar KT-skipanir av landinum, og nú stendur TAKS einsamalt eftir við mainframe plattforminum á Elektron. Áralangar vælvirkandi tilgongdir skulu broytast. Uttan mun til, hvør loysn verður vald, fara at stinga seg upp trupulleikar, sum higartil hava verið ókendir fyri TAKS.

Sambært landsstýrismanninum hevur TAKS í oktober 2012 kunnað um,

at tey í 2011 hava skerpað innaneftirlitið við skipanunum hjá stovninum við at taka í nýtslu kekklistar á rakstrardeildunum. Kekklistarnir skulu tryggja, at allir kervislistar/feillistar frá kjarnuskipanunum verða eftirhugdir, og atgerðir verða gjørdar samsvarandi listunum.

at í 2011 setti TAKS eina útbygging av eSkatta skipanini í verk, sum ger tað møguligt at rokna skattin av uttanlandsinntøkum við tilhoyrandi linking fyri útlendskan skatt.

at í 2010 verksetti TAKS Vinnugluggan, sum gevur føroyskum fyritøkum møguleika at síggja upplýsingar um egna fyritøku og ymisk viðurskifti hjá TAKS, sum hava við fyritøkuna at gera, umframt sjálvavgreiðslu av MVG og Toll

at arbeitt verður við einum Borgaraglugga, har borgarar kunnu síggja, hvørjar upplýsingar TAKS hevur skrásett um teir. Skipanin er enn á tekniborðinum, og TAKS vónar at finna pengar í 2013 at gera skipanina.

at TAKS síðani 2010 hevur arbeitt við at fáa loyvi at seta í gongd eina verkætlan við umlegging, sum fer at hava við sær, at allar kjarnuskipanir hjá TAKS á Mainframe pallinum á Elektron verða fluttar yvir á ein Microsoft pall. Arbeitt verður við heimildarlóg at leggja fyri Løgtingið, soleiðis at TAKS fær góðkenning at fara í gongd. Játtan er sett av í fíggjarlógini fyri 2012 og eisini í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2013.

4 Fiskivinnumál

4.1 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2011/205-0342)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað á Fiskiveiðieftirlitinum. Endamálið við grannskoðanini var at kanna mannagongdir og innaneftirlit

Fiskiveiðieftirlitið virkar sambært løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 "um vinnuligan fiskiskap". Í lógini er ásett, at Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við føroyskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum ella aðrastaðni, og við útlendskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum.

Stjórin greiddi frá, at játtanin til Fiskiveiðieftirlitið nú er minni, enn hon var í 2003. Sparingar gera m.a., at Tjaldrið bert er í sigling helvtina av árinum. Tey hava ikki fulla manning til Tjaldrið, men tá ið tørvur er á tí, brúka tey avloysarar. Eisini hava sparingarnar skert virksemið í aðrar mátar, so sum avgreiðslur uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Roknskapurin hjá Fiskiveiðieftirlitinum seinastu 5 árini (samlað virksemi):

t.kr.

St.kt.	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
11	Lønir v.m.	24.655	24.550	26.684	26.933	24.392
14	Keyp av vørum og tænastum	15.952	20.129	16.391	15.810	17.502
15	Keyp av útbúnaði, netto	2.726	901	1.182	1.168	2.186
16	Leiga, viðlíkahald og skattur	833	839	932	1.096	1.101
17	Avskrivingar o.a.	51	151	0	185	176
19	Ymsar rakstrarútreiðslur	0	6	0	0	0
21	Søla av vørum og tænastum	-661	-3.380	-2.529	-2.520	-2.990
62	Kravd gjøld, bøtur o.a.	0	0	-33	-40	-2.537
71	Innhýsis flytingar millum almennar stovnar (útr.)	0	314	166	4	0
76	Innhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt.)	0	-150	0	0	0
	Tilsamans	**43.556**	**43.360**	**42.793**	**42.636**	**39.830**

Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Fiskiveiðieftirlitið hevur sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit sambært reglunum í roknskaparkunngerðini. Avtalan fyri 2010 er eftirmett í ársfrágreiðingini fyri 2010, meðan eftirmetingin fyri 2011 ikki er liðug.

Í eftirmetingini fyri 2010 ásannaði Fiskiveiðieftirlitið, at av vantandi fíggjarorku hevði stovnurin ikki rokkið settum málum, og tí máttu tey raðfesta øðrvísi, m.a. helt leiðslan, at nógv størri orka átti at verið løgd í eftirlit við fiskiskapi og øðrum virksemi hjá teimum, ið fóru at reka fiskiskap eftir uppisjóvarfiski í 2011.

Sambært Fiskiveiðieftirlitinum varð eftirlitið í 2011 framt av eygleiðarum, sum vóru umborð á móttøkuskipum og fiskiførum. Við kunngerð var álagt vinnuni at rinda kostnaðin. Sostatt helt Fiskiveiðieftirlitið, at tað hevði verið gjørligt at havt eitt munagott eftirlit.

Í ársfrágreiðingini fyri 2010 hevur Fiskiveiðieftirlitið greitt frá, at ein avleiðing av vantandi fíggjarligari orku var, at stovnurin ikki náddi settum málum fyri eftirliti við frystum fiskavørum og landingum av pelagiskum fiskasløgum.

Ein orsøk var, at landingar av pelagiskum fiskasløgum og um- og uppskipingar av frystum fiskavørum fara fram alt samdøgrið, og tí er ikki gjørligt at gera arbeiðið, uttan at rinda yvirtíðargjald til starvsfólkini, sum bert eru fýra í tali. Ein onnur avleiðing er, at bert ein kanning er gjørd í Suðuroynni í 2010.

Í august 2012 hevur Fiskiveiðieftirlitið kunnað um, at støðan er óbroytt, t.v.s. at tað er ógjørligt við verandi starvsfólkum at kanna eitt nøktandi tal av hesum virksemi.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 víst á, at tá ið stovnarnir ikki hava nátt settum málum, greiða teir frá tí í ársfrágreiðingunum. Frágreiðingarnar verða síðani viðgjørdar á fundi millum stovnarnar og Fiskimálaráðið.

Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at av stórum umleggingum á Fiskiveiðieftirlitinum, MRCC[7] og Tilbúgvingarstovninum, hevur avrikssáttmálin fyri 2012 fingið lægri raðfesting. Ætlanin hjá Fiskimálaráðnum er, at málini fyri 2013 skulu vera at síggja í endaligu fíggjarlógini fyri 2013.

KT-trygd, herundir váðameting

Fiskiveiðieftirlitið hevur onga váðameting gjørt. Fiskiveiðieftirlitið hevur nógvar dátur, sum hava týdning fyri stovnin og fyri samfelagið sum heild. Leiðslan greiddi frá, at trygdaravrit verða tikin dagliga av øllum dátum. Eina ferð um vikuna verður ein geymi goymdur í bankaboks. Landsgrannskoðanin hevur mælt Fiskiveiðieftirlitinum til at gera eina váðameting, serliga við atliti at vandanum fyri at missa dátur.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fiskiveiðieftirlitið hevur eina váðameting frá 2005 og at tey arbeiða við at gera eina nýggja.

Heimaarbeiðspláss/mobilt arbeiðspláss

Starvsfólkini hava atgongd til telduskipanina heimanífrá. Øll starvsfólkini hava atgongd til egnan teldupost við exchange servara. Stjórin, fulltrúar, samskiparin og eftirlitsfólkini hava harumframt atgongd til stovnsnetið umvegis VPN samband.

Í góðsku- og trygdarhandbókini hjá Fiskiveiðieftirlitinum eru ongar reglur fyri at nýta stovnsnetið heimanífrá. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Fiskiveiðieftirlitið ger skrivligar reglur um at nýta stovnsnetið heimanífrá.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Fiskiveiðieftirlitinum verða reglur um heimaarbeiðspláss/mobilt arbeiðspláss settar í verk í næstum.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Fiskiveiðieftirlitið hevur í 2011 dagført roknskaparreglugerðina. Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt eina góðsku- og trygdarskipan. Í skipanini eru uppgávurnar hjá stovninum lýstar. Fiskimálaráðið hevur ikki góðkent roknskaparreglugerðina. Í august 2012 spurdu vit landsstýrismannin, hví roknskaparreglugerðin ikki var góðkend. Landsstýrismaðurin svaraði ikki spurninginum.

[7] Martime Rescue Coordination Centre

Í góðsku- og trygdarhandbókini eru eisini reglur um inntøkur. Har er m.a. ásett gjald fyri at sleipa skip, 6.000 kr. um tíman. Prísásetingar eru fyri at sigla við næmingum, veiðidagbøkur, umbýti av fiskidøgum, árligum gjaldi frá Tryggingarfelag Føroya og fyri sektir.

Kravd gjøld, bøtur o.a.

Skráseting í landsroknskapinum

Í 2011 hevur Fiskiveiðieftirlitið havt inntøkur, 2.537 t.kr., sum eru bókaðar á standardkontu 62 "kravd gjøld, bøtur o.a." í roknskapinum hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Roknað var við 0,00 kr. í fíggjarlógini.

Inntøkur á standardkontu 62 seinastu 5 árini:

t.kr.

StRk	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
6230	Avgjald av avreiðing uttanlands	0	0	0	0	0
6290	Onnur kravd gjøld, bøtur o.a.	0	0	-33	-40	-2.537
Tilsamans		**0**	**0**	**-33**	**-40**	**-2.537**

Í juli 2009 segði Fiskiveiðieftirlitið, at tey hildu, at Fíggjarmálaráðið mátti koma við einari játtan at skráseta bøturnar á, fyri at tær ikki skuldu ávirka raksturin hjá stovninum.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til at bóka upphæddirnar á høvuðskontu 20.52.3.10 "aðrar inntøkur". Landsstýrismaðurin tekur undir við tilmælinum hjá Landsgrannskoðanini um at inntøkurnar skulu verða skrásettar á grein 20.

Reglur í kunngerð nr. 95/2005

K. nr. 95/2005 "um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands" er gjørd við heimild í Ll. nr. 28/1994 "um vinnuligan fiskiskap."

Sambært § 4, stk. 2, í kunngerðini skulu øll fiskifør, sum avreiða uttanlands, lata Fiskiveiðieftirlitinum vektar- og avreiðingarseðlar í seinasta lagi eina viku eftir, at avreitt er. Stjórin kunnaði um, at vanliga gongur ein mánaður, til fráboðanin kemur.

Sambært § 4, stk. 4, *"skal skiparin boða Fiskiveiðieftirlitinum frá í seinasta lagi ein tíma eftir, at farið er at sigla..."*.

Sambært § 4, stk. 5, í kunngerðini *"førir Fiskiveiðieftirlitið yvirlit yvir allar avreiðingar uttanlands..."*.

§ 5 í kunngerð nr. 95/2005 er soleiðis orðað:
Stk. 2, 1. punktum:

> *"Um fiskifør, sum eru í fiskidagaskipanini, hava avreitt meira enn loyvdu nøgdina av samlaðu veiðuni beinleiðis uttanlands, roknað fyri 4. hvønn mánað, verður fiskidagatalið, sum er nýtt til at veiða nøgdina, sum er avreidd ov nógv uttanlands í tíðarskeiðinum, ella nýtslan av egnari árskvotu, sum er avreidd ov nógv uttanlands í tíðarskeiðinum, hækkað við 30%."*

Stk. 2, 3. punktum:

> *"Um fiskifør, sum ikki eru í fiskidagaskipanini, hava avreitt meir enn loyvdu nøgdina av samlaðu veiðini beinleiðis uttanlands, roknað fyri 4. hvønn mánað, skal fiskifarið rinda avgjald, svarandi til 30% av søluvirðinum av tí veiði, sum er avreidd ov nógv beinleiðis uttanlands."*

Kunngerðin er broytt í 2010, soleiðis at lemmatrolararnir nú eisini eru fevndir av fiskidagaskipanini.

Mistir fiskidagar fyri at landa meira enn 25% uttanlands
Landsgrannskoðanin spurdi Fiskiveiðieftirlitið, hvussu stovnurin ger dagarnar upp sambært § 5, stk. 2, 1. punktum, og hvussu ofta tað verður gjørt.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 svarað, at Fiskiveiðieftirlitið ger dagarnar upp hvønn ársfjórðing sambært § 5, stk. 2, 1. punktum.

Landsgrannskoðanin hevur ikki gjørt meira við at kanna uppgerðir av fiskidøgum.

Avgjøld, tá ið meira enn 25% eru avreidd uttanlands
Inntøkurnar vóru um 2,5 mió.kr. Meginparturin stavar frá rokningum til reiðarí fyri, í einum fýra mánaða skeiði, at hava avreitt meira enn 25% av fiskinum uttanlands sambært K. nr. 95/2005. Rokningarnar eru dagfestar í januar 2011, men eru fyri tíðarskeiðið 2008 og 2009. Í august 2012 var mestsum onki goldið.

Onkur reiðarí hava mótmælt krøvunum frá Fiskiveiðieftirlitinum og klagað til landsstýrismannin. Fiskimálaráðið hevur svarað, at tey kunnu ikki gera undantøk, tí ongin heimild er í reglunum.

Fiskiveiðieftirlitið greiddi frá, at reiðaríini vildu ikki rinda peningin, av tí at tey hildu seg vera verri viðfarnan enn skipaeigarar, sum eiga skip, sum eru undir fiskidagaskipanini. Fiskiveiðieftirlitið hevur sent krøvini til innheintingar hjá rættinum.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at málini hava verið í Føroya Rætti, og at Fiskiveiðieftirlitið fekk viðhald í, at reiðaríini skulu rinda avgjøldini.

Eftirlitið við avreiðingum
Fiskiveiðieftirlitið brúkar skrásetingarnar hjá Lønjavningarstovuni (nú Trygdargrunninum) at rokna eftir, um skip halda seg til reglurnar um prosentvísa avreiðing uttanlands. Stjórin greiddi frá, at við hvørt landa skip í Føroyum, og koyra síðani fiskin umborð aftur á trolaran, sum so siglir niður til t.d. Skotland við fiskinum. Fiskimálaráðið hevði givið Lønjavningarstovuni boð um at skráseta somu avreiðingar bæði í Føroyum og uttanlands (t.v.s. dupult skráseting).

Eftir at fleiri skipaeigarar høvdu gjørt vart við, at proformasølurnar vóru skrásettar sum avreiddar bæði í Føroyum og uttanlands, gjørdi Fiskiveiðieftirlitið av at kanna pástandin.

Landsgrannskoðanin hevur spurt fyrrverandi stjóran á Lønjavningarstovuni, hví avreiðingarnar vórðu skrásettar tvær ferðir. Hann hevur greitt frá, at í flestu førum var tað tí, at skipini høvdu selt veiðuna um telefonuppboðssøluna. Reiðaríini høvdu sjálvi keypt fiskin og høvdu síðani selt veiðuna til útlendskar keyparar. Tí vóru tey komin til ta niðurstøðu í samráð við Fiskimálaráðið, at Lønjavningarstovan kundi ikki gera annað enn at skráseta báðar avreiðingarnar. Lønjavningarstovan hevði brúkt tølini frá hægra avreiðingarvirðinum at rokna møguligar studningar til manningarnar.

Broytt krøv
Fiskiveiðieftirlitið greiddi frá, at eftirlitið hevur eina fylgisveinaskipan, sum skrásetur hvar skipini fiska. Tær skrásetingarnar eru ikki samkoyrdar við skrásetingunum, sum liggja í málunum um avgjøld.

Eftir at Fiskiveiðieftirlitið hevði staðfest, at skipini partvís høvdu fiskað í norskum sjóøki, hevur Fiskiveiðieftirlitið rættað nøkur av krøvunum.

Landsgrannskoðanin eftirkannaði broytingarnar og kom fram til, at í tveimum førum skuldu broytingar ikki havt verið gjørdar, av tí at trolararnir sambært fylgisveinaskipanini høvdu fiskað bæði í føroyskum og í norskum sjógvi. Fiskiveiðieftirlitið hevur síðani kunnað um, at reiðaríini fóru at fáa rokning, góðar 110 t.kr.

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Av tilfarinum í málunum sær út til, at tað er av tilvild, at Fiskiveiðieftirlitið er vorðið varugt við, at reglurnar í K. nr. 95/2005 eru ikki fylgdar, og onki avgjald er goldið. Landsgrannskoðanin bað Fiskiveiðieftirlitið um viðmerkingar, men vit fingu onki svar.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fiskiveiðieftirlitið regluliga heldur eftirlit við, um reglurnar í kunngerð nr. 95 frá 2005 verða hildnar.

Landsgrannskoðanin heldur, at varð regluligt eftirlit hildið við landingum uttanlands, høvdu krøv fyri 2008 og 2009 kunnað verið gjørd upp væl fyri september 2010.

Tíðarskeiðið, har skipini hava avreitt meira enn 25% av veiðuni uttanlands, er árini 2008 og 2009. Hóast tað, eru krøvini ikki gjørd upp fyrr enn í september 2010 og bókað í landsroknskapinum í september 2011. Í august 2012 er næstan onki goldið.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví so long tíð gekk frá uppgerðartíðarskeiðinum, til reiðaríini fingu at vita, at avgjald átti at verða goldið. Í august 2012 hevur Fiskiveiðieftirlitið svarað, at tá ið talan er um stórar upphæddir, verða krøvini løgd fyri reiðaríini, sum fáa høvi til at gera viðmerkingar, áðrenn krøvini verða skrásett í Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin heldur, at svarið frá Fiskiveiðieftirlitinum er ikki nøktandi, og vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar. Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin svarað, at *"Fiskiveiðieftirlitið heldur ikki, tað er rætt at skráseta krøvini, fyrr enn reiðaríini hava gjørt viðmerkingar, og at viðmerkingarnar eru viðgjørdar. Hetta kann taka tíð, tí ofta eru reiðaríini ósamd."*

Ognaryvirlit og goymsla

Skipini og 4 bilar eru skrásett í landsroknskapinum. Innbúgv, teldur o.a. eru ikki skrásett. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra ognaryvirlitið samsvarandi vegleiðing frá Gjaldstovuni 30. november 2004.

Í 2009 staðfestu vit, at goymslan var væl skipað, men at skrásetingin leyk ikki krøvini í § 19 í roknskaparkunngerðini. Í góðsku- og trygdarhandbókini eru reglur um at skráseta eykalutir og at skráseta innbúgv, EDV o.a.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fiskimálaráðið heldur, at skrásetingin av goymsluni er í samsvari við § 19, stk. 1 í roknskaparkunngerðini.

Rakstrarútreiðslur annars

"Ferðing og flutningur alment sett innanlands"

Fiskiveiðieftirlitið hevur í 2011 goldið 79.602 kr. fyri dagpening og náttarviðbót. Meginparturin er goldin sum tímapeningur til starvsfólk, sum hava eftirlit við fiski, sum verður landaður.

Fiskiveiðieftirlitið hevur greitt frá, at eftirlitsfólkini koyra við stovnsbilum, og fyri at gera arbeiðið effektivari, koyra tey heimaníframá beinleiðis til arbeiðsstaðið.

"Ferðing og flutningur alment sett uttanlands"

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað:

- um frágreiðingar eru til ferðirnar (t.d. endamál), og
- um drigið er frá fyri mat, goldin av øðrum, um endurgoldið er sambært vegleiðing frá Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at sum minsta mark verður greitt frá á ferðauppgerðunum, hví endurrindað verður fyri hægri upphæddir, enn rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum ásetur. Eisini verður mælt til at kanna uppgerðirnar eftir, og at draga útreiðslurnar til "mat goldin av øðrum" frá.

Telefonir

Øll starvsfólkini hava fartelefonir frá Fiskiveiðieftirlitinum. Í góðsku- og trygdarhandbókini hevur Fiskiveiðieftirlitið mannagongdir fyri nýtsluna. Sambært vegleiðingini skulu reglurnar í rundskrivi nr. 1 frá Løgmansskrivstovuni 7. februar 2002 verða fylgdar. Har verður m.a. ásett, at allar fartelefonir skulu vera skrásettar.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu Fiskiveiðieftirlitið tryggjar sær, at reglurnar í rundskrivinum frá Løgmansskrivstovuni verða fylgdar. Eisini vístu vit á, at Sambært "Rundskrivi nr. 2/2001 um fartelefon" frá TAKS er ókeypis nýtsla av fastogn ella leysafæ o.t. at rokna sum skattskyldug inntøka.

Í august 2012 hevur Fiskiveiðieftirlitið greitt frá, at *"øll telefonkortini eru skrásett, og hvør brúkar hesi. Sjálvar telefonirnar eru ikki skrásettar. Tað at øll starvsfólkini á landi hava fartelefon lættir ómetaliga nógv um arbeiðið, og tryggjar effektivt arbeiði við færri starvsfólkum."* Eisini kunnar Fiskiveiðieftirlitið um, at telefonrokningarnar verða eftirhugdar hvønn mánað fyri at tryggja, at upphæddirnar eru á rímiligum støði.

Lønir

Sambært Búskaparskipan landsins hava lønarútreiðslurnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum, býttar á støð, seinastu árini verið (vanligt virksemi):

t.kr.

Stað	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
0000	Ógreinað	58	83	-14	0	49
0001	Fiskiveiðieftirlitið	6.208	6.779	7.384	7.989	7.736
0002	Vaktarskipið Tjaldrið	7.880	7.235	7.656	8.412	7.090
0004	Vaktarskipið Spógvin	3	0	0	0	0
0200	GORM	1	0	0	0	17
0300	Brimil	9.757	9.507	10.840	9.763	8.643
Tilsamans		**23.907**	**23.606**	**25.866**	**26.164**	**23.535**

Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2011 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá nøkrum tilvildarliga valdum starvsfólkum hjá Fiskiveiðieftirlitinum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

Tímaskrásetingar

Starvsfólkini í Fiskiveiðieftirlitinum skráseta arbeiðstíðina í skipanini Totalview. Tey skráseta komu, fráveru, feriu o.a. Tey skráseta ikki, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Fiskiveiðieftirlitið hevur ikki nakra skrivliga áseting um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kunnu eiga tilgóðar ella skylda. Fyrr brúktu tey vegleiðingina hjá Løgmansskrivstovuni um +37/-15 tímar. Á yvirliti úr tímaskrásetingini 6. mai 2012 eru 15 starvsfólk. Summi teirra eiga væl meira enn 37 tímar tilgóðar.

Ongin váttar tímaskrásetingina, og tí hevur Landsgrannskoðanin mælt til, at leiðslan váttar, at tímarnir eru rættir. Tað hevur týdning fyri at kunna fylgja við og fyri, at møguligir feilir verða rættaðir, so skjótt sum til ber.

Okkara kanning vísti, at feilir eru hendir, sum m.a. hava havt við sær, at starvsfólk hava fingið ov nógv goldið út í yvirtíðargjaldi. Vit spurdu, hvussu tað kundi koma fyri, at starvsfólk stóð til at eiga vaktargjald tilgóðar fyri 350 tímar, sum viðkomandi, tá samanum kom, ikki hevði vunnið rætt til. Fiskiveiðieftirlitið vísti til, at stovnurin hevði rættað feilin, og hevði sent yvirlit yvir rættingarnar til Landsgrannskoðanina. Fiskiveiðieftirlitið svaraði ikki spurninginum, hví feilurin var íkomin.

Í oktober 2012 kunnar landsstýrismaðurin um, at Fiskiveiðieftirlitið hevur boðað Fiskimálaráðnum frá, at tey hava regluligt eftirlit við tímaskrásetingunum, og at skeivar skrásetingar verða rættaðar. Hann leggur afturat, at tað er nøktandi fyri Fiskimálaráðið.

4.1.1 Eygleiðaraskipanin (LG 2011/205-0343)

Í 2011 hava skipini, sum fiskaðu uppisjóvarfisk, goldið fyri lønir, klæðir o.a. til eygleiðarar. Tilsamans er talan um 1,7 mió.kr., sum eru mótroknaðar lønarútreiðslunum.

Lønir til eygleiðarar seinastu 5 árini:

t.kr.

StRk	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
1111	Tænastumenn	669	833	726	679	2.463
1160	Arbeiðsmarknaðargjøld	21	28	24	24	86
1170	Eftirlønir	58	83	68	67	56
1180	Endurgjald í sambandi við lønir	0	0	0	0	-1.749
Tilsamans		**747**	**944**	**818**	**769**	**856**

Sambært lóg um vinnuligan fiskiskap kann landsstýrismaðurin áleggja fiskiførum at hava eygleiðarar frá Fiskiveiðieftirlitinum umborð, og áleggja teimum at bera útreiðslurnar av kosti og uppihaldi hjá eygleiðarunum. Landsstýrismaðurin kann harumframt áleggja fiskiførunum at bera lønarkostnaðin. Sambært Fiskiveiðieftirlitinum hevur stovnurin, við heimild í kunngerð nr. 31/2011, álagt reiðaríunum at rinda lønarkostnaðin til eygleiðararnar.

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur góðkent NAFO[8] eygleiðarasáttmálan, ið ásetur setanarviðurskiftini millum Fiskimálaráðið og einstaka eygleiðaran. Í setanarsáttmálanum stendur m.a., at ein eftirlønarskipan, sum eygleiðarin teknar, og sum Fiskimálaráðið rindar eina upphædd svarandi til 10% av føstu mánaðarlønini til, er knýtt at starvinum.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað setanarbrøv frá 2011. Tað vísti seg, at parturin um eftirløn er ikki við í setanarbrøvunum. Okkara stakroyndir vísa, at eygleiðararnir hava ikki fingið eftirløn.

Í august 2012 spurdu vit landsstýrismannin, hví so var. Landsstýrismaðurin svaraði ikki hesum spurningi.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard (ISSAI 1240) spurdi Landsgrannskoðanin, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki. Eisini spurdi Landsgrannskoðanin leiðsluna, um hon hevur kunnleika um svik, illgruna um svik ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

Stjórin segði seg ikki hava kunnleika um tílíkt. Hann greiddi frá, at roknskapurin verður javnan gjøgnumgingin, og at skipini hava viðlíkahaldsskipanir, har fylgt verður við, hvussu og nær viðlíkahald skulu verða gjørd.

Leiðslan hevur ikki tikið spurningin um møguligt svik beinleiðis upp við starvsfólkini.

4.2 Havstovan (LG 2011/205-0343)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað á Havstovuni. Endamálið við grannskoðanini var eisini at kanna innanhýsis mannagongdir og innaneftirlit hjá stovninum. Partur av grannskoðanini var eisini at kanna uppgerðir av verkætlanum, m.a. um roknskapurin var í samsvari við fíggjarætlanina og um verkætlanarroknskapurin í landsroknskapinum var rættur. Niðan fyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Endamál, virksemi og uppgávur

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina greiðir Havstovan frá, at seinastu árini eru útreiðslurnar til vanliga virksemið hjá stovninum, á undirkontu 20, í størstan mun farnar til at talfesta broytingar í havumhvørvinum við Føroyar, sum ávirka vistfrøðina og livilíkindini hjá fiskastovnunum undir Føroyum nógv.

Eisini verður kunnað um, at Havstovan hevur fingið hægri játtan til tess at stovna eina uppisjóvardeild. Samlaða játtanin í 2011 til Havstovuna, "høvuðskontu 05.34.3.01" var 13.240 t.kr.

Umframt vanliga stovnsraksturin hevur Havstovan virksemi, sum partvíst verður fíggjað av øðrum. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini fevnir undirkonta 45 um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum o.a. Har verður eisini kunnað um, at Havstovan fremur týðandi royndir í samstarvi við vinnu, einstaklingar o.o. í Føroyum og uttanlands.

[8] Northwest Atlantic Fisheries Organization

Roknskapartøl (vanligt virksemi) árini 2007-2011.

t.kr.

St.kt.	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
11	Lønir v.m.	9.097	9.962	10.097	9.768	10.626
14-19	Rakstrarútreiðslur	2.157	2.765	1.323	1.708	1.973
21	Søla av vørum og tænastum	-1.395	-910	-694	-274	-816
29	Ymsar rakstrarinntøkur	-1	0	0	0	0
63	Vanligar flytingarinntøkur	0	-50	-500	0	0
71	Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (útr.)	115	64	371	234	234
76	Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt.)	0	0	-435	-443	0
Tilsamans		**9.973**	**11.831**	**10.162**	**10.993**	**12.017**

Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Havstovan hevur sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit sambært K. nr. 22/2007. Sáttmálin fyri 2012 var ikki góðkendur, tá ið grannskoðanin var á vitjan.

KT-trygd o.a.

Ein av uppgávunum hjá Havstovuni er at savna vitan um tað livandi tilfeingið og umhvørvið í føroyskum sjóøki og at seta vitanina saman í eina heild. Stovnurin hevur nógvar upplýsingar/dátur, sum hava stóran týdning fyri stovnin og fyri samfelagið sum heild.

Í 2005 gjørdi eitt grannskoðaravirki eina váðameting av stovninum. Úrslitið av váðametingini var, at nøkur tiltøk skuldu verða gjørd. Havstovan hevur greitt frá, at øll tiltøkini, sum Havstovan skuldi gera sambært niðurstøðuni í váðametingini, nú eru gjørd, og at leiðslan hevur tryggjað sær, at treytirnar í rundskrivinum frá Vinnumálaráðnum[9] verða fylgdar.

Í september 2012 hevur Havstovan greitt frá, at tey hava gjørt reglur um KT-trygdarpolitikk, og at starvsfólkini eru kunnað um tær.

Havstovan sigur eisini, at stovnurin hevur skrivligar mannagongdir um, hvussu dáturnar skulu goymast, og hevur tryggjað sær, hvussu tær kunnu verða endurskaptar.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Havstovan hevur gjørt eina nýggja roknskaparreglugerð í 2012, sum Fiskimálaráðið hevur góðkent.

Havstovan hevur ongan kassa við reiðum peningi. Í juni 2009 fekk stovnurin loyvi til at hava gjaldkort. Heimildarváttan er gjørd sambært reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum.

Stovnurin hevur tvær peningastovnskontur. Onnur kontan er í navninum hjá Magnusi Heinason, hin í navninum Nordic WOCE[10]. Peningastovnskontan “Magnus Heinason” verður m.a. brúkt til at rinda umvegis netbanka og til inngjald

[9] Rundskriv frá 21. juni 2007 frá Vinnumálaráðnum um at seta í verk KT-trygd.
[10] Nordic World Ocean Circulation Experiment

fyri avreiðingar hjá skipinum. Konturnar verða gjørdar upp og stemmaðar av eina ferð um mánaðin.

Landsgrannskoðanin stemmaði bankakontuna hjá Magnusi Heinason av við bókhaldið, pr. 29. februar og 30. mars 2012. Onki var at finnast at.

Lønir

Stovnurin hevur skrivligar mannagongdir um klokkuskipan og arbeiðstíð. Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2011 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá nøkrum tilvildarliga valdum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

Inntøkur

Meginparturin av inntøkunum á stovnsnummari 110320 “Havstovan – vanligt virksemi” er fyri at taka lut í verkætlanum hjá t.d. P/F Fiskaaling, og fyri rakstrargjald (overhead).

Inntøkur seinastu 5 árini:

t.kr.

StRk	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
2181	Vørusøla til privat	-144	0	0	0	0
2182	Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir	0	0	0	0	-374
2191	Onnur søla av tænastum, leigu og langtíðarleigu, privat	-24	-64	0	0	0
2192	Onnur søla av tænastum, leigu og langtíðarleigu, alment	-1.226	-846	-694	-275	-442
	Tilsamans	**-1.394**	**-910**	**-694**	**-275**	**-816**

Havstovan hevur eisini inntøkur av egnum verkætlanum og verkætlanum, sum stovnurin ger í samstarvi við onnur lond. Tær verða bókaðar á stovnsnummar 141252 “Havstovan, verkætlanir”. Víst verður til brot um verkætlanir niðanfyri.

4.2.1 Um verkætlanir

Frá 1998 hava reglur verið í roknskaparvegleiðingini um játtanarviðurskifti, tá ið talan er um fremmanda fíggjan.

Sambært § 20 í Ll. nr. 42 frá 2009 “um landsins játtanarskipan”, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at virksemi av ikki handilsligum slag, sum eru fíggjað við stuðli, og sum eru sprottin úr vanliga virksemi stovnsins, kunnu fara fram undir rakstrarjáttanini. Í § 33 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan” eru neyvari reglur um at skráseta vørur og tænastur.

Í flestu førum fær Havstovan 20-25 % av kostnaðinum av lønum í rakstrargjaldi (overhead). Sambært yvirlitinum niðanfyri stemma inntøku- og útreiðslubókingar so at siga altíð á kontuni við árslok. Verkætlanirnar verða játtaðar og skrásettar á undirkontu 5.34.3.01.45 “Verkætlanir”.

Høvuðstøl á kontuni "Verkætlanir" árini 2007-2011:

t.kr.

St.konta	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
11	Lønir v.m.	2.836	2.774	2.819	3.645	3.690
14-19	Rakstrarútreiðslur	1.995	2.335	3.041	2.122	1.968
21	Søla av vørum og tænastum	-1.107	50	0	-167	-44
29	Ymsar rakstrarinntøkur	0	-45	0	-4	0
63	Vanligar flytingarinntøkur	-1.527	-2.833	-4.862	-3.161	-3.412
76	Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt.)	-2.197	-2.548	-998	-2.432	-2.226
Tilsamans		**0**	**-267**	**0**	**3**	**-24**

Tvær standardroknskaparkontur verða brúktar til bókingar av stuðli til verkætlanir. StRk. 6390 til stuðul, sum er játtaður av øðrum, t.d. danska Forsknings- og Innovationsstyrelsen og Northern Periphery Programme (NPP). StRk. 7610 er brúkt til inntøkur frá Granskingarráðnum og Fiskivinnuroyndum.

Stuðul til verkætlanir hevur seinastu 5 árini verið:

t.kr.

St.konta	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
63	Vanligar flytingarinntøkur	-1.527	-2.833	-4.862	-3.161	-3.412
76	Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt.)	-2.197	-2.548	-998	-2.432	-2.226
Tilsamans		**-3.724**	**-5.381**	**-5.860**	**-5.593**	**-5.638**

Vit valdu 6 verkætlanir at kanna, um roknskapurin fyri verkætlanirnar samsvaraði við fíggjarætlanina. Eisini kannaðu vit, um uppgerðir samsvaraðu tølunum í Búskaparskipan landsins.

Niðurstøða av grannskoðanini av verkætlanum

Bókingar á verkætlanir

Landsgrannskoðanin heldur, tað kann vera misvísandi, um roknskaparlesarin fær ta fatan, at allar inntøkur og útreiðslur, sum koma undir verkætlanir hjá Havstovuni, verða bókaðar á staðartátt í landsroknskapinum.

Okkara gjøgnumgongd av roknskapum fyri nakrar verkætlanir og samskifti við leiðsluna á Havstovuni vísir, at so er ikki. Havstovan hevur ikki í øllum førum bókað lønir til egin starvsfólk á verkætlanir. Heldur ikki hevur stovnurin bókað allar rokningar, ið eru sendar verkætlanum ávikavist sum inntøkur/útreiðslur, á verkætlanir og Havstovuna/Magnus Heinason.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Fiskimálaráðið heldur, at Havstovan kann ikki bóka útreiðslurnar øðrvísi, enn gjørt verður í løtuni.

Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at Fiskimálaráðið heldur, *"at tað, at granskarar á Havstovuni luttaka í ymsum verkætlanum, er partur av vanliga virkseminum, sum játtað verður til á kontu 5.34.3.01.20 "Vanligt virksemi". Útreiðslan skal bókast, har játtanin er. Havstovan fær t.d. játtað 11,1 mió.kr. til lønir til starvsfólk. Fleiri av hesum starvsfólkum hava sum partur av sínum vanliga arbeiði at luttaka í ymsum verkætlanum. Hetta merkir, at Løgtingið játtar pening til Havstovuna fyri at granska og kanna viðurskifti, fyri betur at kunna ráðgeva og kunna borgarar, vinnulív og landsstýrið um havið, og tað sum har býr. At starvsfólk á Havstovuni til tíðir luttaka í verkætlanum, ið fáa uttanhýsis*

fígging, broytir ikki leiðregluna um, at útreiðslur skulu bókast, har játtanin til somu útreiðslu er."

Landsgrannskoðanin skilir ikki svarið frá landsstýrismanninum m.a. tí, at tað í viðmerkingunum til kontu 5.34.3.01.45 í fíggjarlógini stendur, at kontan fevnir um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum v.m.

Tað er ikki í tráð við § 33 í K. nr. 84/2011 at skráseta útreiðslur til verkætlanir undir vanliga rakstrinum hjá stovninum. Í § 33 er ásett, at "*vørur og tænastur, sum verða nýttar bæði av stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum, skulu skrásetast undir ávikavist stuðulsfíggjað virksemi og vanligt virksemi samsvarandi veruligu nýtsluni."*

Landsstýrismaðurin sigur, at hann heldur, at bókingarnar av útreiðslum til verkætlanirnar fara fram sambært § 33 í K. nr. 84/2011.

Landsgrannskoðanin er ikki samd við landsstýrismanninum, tí stakroyndirnar, sum Landsgrannskoðanin hevur gjørt vísa, at allar inntøkur og útreiðslur, sum verða nýttar av stuðulsfíggjaða virkseminum, eru ikki skrásettar undir stuðulsfíggjaða virkseminum.

Leiga av Magnusi Heinason

Í roknskaparreglugerðini hevur Havstovan reglur um "útleigan av skipi". Har stendur at *"Inntøkan fyri hvønn dagin skal í minsta lagi svara fyri øllum kostnaðinum av skipinum og hýrum fyri hvønn dagin".*

Í tveimum av teimum seks verkætlanunum, sum vit kannaðu, hevur Havstovan roknað leigu av Magnusi Heinason við í ætlaðu útreiðslurnar. Ongar inntøkur eru bókaðar samsvarandi í høvuðskontu 05.34.3.04. Tilsamans er talan um 550 t.kr. í 2009 og 340 t.kr. í 2010.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sama grundgeving sum frammanfyri viðvíkjandi Havstovuni, er fyri virkseminum hjá Magnusi Heinason, t.v.s. Magnus Heinason fær játtan í fíggjarlógini til at gera kanningar. Summar teirra kunnu vera partur av einari verkætlan. Tað merkir ikki, at útreiðslan av vanliga virkseminum hjá Magnusi Heinason skal verða bókað á aðra kontu.

Landsgrannskoðanin er ikki samd við landsstýrismanninum, at ongin leiguinntøka skal verða bókað hjá Magnusi Heinason, tá ið útreiðslur at leiga Magnus Heinason eru við í budgetteraðu útreiðslunum til verkætlanir, og uppgerðin til stuðulslataran hevur í sær leigu av skipinum.

Í fíggjarlógini er játtanin til Magnus Heinason á einari høvuðskontu fyri seg. Tí heldur Landsgrannskoðanin at hesar inntøkur áttu at verði skrásettar í landroknskapin sum inntøka hjá Magnusi Heinason.

Uppgerðir til stuðulsveitarar

Landsgrannskoðanin hevur reist spurningin, um uppgerðirnar til stuðulsveitararnar NPP og Forsknings- og Innovationsstyrelsen eru rættar, tá ið partar av dagliga rakstrinum hjá Havstovuni og Magnusi Heinason eru við í útreiðslunum.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fiskimálaráðið heldur verandi uppgerðir vera nøktandi, og út frá tí, ið er upplýst frá Havstovuni, hevur hann ta fatan, at uppgerðirnar til stuðulsveitararnar eru rættar.

Sambært landsstýrismanninum geva uppgerðirnar fult yvirlit yvir tær útreiðslur, ið eru knýttar at verkætlanini. Bæði beinleiðis útreiðslurnar, inntøkurnar frá uttanhýsis stuðulsveitarum og íkastið av eginavrikunum hjá Havstovuni og/ella Magnusi Heinason. Landsstýrismaðurin sigur víðari, at halda stuðulsveitararnir uppgerðirnar vera nøktandi, eiga tær ikki at verða broyttar.

Stakroyndir av verkætlanum

Onkrar verkætlanir vóru ikki lidnar. Tær ætla vit at kanna gjøllari seinni. Viðmerkingar eru annars undir hvørjari verkætlan sær eftir staðartátti:

Stað 7109 Climate Saithe

t.kr.

StRk	Heiti	2009	2010	2011	sep. 2012
1110-1170	Lønir	407	392	418	125
1411-1520	Rakstrarútreiðslur	130	118	131	65
6390	Vanligar flytingarinntøkur	-537	-510	-549	0
	Tilsamans	0	0	0	190

Árini 2009-2011 fekk verkætlanin játtað 1.846 t.kr. í stuðli frá Forsknings- og Innovationsstyrelsen (FI). Havstovan hevur gjørt ársroknskapir, sum granskarin hevur brúkt til at søkja um upphæddirnar fyri hvørt árið sær.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um upphæddirnar í skemanum til FI samsvara upphæddunum í Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað, um lønin til granskaran svarar til tað, sum er givið upp til FI. Vit kannaðu eina ferðauppgerð. Vit høvdu onki at finnast at.

Í september 2012 hevur stjórin kunnað um, at roknskapurin er ikki enn gjørdur liðugur, og at hann verður sendir Landsgrannskoðanini, tá ið hann er tøkur.

Stað 7110 Water

Heitið á verkætlanini Water er ein stytting av “Warning of Algal Events to support aquaculture in the NPP coastal zone Region”. Sambært heimasíðuni hjá NPP er endamálið við føroyska partinum av verkætlanini at fáa til vega betri amboð til at kanna skeljaeitur í sambandi við heysting og sølu av skeljadjórum. Endamálið er eisini at minka um talið á eitrandi algum í skeljavinnu í útjaðaraøkjum.

Tveir granskarar á Havstovuni taka lut í verkætlanini í samstarvi við granskarar í Írlandi, Hetlandi og Noregi. Lønarútreiðslurnar til granskararnar eru ikki bókaðar á verkætlanini.

Verkætlanin er stuðlað av NPP 2007-2013. Sambært umsókn til NPP skuldi verkætlanin vara frá 1. apríl 2008 til 31. mars 2011. Verkætlanin snúði seg um at kanna strandaøki í Írlandi, Skotlandi, Hetlandi og Føroyum. Lead Partner í verkætlanini var National University of Ireland, Galway.

Ein treyt fyri útgjaldi av stuðli frá NPP er, at uppgerðir skulu verða gjørdar og váttaðar av einum “first level controller”.

Í umsóknarblaðnum til NPP um stuðul er samlaði kostnaðurin 345.450 EUR. Helvtin, 172.725 EUR (um 1.286 t.kr.) er játtað frá NPP. Ætlanin, býtt yvir ár, var:

EUR

Water	2008	2009	2010	2011	Tilsamans
	91.500	116.400	104.350	33.200	345.450

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina samsvarar við uppgerðirnar, sum Havstovan hevur latið NPP.

Uppgerðirnar eru gjørdar á skema frá NPP fyri eitt ávíst tíðarskeið ísenn, tilsamans eru seks uppgerðir. Til at grannskoða eftir hevur NPP ein "First level control check list". Sambært kekklistanum hjá NPP skulu allar útreiðslur skjalprógvast, og hvørt skjal skal verða váttað av "first level controller".

Saman við uppgerðunum hevur Havstovan latið NPP útskrift sum sá út til at vera úr Búskaparskipan landsins fyri uppgerðartíðarskeiðið, og avrit av øllum bókingarskjølunum til verkætlanina. Vit samanhildu tvær av viðløgdu útskriftunum við uppgerðir til NPP. Tær samsvaraðu.

Við at samanhalda nakrar bókingar á útskriftunum við landsroknskapin 2010 varnaðust vit, at nakrar bókingar á útskriftunum vóru ikki at finna í landsroknskapinum.

Tríggjar rokningar vóru fyri at leiga Magnus Heinason. Tær vóru ikki bókaðar í landsroknskapinum 2010, men tvær teirra vóru tó bókaðar í 2009. Tann triðja á 40 t.kr. var ikki bókað í landsroknskapinum. Aðrar rokningar fyri tilsamans stívar 100 t.kr. vóru heldur ikki bókaðar í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin undrast á, at rokningar verða skrivaðar til verkætlanir, og verða settar á bókingaryvirlit, sum verður lagt við til grannskoðanina hjá NPP, uttan at rokningarnar verða bókaðar í landsroknskapinum.

Havstovan greiddi frá, at tað var vanligt at skráseta eginfíggjan á henda hátt. Havstovan vísti eisini til, at ein upphædd á 900 t.kr., fyri at leiga Magnus Heinason til verkætlanina Nebbasild, var ikki inntøkuført hjá Magnus Heinason.

Stað 8102 Havtaska

Granskingarráðið og Fiskivinnuroyndir hava stuðlað verkætlanini. Í stuðulsjáttanini frá Granskingarráðnum verður boðað frá, at Havstovan tekur onki rakstrargjald. Fiskivinnuroyndir rinda 25% í rakstrargjaldi. Í verkætlanini Havtaska eru útreiðslurnar, umframt lønir til granskara, so at siga bert fiskireiðskapur, keyptur í 2009.

Í september 2012 hevur Havstovan greitt frá, at stovnurin fíggjar part av verkætlanini við at gjalda 25% av lønini hjá granskaranum. Landsgrannskoðanin hevur kannað lønina fyri 2011. Hon samsvarar við 75% av samlaðu lønarútreiðsluni til granskaran. Mótsatt lønarútreiðslunum til verkætlanina Water eru lønirnar til granskaran í verkætlanini Havtaska bókaðar á sjálva verkætlanina.

Játtaður stuðul 2009-2012:

kr.

	2009	2010	2011	2012	Tilsamans
Granskingarráðið	257.370	368.150	379.195	165.985	1.170.700
Fiskivinnuroyndir	0	189.962	238.220[11]	72.258	500.440
Tilsamans	257.370	558.112	617.415	238.243	1.671.140

Stað 8124 Nebbasild

Verkætlanin er liður í Ph.d. lestri hjá einum granskara. Verkætlanin var roknað at kosta 3.347.210 kr., og skuldi verða fíggjað soleiðis:

Fiskivinnuroyndir	1.125.000 kr.
Havstovan (leiga av skipi)	900.000 kr.
Forsknings- og Innovationsstyrelsen (FI)	1.322.210 kr.
Tilsamans	3.347.210 kr.

Játtaður stuðul tilsamans:

kr.

Stuðul	2008	2009	2010	2011	2012	Tilsamans
Fiskivinnuroyndir	437.270	335.856	352.638	0	0	1.125.764
FI	0	453.760	453.760	453.760	244.345[12]	1.605.625
Tilsamans	437.270	789.616	806.398	453.760	244.345	2.731.389

Í verkætlanarsáttmálanum frá juni 2008 millum Fiskimálaráðið og Havstovuna er ásett, at verkætlanin byrjar 1. januar 2008 og endar 31. desember 2010.

Í hesari verkætlan eru lønirnar til granskaran eisini bókaðar. Havstovan hevur latið roknskapir fyri 2009 og 2010 inn til Forsknings- og Innovationsstyrelsen. Tølini, sum eru givin upp, samsvara tølunum í Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað rakstrarútreiðslurnar í 2011. Vit høvdu onki at finnast at.

Leiga av skipi

Sambært útgreinaðari fíggjarætlan er roknað við at brúka 900 t.kr. til at leiga skip. Landsgrannskoðanin hevur kannað útreiðslurnar av verkætlanini, men dugdi ikki at síggja nakrar útreiðslur til at leiga skip.

Í roknskapunum til Forsknings- og Innovationsstyrelsen fyri 2009 og 2010 eru settar ávikavist 550 t.kr. og 300 t.kr. sum útreiðslur til leigu av skipi. Í 2011 er eingin leiguútreiðsla.

Í september 2012 hevur Havstovan kunnað um, at talan er um mettan kostnað, sum var settur í verkætlanina, tá ið hon varð budgetterað. Upphæddin er ikki bókað á "stað 8124" í Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin undrast á, at útreiðslur verða settar á uppgerðina til Forsknings- og Innovationsstyrelsen, uttan at tær eru bókaðar í landsroknskapinum/verkætlanini. Vit ivast í um tað ber til at siga, at uppgerðin til FI er røtt, tá verkætlanin ikki hevur goldið leigu fyri Magnus Heinason.

[11] Upprunaliga vórðu játtaðar 138.220 kr. Seinni eru 100 t.kr. játtaðar afturat.
[12] Verkætlanin bleiv longd og tí eru játtaðar 244.345 kr. í 2012

Stað 8133 Pelagiska kompleksið

Granskarin, sum er verkætlanarleiðari fyri Pelagiska kompleksið, var hýstur hjá Havstovuni. Hann hevur fingið játtaðan stuðul frá Granskingarráðnum og Fiskivinnuroyndum. Í 2011 hevur verkætlanin fingið 100 t.kr. frá Norrønum Atlantssamstarvi.

Játtaður stuðul:

kr.

	2010	2011	2012	Tilsamans
Granskingarráðið	0	300.000	255.000	600.000[13]
Fiskivinnuroyndir	500.000	385.696	281.329	1.167.025
Tilsamans	500.000	685.696	536.329	1.722.025

31. januar 2012 er leiðarin fyri granskingarætlanini fluttur til Landsbankan, og heldur fram við verkætlanini har. Orsøkin er, at í Landsbankanum skal hann gjalda minni í rakstrargjaldi enn til Havstovuna.

Í sáttmálanum ímillum Granskingarráðið og Havstovuna, um játtan til verkætlanina, er tað Havstovan, sum er játtanarmóttakari. Sambært sáttmálanum hevur játtanarmóttakarin ábyrgdina, m.a. av at verkætlanin verður gjøgnumførd innan fyri tíðarkarmarnar. Eisini skal endalig uppgerð og frágreiðing verða latin Granskingarráðnum.

Í oktober 2012 hevur Landsgrannskoðanin spurt landsstýrismannin í fiskivinnumálum hvørja ábyrgd Havstovan hevur, nú verkætlanarleiðarin er fluttur til Landsbankan.

Landsstýrismaðurin svaraði, at tað er verkætlanarleiðarin, og annars tey sum stuðla verkætlanina, ið hava ábyrgd av úrtøkuni av verkætlanini og av fíggjarligu viðurskiftunum. Somuleiðis er tað bókhaldið, har útreiðslurnar verða skrásettar, ið skal tryggja, at skrásetingarnar fylgja galdandi reglum.

Verkætlanin verður ikki liðug fyrr enn í 2012. Landsgrannskoðanin ætlar tí seinni at gera neyvari kanningar hjá stuðulslatarunum.

Stað 8145 NAACOS

NAACOS[14] er ein verkætlan, sum DTU[15] stendur fyri. Avtala um verkætlanina er undirskrivað í september 2010. Verkætlanin er stuðlað av Styrelsen for Forskning og Innovation, sambært heimasíðuni hjá NAACOS.

Partarnir, sum taka lut í verkætlanini eru:

National Environmental Research	2.942.925 kr.
DTU Aqua	4.105.236 kr.
Faroe Marine Research Institute	2.016.000 kr.
DHI	925.224 kr.
Danish Meterological Institute	2.326.152 kr.
University of Copenhagen	2.835.590 kr.
Scottish Association for Marine	218.000 kr.
Tilsamans	15.369.127 kr.

[13] Granskingarráðið hevur játtað tilsamans 600.000 kr., men skilar sær rætt til at afturhalda 45.000 kr. til endalig uppgerð og frágreiðing er latin teimum.
[14] North Atlantic Artic coupling in at changing Climate
[15] Danmarks Tekniske Universitet

Eginfíggjanin hjá Havstovuni er 1.008 t.kr., restin er stuðul frá DSF[16]. Í "*formular til Styrelsen for Forskning og Innovation*", er parturin hjá Havstovuni settur upp sum fíggjarætlan fyri árini 2011-2014:

kr.

	2011	2012	2013	2014	Tilsamans
Havstovan	396.000	276.000	216.000	120.000	1.008.000
DTU	396.000	276.000	216.000	120.000	1.008.000
	792.000	552.000	432.000	240.000	2.016.000

Í apríl 2011 hevur DTU goldið 396 t.kr. av játtaða peninginum til verkætlanina. Landsgrannskoðanin hevur ikki gjørt neyvari kanningar av hesari verkætlan, m.a. tí at hon varir til 2014. Væntandi heldur grannskoðanin fram eftir at verkætlanin er lokin.

Sáttmálatreytir hjá Granskingarráðnum

Ein av treytunum, sum Granskingarráðið setur í sáttmálum um játtan til verkætlanir, er, at játtanarmóttakarin hevur fulla ábyrgd av, at peningurin verður nýttur til tað endamál, hann er játtaður til. Verður peningurin nýttur til annað endamál, ella verður verkætlanin ikki gjøgnumførd, hevur Granskingarráðið rætt til at krevja allan peningin ella partar av honum aftur.

Landsgrannskoðanin spurdi:

- um Havstovan hevur fingið nakað krav um afturrindan,
- um Havstovan hevur mett um vandan fyri slíkum kravi, og
- um líknandi treytir eru frá øðrum stuðulsveitarum.

Í september 2012 hevur Havstovan greitt frá, at higartil hevur Havstovan ikki fingið nakað krav um afturrindan. Eisini kunnaðu tey um, at aðrir stuðulslatarar seta krøv av sama slag.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard (ISSAI 1240) spurdi Landsgrannskoðanin, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki.

Eisini spurdi Landsgrannskoðanin leiðsluna, um hon hevur kunnleika um svik, illgruna um svik ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

Leiðslan segði seg ikki hava kunnleika um tílíkt. Leiðslan hevur ikki beinleiðis tikið spurningin um møguligt svik upp við starvsfólkini.

4.3 Trygdargrunnur fiskivinnunnar (LG 2011/205-0344)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í januar 2012 umrøddu vit í einum broti um grannskoðan av Lønjavningarstovuni, at umsitingin av inntøkutrygdini til fiskimenn var flutt til Trygdargrunn fiskivinnunnar.

Trygdargrunnur fiskivinnunnar er settur á stovn við Ll. nr. 132/2010 "um Trygdargrunn fiskivinnunnar".

[16] The Danish Council for Strategic Research

Í oktober 2011 kunnaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum um, at so skjótt sum báðir partar høvdu góðkent avtaluna millum Fiskimálaráðið og Trygdargrunn fiskivinnunnar, fóru neyðugar tillagingar at verða gjørdar í lógarverkinum. Hann væntaði, at tað fór at verða seinast í november 2011.

Nýggj kunngerð "um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum", er lýst. Kunngerðin, sum er nr. 67 frá 16. mai 2012, ásetur, at upplýsingar um avreiðingar nú skulu verða latnar Fiskiveiðieftirlitinum.

Í desember 2011 hevur landsstýrismaðurin broytt kunngerð nr. 18/2009 "Um stuðul til flutning av fiski", har "Lønjavningarstovan" er broytt til "Trygdargrunnur fiskivinnunnar".

24. februar 2012 hava Fiskimálaráðið og Trygdargrunnur Fiskivinnunnar skrivliga avtalað, at Trygdargrunnurin átekur sær at umsita *stuðul til flutning av fiski* sambært Ll. nr. 14 frá 3. mars 1999 og tilknýttum kunngerðum. Sambært avtaluni rindar Fiskimálaráðið Trygdargrunninum 195 t.kr. um árið fyri tænastuna.

4.4 Trygdarmiðstøðin – keyp og umbygging (LG 2011/205-0351)

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í januar 2012 umrøddu vit grannskoðanina av keypi og umbygging av bygningi til Trygdarmiðstøðina.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann bíðar eftir svari frá advokati.

Eitt upprit varð í oktober 2011 sent landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, har vit m.a. settu fram fleiri spurningar. Fiskimálaráðið svaraði í januar 2012. Vit hildu, at nøkur viðurskifti vóru ógreið, og tí helt grannskoðanin fram í 2012.

Í juni 2012 setti Landsgrannskoðanin landsstýrismanninum nakrar spurningar í hesum máli. Vit hava síðani til fánýtis mint landsstýrismannin á spurningarnar. Landsgrannskoðanin kann ikki gera grannskoðanina lidna, fyrr enn landsstýrismaðurin hevur svarað.

Í oktober 2012 boðar landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum frá, at hann hevur ikki svarað, tí at hann bíðar eftir svari frá advokati.

5 Vinnumál

5.1 Vinnumálaráðið (LG 2011/206-0111)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu frágreiðing á ávís viðurskifti hjá Vinnumálaráðnum. Øll viðurskiftini eru ikki komin í rættlag enn.

Váðameting

Í 2008 varð gjørd ein váðameting av KT-viðurskiftunum í Vinnumálaráðnum. Í váðametingini eru fleiri atfinningar. Vinnumálaráðið hevur í onkrum føri sett í verk tiltøk, men samanumtikið er onki munagott gjørt at bøta um veikleikarnar, sum váðametingin vísti á.

Spurt, svaraði Vinnumálaráðið í august 2011, at Vinnumálaráðið hevði ikki havt neyðugu orkuna at raðfesta økið. Tó hevði Vinnumálaráðið gjørt avtalu við Gjaldstovuna um at gera eina nýggja váðameting av KT-trygdini hjá ráðnum. Eftir ætlan skuldi hon verða gjørd á heysti 2011.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í vinnumálum kunnað um, at Vinnumálaráðið hevur tikið upp samskifti við Gjaldstovuna um at gera nýggja váðameting, og Gjaldstovan hevur játtað at gera hetta arbeiði. Fyrsti fundur var í desember 2011. Grundað á stóra arbeiðsbyrðu á Gjaldstovuni hava tey ikki havt stundir at gera meira við málið fyrr enn nú. Fundur hevur aftur verið í oktober 2012 har váðametingin frá 2008 varð gjøgnumgingin, og avtalað varð, at tillagingar skuldu verða gjørdar.

Orðaður KT-trygdarpolitikkur

Vinnumálaráðið hevur ongan orðaðan KT-trygdarpolitikk. Í váðametingini, sum varð gjørd av KT-viðurskiftunum á Vinnumálaráðnum, varð *"manglandi kunningartrygdarpolitikkur"* nevndur sum ein hin mest týðandi váðin. Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at ætlanin er at orða ein KT-trygdarpolitikk, sum framhald av váðametingini, og at arbeitt verður við ætlanini.

Í august 2011 greiddi Vinnumálaráðið frá, at ráðið var limur í Landsnet, og at Landsnet umsat alt KT-økið hjá Vinnumálaráðnum. Nevndin í Landsnet hevði gjørt avtalu við Vinnumálaráðið um, at Landsnet skuldi gera uppskot til KT-trygdarpolitikk. Hetta arbeiði skuldi eftir ætlan verða liðugt á heysti 2011.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvat síðani er hent í málinum. Í oktober 2012 svaraði Vinnumálaráðið, at tey hava havt samskifti við Gjaldstovuna/KT-fyrisitingina og avtalað, at KT-fyrisitingin sendir Vinnumálaráðnum skjøl, sum starvsfólkini skulu skriva undir.

Endurskapan av dátum

Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at ráðið hevur ikki fastar mannagongdir um at endurskapa dátur.

Í august 2011 greiddi Vinnumálaráðið frá, at Landsnet umsat alt KT-økið hjá Vinnumálaráðnum. Sambært avtalu í februar 2010, hevði Landsnet átikið sær at taka backup og harvið at endurskapa dátur. Endurskapanin av dátunum kom tíverri ikki í nakra fasta legu, og tí heitti Vinnumálaráðið á vári 2011 á Landsnet um at royna at endurskapa dáturnar. Tað varð gjørt, og onki var at finnast at.

Seinni í árinum heitti Vinnumálaráðið á Landsnet um at gera eina nýggja roynd. Ætlanin var at gera hesar royndir tvær ferðir um árið.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvat síðani er hent í málinum um at endurskapa dátur. Í oktober 2012 hevur Vinnumálaráðið svarað. Vinnumálaráðið nýtir journalskipanina 360, og ráðið hevur arbeitt við at gera avtalu við KT-veitaran um at taka backup av journalini og at endurskapa dátur.

5.2 Umsiting av Vinnusjúkugrunninum (LG 2011/206-0211)

Tá umsitingin av Vinnusjúkugrunninum við tænastuavtalu varð løgd til TAKS at umsita, bleiv stjóraheimildin samstundis flutt til TAKS soleiðis, at TAKS hevur dagligu leiðsluna av umsitingini av Vinnusjúkugrunninum. Tænastuavtalan millum TAKS og Vinnusjúkugrunnin verður endurskoðað.

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað umsitingina av Vinnusjúkugrunninum, sum er løgd deildini hjá TAKS á Tvøroyri at umsita.

Endamál, virksemi og uppgávur

Játtanin, at umsita Vinnusjúkugrunnin, er á høvuðskontu 6.21.1.15. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina endurrindar Vinnusjúkugrunnurin landinum kostnaðin av umsitingini. Sostatt er játtanin útreiðsluneutral.

Í viðmerkingunum til Ll. nr. 67 frá 25. mai 2009 “um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða” v.s.b. stendur, at fyrisitingin av grunninum fer at kosta áleið 600-800 t.kr. og at roknskapurin fer at kosta 20 t.kr. Tølini í Búskaparskipan landsins vísa, at í 2010 og 2011 hevur fyrisitingin kostað um 950 t.kr., og at kostnaðurin fyri 2012 er mettur til tað sama. Kostnaðurin í 2011 fyri roknskapin hjá grunninum var 39 t.kr.

Roknskapartøl 2010-2012

t.kr.

St.konta	Heiti	R2010	R2011	J2012
11	Lønir v.m.	73	42	150
14	Keyp av vørum og tænastum	270	448	200
15	Keyp av útbúnaði, netto	134	5	100
71	Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr)	482	460	500
76	Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt)	-959	-955	-950
Tilsamans		**0**	**0**	**0**

Umsiting av Vinnusjúkugrunninum

Sambært § 78, stk. 7, í lógini setur nevndin í grunninum stjóra at hava dagligu umsitingina av grunninum. Sambært § 78, stk. 7, 2. pkt., kann nevndin eisini leggja dagligu umsitingina til ein annan almennan stovn.

Nevndin í Vinnusjúkugrunninum hevur í 2010 gjørt tænastuavtalu við TAKS, Tvøroyri. Í § 2 í tænastuavtaluni er ásett, at tænasturnar fevna um raksturin í sambandi við at krevja inn gjøld til grunnin, útgjøld til persónar, sum fáa endurgjald eftir Ll. nr. 67/2009, og um hjálpartænastur, ið eru knýttar at hesum høvuðsuppgávum, eitt nú at halda og dagføra skráir yvir inngjaldarar og móttakarar av endurgjaldi.

Í avtaluni er eisini ásett, at TAKS skal standa fyri bókhaldi grunsins, eins og TAKS skal seta upp roknskapin og greiða roknskapin til grannskoðan, umframt eftir nærri avtalu at loysa aðrar uppgávur fyri Vinnusjúkugrunnin.

Umsitingin av Vinnusjúkugrunninum hevur stovnsnummar 149660 í Búskaparskipan landsins, og skrásettur stovnsleiðari er nevndarformaðurin. Hann váttar og leysgevur rokningar, meðan eitt skrivstovufólk hjá TAKS konterar/góðkennir.

Daglig leiðsla

Í mai 2012 hevur Landsgrannskoðanin spurt Vinnumálaráðið:

- hvør hevur stjóraheimildirnar sambært § 11, stk. 4, § 12, stk. 1, og § 16 stk. 1-7, í K. nr. 160/2009 "um viðtøkur fyri Vinnusjúkugrunnin",
- hvat merkir tað, at hava dagligu leiðsluna av grunninum sambært § 9, stk. 1 og 2, og
- hvør hevur dagligu leiðsluna av grunninum.

Vinnumálaráðið svaraði í oktober 2012, at sambært kunngerðini um Vinnusjúkugrunnin kann nevndin leggja umsitingina til annan almennan stovn. Verður umsitingin løgd til annan almennan stovn, so er hesin stovnur at meta sum "stjóri" eftir § 12. Almenni stovnurin hevur tá dagligu leiðsluna undir ábyrgd av nevndini.

Landsgrannskoðanin spurdi TAKS, Tvøroyri, hvussu nevndin kann hava eftirlit við umsitingini, tá ið formaðurin sjálvur virkar sum leiðari fyri roknskaparhaldinum. Vit fingu onki svar.

Í oktober 2012 sigur Vinnumálaráðið, at ráðið heldur tað ikki vera nakran trupulleika, at formaðurin leysgevur rokningar, tí tað gevur betri møguleika fyri at fylgja við roknskaparhaldinum. Vinnumálaráðið heldur, at tað er upp til nevndarformannin at siga, hvør skal hava stovnsleiðsluna í leysgevingarhøpi.

Vit hava biðið landsstýrismannin í fíggjarmálum og landsstýrismannin í vinnumálum um viðmerkingar til frágreiðingina.

Í oktober 2012 hevur Fíggjarmálaráðið sagt, at tey eru samd við Landsgrannskoðanina, at tá ið dagliga umsitingin av grunninum verður løgd til TAKS, skal tað sambært kunngerðini verða tulkað sum, at TAKS hevur ábyrgd av dagligu leiðsluni av Vinnusjúkugrunninum. Landsstýrismaðurin sigur víðari, at higartil hevur TAKS ikki skilt uppgávuna soleiðis.

Sambært landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður í løtuni samskift um at endurskoða tænastuavtaluna millum TAKS og Vinnusjúkugrunnin.

Forskriftir

Í § 3 í avtaluni er ásett, at TAKS, Tvøroyri, ger forskriftir fyri rakstraruppgávurnar og hevur ábyrgdina av, at Vinnusjúkugrunnurin góðkennir forskriftirnar.

TAKS, Tvøroyri, hevur greitt frá, at tey hava gjørt eina roknskaparreglugerð.

Roknskaparhald

Í september 2012 hevur Landsgrannskoðanin fingið avrit av roknskaparreglugerðini fyri stovnsnummar 149660 "umsiting av Vinnusjúkugrunninum". Reglugerðin er ikki undirskrivað, men sambært stjóranum á TAKS, Tvøroyri, hevur

nýggi nevndarformaðurin greitt frá, at aðalstjórin í Vinnumálaráðnum hevði onkrar viðmerkingar/rættingar til roknskaparreglugerðina.

Starvsfólk hjá TAKS og formaðurin í Vinnusjúkugrunninum hava gjøgnumgingið reglugerðina saman við Vinnumálaráðnum við atliti at, hvørjar broytingar eiga at verða gjørdar

Í pkt. 1.2 í roknskaparreglugerðini, um skipan av roknskaparhaldinum, er ásett, at er stjórin góðkennir allar útreiðslur og inntøkur.

Sambært bókingunum í Búskaparskipan landsins leysgevur nevndarformaðurin. Landsgrannskoðanin heldur tað vera óheppið, at nevndarformaðurin bæði ávísir til sín sjálvs og góðkennir.

Lønarútreiðslur

Vinnusjúkugrunnurin rindar TAKS fyri tænastur, har ein partur er løn til bókhaldaran. Í 2010 rindaði Vinnusjúkugrunnurin fyri eitt fulltíðar starvsfólk. Í august 2010 boðaði nevndarformaðurin TAKS, Tvøroyri, frá, at nevndin hevði samtykt at siga upp tænastusáttmálan við TAKS viðvíkjandi støddini av samsýning fyri tænastuveitingar. Uppsøgnin var grundað á, at við verandi virksemi var ikki grundarlag fyri meira enn einum hálvum ársverki. Síðani hevur grunnurin rindað fyri eitt hálvt ársverk.

Stakroyndir

Landsgrannskoðanin hevur gjørt nakrar stakroyndir av skjølum í Búskaparskipan landsins og hevði nakrar viðmerkingar/spurningar.

Tá ið Vinnusjúkugrunnurin hevur endurrindað fyri ferðauppgerðir hjá nevndarformanninum, hevur bókhaldarin skrivað undir ferðaloyvið og góðkent útgjaldið. Nevndarformaðurin hevur ávíst upphæddirnar. Onki er viðmerkt, í hvørjum sambandi ferðin hevur verið. Harafturat eru fleiri upphæddir ikki skjalprógvaðar, men bókaðar eftir eurocard. Landsgrannskoðanin kann tí ikki sanna at upphæddirnar eru rættar.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað ikki er nøktandi, at vegleiðingin frá Fíggjarmálaráðnum um “ferðauppgerðir fyri tænastuferðir uttanlands” ikki verður fylgd.

Í oktober 2012 hevur Vinnumálaráðið boðað frá, at tey fleiri ferðir hava gjørt undanfarna nevndarformann varugan við, at ferðafrágreiðingar mangla, og tað als ikki kann góðtakast.

5.3 Brúkaraumboðið (LG 2011/206-0371)

Í januar 2012 vísti Landsgrannskoðanin á fleiri roknskaparlig viðurskifti, sum als ikki vóru nøktandi. Landsstýrismaðurin hevur eftirsíðan boðað frá, at fíggjarliga ábyrgdin er tikin frá stjóranum, og at stovnurin í framtíðini fer at vera í skrivstovufelagsskapi saman við stovnunum á Skálatrøð.

Í frágreiðing í januar 2012 vísti Landsgrannskoðanin m.a. á, at privatnýtsla og roknskapur hjá Brúkaraumboðnum vóru blandað saman, at skjalprógvini fyri útreiðslur stovnsins ikki vóru nóg góð, og at gjøld fyri arbeiði í sambandi við skeið og konsulentarbeiði vóru goldin út uttan um skattaskipanina.

Vinnumálaráðið segði seg samanumtikið vera samt við Landsgrannskoðanina, at umsitingin av roknskaparhaldinum hjá Brúkaraumboðnum ikki hevði verið røkt forsvarliga. Vinnumálaráðið hevði gjørt av at taka roknskaparhaldið hjá Brúkaraumboðnum inn í Vinnumálaráðið at umsita, til onnur møgulig loysn varð funnin.

Landsstýrismaðurin heldur, at møguliga er stovnurin ov lítil til at hava fíggjarliga ábyrgd, men helt stjórin seg ikki hava orku til at umsita játtanina, átti hann at havt boðað Vinnumálaráðnum frá, soleiðis at stovnurin og Vinnumálaráðið í felag høvdu kunna funnið eina nøktandi loysn. Í framtíðini fer stovnurin at vera í skrivstovufelagsskapi saman við stovnunum á Skálatrøð.

5.4 Rúsdrekkasøla Landsins (LG 2011/206-0373)

Seinasta árið hevur Landsgrannskoðanin verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirliti á deildum hjá Rúsdrekkasølu Landsins. Dagligu sølurnar eru stemmaðar av við bókhaldið og peningastovnskonturnar. Goymslurnar á sølustøðunum eru stemmaðar av við goymsluyvirlitið í høvuðsbókhaldinum.

Landsgrannskoðanin hevur mælt Rúsdrekkasøluni til at broyta mannagongdir í sambandi við at gera kassapeningin upp. Sambært Rúsdrekkasøluni hava tey broytt mannagongdirnar.

Landsgrannskoðanin hevur gjørt eftirlitsteljingar av goymsluni hjá Rúsdrekkasøluni við árslok. Landsgrannskoðanin hevur onki at finnast at.

6 Mentamál

6.1 Heilsuskúli Føroya (LG 2011/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað Heilsuskúla Føroya. Niðan fyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Heilsuskúli Føroya er skipaður sambært Ll. nr. 57 frá 26. mai 2010 "um heilsuútbúgvingar". Skúlin hevur tvær útbúgvingar, heilsuhjálpara- og heilsurøktaraútbúgving.

Roknskaparreglugerð

Skúlin hevur eina dagførda og góðkenda roknskaparreglugerð, sum er skipað innan karmarnar av rundskrivi Fíggjarmálaráðsins 1. februar 2001 "vegleiðing um roknskaparreglugerðir".

Trygdarpolitikkur, herundir váðameting

Ongin orðaður trygdarpolitikkur er gjørdur, og ongin váðameting er gjørd viðvíkjandi upplýsingum og KT-nýtslu. Í september 2012 hevur leiðarin á skúlanum boðað frá, at skúlin er í holt við at orða trygdarpolitikkin og gera váðameting.

Á skúlanum er ein servari. Í servaranum eru tveir harðdiskar, sum spegla hvønn annan. Teldurnar hava brandmúr og virusverju. Tá skúlaárið endar, verður talgilt avrit av dátagrunninum goymt í bankaboks.

Lønir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar lønarútgjaldingar á Heilsuskúlanum. Samanumtikið vísti grannskoðanin, at lønirnar samsvaraðu við galdandi reglur og lønartalvur.

6.2 Miðnámsskúlin í Suðuroy (LG 2011/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað fyrisitingina á Miðnámsskúlanum í Suðuroy. Niðan fyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Miðnámsskúlin í Suðuroy er deild undir Føroya Studentaskúla og HF-skeiði. Leiðslu- og umsitingarbýtið millum Føroya Studentaskúla og HF-skeið og Miðnámsskúlan í Suðuroy er ásett í reglugerð frá 16. juni 2004. Rektarin á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði hevur evstu námsfrøðiligu og fíggjarligu ábyrgdina av skúlanum, meðan deildarleiðarin á Miðnámsskúlanum í Suðuroy hevur dagligu leiðsluna.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin varð góðkend av Mentamálaráðnum í 2006. Eftir at Miðnámsskúlin í mars 2009 flutti í nýggjan bygning, vórðu stig tikin til at dagføra roknskaparreglugerðina.

Tøkur peningur

Miðnámsskúlin hevur kassa, peningastovnskontu og gjaldkort, sum eru skrásett í landsbókhaldinum. Kassin verður regluliga gjørdur upp, og peningastovnskontan

stemmað av. Kassauppgerðin og avstemmanin av peningastovnskontuni verða gjørd á uppgerðarskjal. Vit høvdu onki at finnast at uppgerðunum.

Kt-trygd

Miðnámsskúlin hevur upplýsingar, dátugrunnar og skjøl, sum hava týdning fyri skúlan og næmingarnar.

Leiðslan hevur gjøgnumgingið trygdarskipanina og er komin til ta niðurstøðu, at váðin er sera lítil.

Skúlin hevur orðaðan trygdarpolitikk. Allar persónsupplýsingar verða goymdar í læstum rúmi. Skúlin hevur ein servara. Í servaranum eru tveir harðdiskar, sum spegla hvønn annan, og teldurnar hava brandmúr og virusverju.

Tá ið skúlaárið endar, verður talgilt avrit av dátugrunninum, og avrit av prógvum, goymt í bankaboks. Harafturat verða avrit av øllum prógvum goymd í eldtryggum skápi. Deildarleiðarin hevur kunnað um, at allar dáturnar kunnu endurskapast.

Lønir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar lønarútgjaldingar hjá Miðnámsskúlanum. Samanumtikið vísti grannskoðanin, at lønirnar samsvaraðu galdandi sáttmálum. Vit høvdu onki at finnast at.

6.3 Vinnuháskúlin (LG 2011/207-0236)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað fyrisitingina á Vinnuháskúlanum. Niðan fyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini. Í frágreiðingini verður víst á vantandi kassauppgerðir og ikki dagførda roknskaparreglugerð.

Framvegis eru lærarar, sum ikki lúka treytirnar um undirvísingarførleikar, sum ásett í kunngerðum.

Vinnuháskúlin er skipaður sambært Ll. nr. 55 frá 24. apríl 2001 “um útbúgving av manning á skipum o.ø.” Undirvísingarvirksemið fatar um skipara-, skipsførara-, maskinist- og maskinmeistaraútbúgving. Eisini verður skipað fyri skeiðsvirksemi í sjóvinnu- og eftirútbúgvingarskeiðum fyri maskinistar, maskinmeistarar, skiparar, skipsførarar og onnur.

Vinnuháskúlin hevur ikki sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit sambært reglunum í roknskaparkunngerðini.

Roknskaparreglugerð

Vinnuháskúlin hevur eina roknskaparreglugerð frá 2006, sum Mentamálaráðið ikki hevur góðkent. Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 kunnað um, at Mentamálaráðið hevur biðið Vinnuháskúlan dagføra roknskaparreglugerðina frá 2006 og senda hana til góðkenningar hjá ráðnum.

Ognaryvirlit

Vinnuháskúlin hevur onki ognaryvirlit. Arbeiðið at gera ognaryvirlit byrjaði í 2007, men steðgaði upp. Sambært skúlaleiðsluni er nú aftur farið í holt við at fáa ognaryvirlit gjørt.

Kassi og peningastovnskontur

Vinnuháskúlin hevur tveir kassar við reiðum peningi. Annar er til inntøkur fyri sølu av bókum til næmingar og hin til sølu í kantinuni. Vit taldu upp kassan fyri sølu av bókum, og høvdu vit onki at finnast at.

Landsgrannskoðanin ætlaði at telja kantinukassan upp, men av tí at ongin verulig uppgerð er gjørd, bar tað ikki til. Landsgrannskoðanin kann tí ikki sannað, um kassin er rættur. Vit hava mælt til, at øll søla verður tøppað inn og stemmað av dagliga. Leiðslan hevur ásannað, at kassaskipanin ikki virkar. Arbeitt verður við at fáa til vega nýggja kassaskipan.

Vinnuháskúlin hevur eina peningastovnskontu, sum gjaldkort og netbanki eru knýtt at. Vit hava ikki gjørt kontuna upp. Í sambandi við at konturnar hjá Brandskúlanum og Vinnuháskúlan vórðu lagdar saman, er munur komin í. Fyri árini 2008-2012 eru konturnar stemmaðar av, men enn manglar at stemma av konturnar fyri árini 2005-2007. Leiðslan hevur kunnað um, at ætlanin er at stemma tær av fyri árslok 2012.

Fartelefonir

Vinnuháskúlin eigur og rindar fyri fartelefonir. Vinnuháskúlin hevur ikki latið TAKS upplýsingar um fría fartelefonnýtslu. Skúlin hevur spurt seg fyri hjá TAKS um leiðbeining hesum viðvíkjandi.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 kunnað um, at Mentamálaráðið hevur heitt á skúlan um at rykkja TAKS eftir svari.

Váðameting og KT-trygd

Vinnuháskúlin hevur egna KT-skipan við upplýsingum um næmingarnar, og skipan til at skráseta próvtøl hjá næmingunum.

Leiðslan hevur kannað møguleikarnar at brúka KT-skipanina hjá Landsnet ella Traðanet, men skúlin hevur enn ikki valt at brúka tær.

Vinnuháskúlin hevur onga váðameting gjørt, men leiðslan ætlar í næstum at endurskoða alla KT-nýtsluna á skúlanum herundir at gera váðameting.

Lønir

Við støði í lønarútgjaldingum fyri seinna hálvár 2011 kannaði Landsgrann-skoðanin, um lønirnar hjá nøkrum starvsfólkum vóru rættar. Vit hava samanhildið setanarskriv, prógv o.a. við galdandi sáttmálar, og hava eisini samanborið lønarútgjaldingarnar við tímatal, yvirtíð, tímatalvur og næmingayvirlit. Vit høvdu onki at finnast at.

Undirvísingarførleikar

Sambært K. nr. 106/2005 “um maskinmeistaraútbúgving” og K. nr. 107/2005 “um skiparaútbúgving” skulu lærarar, sum undirvísa næmingum í hesum útbúgvingum, lúka ávísar treytir um undirvísingarførleikar. Tað er ásett í kunngerðunum, at lærarar, sum undirvísa maskinmeistarum og skiparum, skulu hava ávikavist maskinmeistaraútbúgving ella skipsføraraútbúgving, í minsta lagi hava 2 ára starvsroyndir, og í minsta lagi hava staðið bachelorútbúgving frá hægri lærustovni.

Í báðum kunngerðunum er somuleiðis ásett, at teir lærarar, sum ikki lúka krøvini um undirvísingarførleikar, kunnu halda fram við undirvísingini treytað av, at før-leikastøðið hjá viðkomandi lærarum er í samsvari við ásettu krøvini í seinasta

lagi 5 ár eftir, at kunngerðin er komin í gildi. Mentamálaráðið kann eftir umsókn frá skúlanum gera undantak frá reglunum.

Stjórin á Vinnuháskúlanum hevur kunnað um, at lærarar skulu lúka krøvini til undirvísingarførleikar, og at tað eru lærararnir sjálvir, sum skulu taka stig til at lúka treytirnar í lógini.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 kunnað um, at nakrir lærarar hava søkt Mentamálaráðið um undantaksloyvi frá førleikakrøvunum vegna høgan aldur. Ráðið hevur gingið hesum umsóknum á møti.

Landsstýrismaðurin kunnar somuleiðis um, at Vinnuháskúlin hevur váttað, at framvegis eru lærarar, sum ikki hava tikið stig til at lúka førleikakrøvini. Mentamálaráðið hevur givið Vinnuháskúlanum boð um at krevja av teimum lærarum, sum ikki lúka førleikakrøvini, at fáa viðurskiftini í rættlag áðrenn ávísa tíðarfreist.

Ongin kunngerð er enn sett í gildi fyri skipsføraraútbúgvingar. Útbúgvingarráðið, sum landsstýrismaðurin setti sambært § 5 í Ll. nr. 55 frá 24. apríl 2001 “um útbúgving av manning á skipum o.ø.”, gjørdi uppskot til eina kunngerð, men hon er ikki lýst enn.

Í oktober 2012 hevur Landsstýrismaðurin boðað frá, at uppskotið til kunngerðina er liðugt og verður sent til hoyringar í næstum.

Eftirútbúgving

Sambært kunngerðunum um skipara- og maskinmeistaraútbúgvingar kann skúlastjórin skipa fyri fakligari og námsfrøðiligari eftirútbúgving, við atliti at neyðugu dagføringini av førleika læraranna. Vinnuháskúlin heitir á lærararnar um at eftirútbúgva seg. Skúlin hevur ikki pening tøkan til lønir undir útbúgving, men skúlin kann lata lærarunum tímaniðurskurð, 4 tímar um vikuna, umframt at rinda ferðaútreiðslur. Slík avtala varir ongantíð longur enn eitt fíggjarár. Allir lærarar fáa loyvi at fara á skeið, sum verða kravd, fyri at halda vinnubrøv við líka. Lærarar, sum taka útbúgvingar, ið ikki eru kravdar í sambandi við undirvísingina, kunnu fáa frí, men mugu taka tímarnar aftur seinni.

Góðskumeting av sjóvinnuútbúgvingunum

Eftir avtalu við Mentamálaráðið vitjar Søfartsstyrelsen Vinnuháskúlan regluliga. Endamálið við vitjanunum er at meta um, hvørt skúlin

- greiðir sínar útbúgvingar í tráð við endamálið í lógini,
- fylgir reglunum um góðskustýring av maritimu útbúgvingunum, og
- fylgir øðrum reglum um útbúgvingar, herundir reglum um prógvdøming og eftirmeting.

Søfartsstyrelsen vitjaði á Vinnuháskúlanum í 2005, 2007, 2008 og 2010. Bæði Vinnuháskúlin og Mentamálaráðið fingu frágreiðingar eftir vitjanirnar, har greitt varð frá, hvussu støðan var á skúlanum.

Undir seinastu vitjanini í august 2010 gjørdi Søfartsstyrelsen vart við ymisk viðurskifti. M.a. varð víst á, at í 2010 vóru færri enn helvtin av lærarunum, sum høvdu kravdu undirvísingarførleikarnar sambært kunngerðum Mentamálaráðsins. Í frágreiðingini varð eisini víst á, at Mentamálaráðið var kunnað um trupulleikan. Í niðurstøðuni frá vitjanini varð m.a. mælt til, at skúlin

- fær eina innanhýsis dygdarmenningarætlan,

- ger prøvdómaraeftirmetingar,
- fær pening til vega at eftirútbúgva lærarar, og
- leggur undirvísingarætlanir og miðal prøvtøkutøl á heimasíðuna.

Vinnuháskúlin hevur sett dygdarmenningarleiðara, og hann fær tímaniðurskurð fyri at røkja uppgávuna.

Spurdur, hvat skúlin ger fyri at fylgja tilmælinum frá Søfartsstyrelsen, og um skúlin hevur gjørt ætlanir fyri, hvussu og nær góðskuskoðan skal fara fram, hevur stjórin í september 2012 kunnað um, at leiðsla skúlans fer í næstum, saman við Mentamálaráðnum, at viðgera tilmælini frá Søfartsstyrelsen í 2010. Eisini verður farið undir at gera eina ætlan fyri innanhýsis skoðan av dygdarmenningarskipan skúlans.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 gjørt vart við, at tað er Mentamálaráðið, sum hevur ábyrgd av góðskumetingini. Mentamálaráðið hevur eina avtalu við danska sjófartsmyndugleikan, Søfartsstyrelsen, um líkastilling av maritimu útbúgvingunum. Í hesum sambandi hava umboð fyri Søfartsstyrelsen verið við til at góðskumeta maritimu útbúgvingarstovnarnar saman við Mentamálaráðnum. At Søfartsstyrelsen eftirfylgjandi hevur skrivað frágreiðingarnar, hevur bert verið av hentleika ávum, soleiðis at danski myndugleikin hevur møguleika fyri at fylgja við í góðskustýringini hjá stovnunum. Mentamálaráðið hevur í hvørjum føri sær gjørt viðmerkingar og neyðugar tillagingar til endaligu frágreiðingarnar.

Næsta góðskumetingin verður eftir ætlan gjørd fyrst í 2013, har m.a. frávik og tilmæli frá 2010 verða viðgjørd, herundir eisini krøvini til undirvísingarførleikan.

6.4 Musikkskúlaskipanin (LG 2011/207-0235)

Í seinastu frágreiðing okkara til Løgtingsgrannskoðararnar greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðanina av Musikkskúlaskipanini, og hevði nøkur tilmæli. Hóast Landsgrannskoðanin á hvørjum ári síðani 2002 hevur gjørt vart við, at samsvar er ikki millum allar ásetingarnar í lógini og fyrisitingarligu mannagongdirnar, er onki ítøkiliga hent.

Fyrisitingarligur bygnaður

Musikkskúlaleiðarin hevur dagligu, námsfrøðiligu og fakligu ábyrgdina av virksemi musikkskúlanna.

Sambært Ll. nr. 69/1984 “um stuðul til musikkskúlar” hevur landsstýrismaðurin sett eina 7-manna nevnd við umboðum fyri musikkskúlarnar og landsstýrismannin, at vera musikkskúlaleiðaranum til hjálpar, og at samskipa musikkundirvísingina.

Í Musikkskúlaskipanini eru 11 musikkskúlar. 65 lærarar eru knýttir at skipanini, svarandi til 50 fulltíðarstørv. Landsstýrismaðurin setur lærarar eftir tilmæli frá avvarðandi kommunu, kommunufelagsskapi ella nevndini fyri musikkskúlan.

Lógargrundarlag

Endamál, virksemi og uppgávur hjá Musikkskúlaskipanini eru orðaðar og lýstar í lógini “um stuðul til musikkskúlar”.

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum víst á, at ósamsvar er millum § 1 í lógini, har ásett er, at landskassin letur studning, og § 5 í lógini, har tað er ásett, at landsstýrismaðurin setur lærararnar. Lógin verður heldur ikki umsitin, sum var talan um studning úr landskassanum. Landskassin rindar allar lønarútreiðslurnar, og kommunurnar endurrinda landskassanum 50% av lønarútreiðslunum til lærarar í mun til, hvussu nógvar tillutaðar tímar musikkskúlarnir í kommununum hava fingið.

Í apríl 2009 tók landsstýrismaðurin stig til at broyta lógina, so fult samsvar fór at verða ímillum lógina og siðvenjuna, men kommunurnar tóku ikki undir við at broyta lógina. Sambært landsstýrismanninum er talan um eina gamla skipan, hvørs umsiting avvarðandi partar eru nøgdir við, og talan er um eitt frávik / ”ósamsvar”, sum avvarðandi partar kenna og virka undir.

Í juli 2012 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann hevur eina dagføring av Musikkskúlaskipanini við á løglistanum í komandi tingsetu.

Mál- og avrikssáttmála

Stovnurin hevur ongan mál- og avrikssáttmála. Í juli 2012 hevur landsstýrismaðurin víst á, at talan er um eina skipan, har kommunurnar og landið rinda hvør sína helvt. Tí ivast landsstýrismaðurin í, um tað er rætt, at Mentamálaráðið ger mál- og avrikssáttmála á hesum øki.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd síðani desember 2004. Í juli 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað verður gjørt.

Næmingagjald

Næmingarnir rinda ávíst gjald fyri at ganga í skúla. Næmingagjaldið verður goldið kommununi, har skúlin er. Gjaldið er ymiskt, alt eftir hvar næmingurin býr, og kostnaðurin er settur eftir viðurskiftunum í økinum.

Sambært lógini um Musikkskúlar skal landsstýrismaðurin góðkenna øll næmingagjøld. Í løtuni eru gjøldini millum 500 kr. og 1.600 kr. Musikkskúlaskipanin hevur ikki yvirlit yvir, hvat næmingar rinda, men síðani 1998 hevur stovnurin ansað eftir, at gjøldini ikki verða sett hægri, enn at øll skulu kunna vera við. Seinast gjaldið varð hækkað, hækkaði Tórshavnar kommuna næmingagjaldið 20%. Mentamálaráðið góðkendi hækkanina.

Í juli 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í praksis er tað musikkskúlaleiðarin, sum vegna landsstýrismannin góðkennir og ansar eftir næmingagjøldunum.

Lønarviðurskifti o.a.

Fleiri lærarar lúka ikki ásetingini í Ll. nr. 69/1984, § 5, um, at lærarar skulu hava musikkpedagogiskt prógv frá musikkkonservatorium ella aðra hægri musikkútbúgving.

Sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Musikkskúlalærarafelag Føroya fáa lærarar, sum ikki hava kravdu útbúgvingina, 80% av byrjanarlønini, og kunnu søkja Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um, at verða løntir sum musikklærarar.

Landsgrannskoðanin ivast í, um samsvar er millum ásetingarnar í lógini og sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Musikklærarafelag Føroya um lærarar, sum ikki lúka treytirnar um musikkútbúgving.

Í juli 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at talan er um frávik, sum frá fyrstan tíð hava verið alneyðug fyri at fáa Musikkskúlaskipanina at virka. Eftir sum hesi viðurskifti eru tillagað í lønarsáttmála millum avvarðandi partar, er talan um eina siðvenju, sum allir partar kenna og hava gjørt avtalu um.

Landsstýrismaðurin ásannar, at tað rætta hevði verið, at eitt ískoyti var í lógini, sum heimilaði at gera frávik frá høvuðsregluni í § 5, stk. 1, eins og vanligt er í aðrari undirvísingarlóggávu. Landsstýrismaðurin hevur hesa áseting í huga, nú ein dagføring av Musikkskúlaskipanini er við á løglistanum fyri komandi tingsetu.

6.5 Studni (LG 2011/207-0237)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað umsitingina av útbúgvingarstuðli. Vit kunnaðu okkum um mannagongdir og eftirlit í sambandi við útgjøld av studningi og lánum og innkrevjing av lánum. Niðan fyri verður tikið samanum úrslitið av grannskoðanini.

Studningur og lán verða latin við heimild í Ll. nr. 36/2007 “um lestrarstuðul” v.s.b. Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 107 frá 25. august 2011 “um lestrarstuðul”.

Árini 2007-2011 eru samlaðu útreiðslurnar í landsroknskapinum til stuðul hækkaðar 30 mió.kr., úr 76 mió.kr. í 106 mió.kr. Sama tíðarskeið eru útreiðslurnar av at veita lán hækkaðar 6,2 mió.kr., úr 7,6 mió.kr. í 13,8 mió.kr. meðan afturgjøldini av lánum eru lækkað 869 t.kr.

Beinleiðis inngjøldini til Studna hava verið støðug, meðan skiftandi hevur verið, hvussu nógv er komið inn umvegis innkrevjingina hjá TAKS. Orsøkirnar kunnu vera fleiri, m.a. konjuktururin í samfelagnum, og at krøvini hava verið raðfest aftarlaga.

t.kr.

Inngjøld	2007	2008	2009	2010	2011
Studni	7.928	7.614	7.683	7.601	7.666
TAKS	1.525	657	1.220	1.587	918
Í alt	**9.453**	**8.271**	**8.903**	**9.188**	**8.584**

Roknskaparreglugerð

Studni hevur tvær dagførdar og góðkendar roknskaparreglugerðir. Eina fyri stovnsraksturin og eina fyri útgjald av studningi, útgjald av lánum og umsiting av lánum.

Útgjøld av studningi og lánum

Landsgrannskoðanin kannaði, við støði í saldulistum og útgjaldskoyringum, um umsóknarbløð og neyðugt skjalatilfar var í málunum, og samanbar útgjalds- og lánsupphæddir við ásetingar í kunngerðum og vegleiðingarskrivum. Onki var at finnast at.

Studningur og lán

Landsgrannskoðanin sendi saldufrásagnir til 26 persónar, sum høvdu fingið studning, har summi eisini høvdu fingið játtað lán. 23 svaraðu og váttaðu, at tey høvdu fingið skrásetta studningin og lánið. Samanumtikið var onki at finnast at.

Lán/eftirstøður

Landsgrannskoðanin sendi 15 persónum, sum høvdu eftirstøður, saldufrásagnir. Vit fingu 4 svar við váttan um, at skuldin var røtt. Út frá so fáum aftursvarum ber ikki til at staðfesta um øll skrásett skuld er røtt. Vit gjørdu tí nakrar kanningar av lániskjølum í goymsluni hjá Studna. Samanumtikið sær út til at eftirstøðurnar eru rættar.

Innheintan av eftirstøðum

Í juli 2012 var samlaða útlánsupphæddin 71,8 mió.kr. Av hesari upphædd vóru 40,7 mió.kr. undir afturgjaldi, meðan 31,1 mió.kr. ikki vóru falnar til gjaldingar.

t.kr.

Lánsaldur	Salda	Undir afturgjaldi	Millum-skeið	Undir-lestri
Juli 2012	71.792	40.709	13.439	17.644
5 ár og eldri	37.039	27.367	3.923	5.749
10 ár og eldri	19.299	15.905	1.434	1.960
15 ár og eldri	10.001	8.942	530	529

Studni sendir tríggjar rykkjarar til teirra, sum eru í eftirstøðu, men sum onki rinda. Eftirsíðan verða krøvini send til innkrevjingar.

Skuldin hjá persónum búsettir í Føroyum verður kravd inn umvegis TAKS, og Studni fær hvønn mánað útgreiningarlista frá TAKS um innkravdar upphæddir. Studni greiddi frá, at TAKS hevur kunnað um, at hevur skuldari aðrar eftirstøður t.d. eftirstøður av skatti, er kravið frá Studna raðfest aftarlaga, og long tíð kann ganga, áðrenn eftirstøðan kemur inn.

Spurd, hevur innkrevjingardeildin hjá TAKS kunnað um, at ongar lógarásettar mannagongdir eru um raðfylgjuna av, hvørji krøv verða góðskrivað, tá ið TAKS krevur inn. Í norðurlendsku hjálparavtaluni eru møguleikar hjá londum at krevja inn skuld hjá hvørjum øðrum, men krøvini hjá Studna eru ikki fevnd av hesari avtalu.

Skuld hjá persónum, búsettir uttanlands, verður send innheintingarfyritøku at krevja inn. Studni fær regluliga inngjøld fyri kravdar upphæddir, og tær verða inntøkuførdar á hvønn skuldara sær. Studni kannar ikki, um upphæddirnar samsvara við inngoldnu upphæddina frá skuldaranum, og skuldarar fáa onki kontuavrit í innheintingartíðini. Skuldararnir hava tí ongan møguleika at fylgja við, um inngjøldini verða rætt skrásett.

Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 kunnað um, at skuldarar fáa ikki kontuavrit. Í januar mánaði fáa allir skuldarar eitt ársyvirlit, sum vísir salduna á lánunum, hvat er inngoldið í árinum, tilskrivaða rentu í árinum, og væntaðu rentutilskrivingina komandi árið.

Studni stemmar ikki regluliga av millum saldurnar hjá innheintingarfyritøkuni og egið bókhald. Tá samlaða kravið er afturgoldið, ger Studni endaliga upp út frá

sínum bókhaldi. Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at Studni ikki regluliga stemmar av millum kravda skuld og móttikin inngjøld.

Landsstýrismaðurin vísir á, at krøv, sum eru send til innheintingar, verða regluliga kannað, og Studni hevur regluligt samskifti við innheintingarfyritøkuna um innheintingarnar, ið eru latnar teimum. Áðrenn krøv verða latin til innheintingarfyritøkuna, verða tey kannað fyri møguliga fyrning. Er partur av einum kravi fyrnaður, verður tann parturin tikin burturúr. Mannagondin hjá Studna er, at fyrningar verða ikki bókaðar, fyrr enn krøvini eru goldin. Tá verða goldnu upphæddirnar samanhildnar við tey inngjøld, sum eru komin frá innheintingarfyritøkuni. Síðani verða lánini gjørd upp, og kvittað skuldarbrøv verða send lántakarunum.

Landsgrannskoðanin hevur biðið Studna um samlað yvirlit yvir skuldarar, sum eru sendir til innheintingar. Sambært yvirlitinum úr skipanini hjá innheintingarfyritøkuni er samlaða skuldin, sum fyritøkan síðani 2006 hevur sent til innheintingar, 5,1 mió.kr. Av teimum eru 1,4 mió.kr. goldnar, meðan krøv fyri 900 t.kr. eru afturkallað, og 100 t.kr. eru lagdar í skuldareftirlit. Skuldareftirlit merkir, at innheintingarfyritøkan við longri millumbilum rykkir skuldarar eftir eftirstøðuni. Av upphæddunum, sum skuldarar tá rinda, fær Studni helvtina og innheintingarfyritøkan hina helvtina.

Studni greiddi frá, at treytað av góðkenning, hevur stovnurin gjørt ískoytisavtalu við innheintingarfyritøkuna, sum m.a. gevur innheintingarfyritøkuni loyvi til at leggja krøv í skuldaraeftirlit. Studni bað í mai 2008 Mentamálaráðið um hesa góðkenning. Mentamálaráðið sendi fyrispurningin víðari til Fíggjarmálaráðið. Hóast fleiri áheitanir, er onki svar komið.

Spurdur, hvørja heimild Studni hevur at gera slíka avtalu, hevur landsstýrismaðurin í oktober 2012 kunnað um, vísandi til samskifti millum Studna, Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið, at Mentamálaráðið hevur onga viðmerking til innkrevjingarháttin.

Fyrningarfreistir

Fyrningarfreistin fyri lánskrøv er 20 ár, meðan fyrningarfreistin fyri tilskrivaðar rentur er 5 ár. Studni syrgir fyri at “halda lív í” krøvunum, so tey ikki falla fyri fyrningarfreistunum. Í málum, har onki verður goldið, og renturnar verða eldri enn fimm ár, avskrivar Studni fyrnaðar rentur. Tað verður ikki gjørt regluliga, men verður altíð gjørt, tá ið lán endaliga verða gjørd upp.

Landsstýrismaðurin hevur onga viðmerking til mannagongdina, um ikki at avskriva fyrnaðar rentur, fyrr enn lán endaliga verða gjørd upp.

7 Heilsumál

7.1 Heilsumálaráðið (LG 2011/211-0111)

Í 2012 hava vit grannskoðað fyrisitingina í Heilsumálaráðnum. Endamálið við grannskoðanini var m.a. at kanna mannagongdir og innaneftirlit.

Sambært viðmerkingunum í Løgtingsfíggjarlógini hevur Heilsumálaráðið yvirskipað fyrisitingarligt og fíggjarligt eftirlit við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum, og hevur yvirskipaðu ráðleggingina av øllum málsøkjum undir Heilsumálaráðnum.

Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið halda til í sama bygningi, og hava nakrar felags eindir, so sum starvsfólkamál, tænastu og KT. 1. juni 2011 varð bygnaðurin broyttur, so at tað nú eru tvær deildir í Heilsumálaráðnum við hvør sínum deildarstjóra.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Heilsumálaráðið hevur gjørt mál- og avrikssáttmálar við 11 stovnar undir ráðnum. Í 2011 høvdu tey tríggjar sáttmálar. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at ráðið fer at taka málið um at gera mál- og avrikssáttmála fyri sjálvt ráðið upp aftur, tá ið aðalstjóri er settur í ráðnum.

Váðameting og KT-trygd

Í 2006 gjørdi góðkendur grannskoðari váðameting fyri táverandi Almanna- og Heilsumálaráðið. Í 2011 var ætlanin at gera váðameting fyri Heilsumálaráðið. Tað bleiv av ongum tá. Í apríl 2012 hevur leiðslan boðað frá, at Heilsumálaráðið hevur tikið viðmerkingina hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar, og fer at gera eina váðameting.

Leiðslan greiddi frá, at Heilsumálaráðið fylgir reglunum hjá KT-fyrisitingini um trygdarpolitikk. Starvsfólk hava samband við arbeiðsplássið heimaníframá um VPN. Tey fáa eina mánaðarliga samsýning, sum endurgjald til breiðband. Heilsumálaráðið hevur boðað frá, at ráðið fer at seta vegleiðingina hjá Dátueftirlitinum um heimaarbeiðspláss í gildi.

Journal

Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið brúka somu journalskipan (360). Journalirnar eru skildar at við atgongdarstýring til brúkarar.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin hjá Heilsumálaráðnum er ikki dagførd síðani 2008. Landsstýrismaðurin hevur í oktober 2012 kunnað um, at arbeiðið við at dagføra reglugerðina er um at vera liðugt.

Ognaryvirlit

Ognaryvirlitið hjá Heilsumálaráðnum varð seinast dagført í 2004. Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið nú hevur gjørt eitt dagført ognaryvirlit.

Kassi, peningastovnskontur og gjaldkort

Heilsumálaráðið hevur ongan kassa við kontantum peningi. Ráðið hevur tvær peningastovnskontur. Landsgrannskoðanin kannaði, um konturnar vóru stemmaðar av 31. desember 2011, og kannaði við stakroyndum nøkur útgjøld. Vit høvdu onki at finnast at.

Heilsumálaráðið hevur eitt gjaldkort, sum eitt starvsfólk í ráðnum stendur fyri. Í juni 2012 fekk Landsgrannskoðanin avrit av heimildarváttanini til starvsfólkið. Sambært landsstýrismanninum fara reglurnar um gjaldkort at verða settar í roknskaparreglugerðina.

Inntøkur

Heilsumálaráðið hevur inntøkur av húsaleigu frá einari KT-fyritøkuni. Leigusáttmálin var frá 1. oktober 2011 og skuldi galda í eitt hálvt ár. Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at leigusáttmálin er longdur.

Keyp

Heilsumálaráðið biður um tilboð frá fleiri veitarum, tá um størri keyp ræður.

Ferðaútreiðslur og umboðan

Landsgrannskoðanin gjørdi nakrar stakroyndir av skjølum. Endurrindan fyri dagpening, hotel o.a. er sambært reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum. Ráðið hevur ikki viðmerkt á rokningar frá matstovum o.ø., í hvørjum sambandi útreiðslur eru hildnar. Eftirsíðan hevur leiðslan givið starvsfólkunum boð um, at í framtíðini skal tað verða gjørt.

Starvsfólkarøkt

Heilsumálaráðið hevur reglur um nøkur starvsfólkatiltøk á hvørjum ári, sum ráðið rindar fyri. Starvsfólkini rinda sjálvi ein part av útreiðslunum til hesi tiltøk. Leiðslan heldur tað vera við til at betra um trivnaðin á arbeiðsplássinum og tí eisini ein neyðug útreiðsla. Í starvsfólkahandbókini eru reglur um starvsfólkarøkt. Útreiðslurnar verða bókaðar sum “umboðan”, av tí at ongin konta finst til starvsfólkarøkt.

Onnur umboðan

Stakroyndir vístu, at ráðið hevur goldið nakrar samsýningar sum “onnur umboðan”, har talan er um løn. Leiðslan hevur boðað frá, at hon tekur viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar, og fer at ansa eftir, at tílík gjøld verða goldin sum løn.

Telefon

Heilsumálaráðið er ikki við í felags avtaluni hjá Fíggjarmálaráðnum um samskiftistænastur til aðalráðini. Leiðslan kunnaði um, at tað var tí, at tann skipanin hevði verið dýrari fyri ráðið. Starvsfólkini nýta fartelefonir í arbeiði sínum. Nøkur hava fartelefonina við til hús, onnur ikki. Leiðandi starvsfólk hava skyldu at hava telefonina við sær heim.

Ráðið hevur reglur um, at fer telefonnýtslan upp um 500 kr. um mánaðin, skulu starvsfólk gera viðmerkingar fyri nýtsluni.

Leiðslan greiddi frá, at grannskoðaravirkið SPEKT í sambandi við grannskoðan av stovnum undir Heilsumálaráðnum hevði gjørt viðmerkingar um at skatta fartelefon, og ráðið vísti í tí sambandi á teirra vegleiðing.

Landsgrannskoðanin heldur tað áliggja arbeiðsgevaranum, í hesum føri Heilsumálaráðnum, at geva TAKS upplýsingar um lønir o.a. sambært § 118 í skattalógini. Landsgrannskoðanin mælti tí til, at Heilsumálaráðið setur seg í samband við TAKS viðvíkjandi møguligari skyldu at kunna um fría fartelefon.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið hevur spurt Fíggjarmálaráðið um skylduna at boða frá um fría telefon. Tey vendu sær til Fíggjarmálaráðið, og ikki til TAKS, av tí at TAKS er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, ið Heilsumálaráðið samskiftir nógv við. Fíggjarmálaráðið hevur boðað Heilsumálaráðnum frá, at tey fara at viðgera málið generelt.

Lønir

Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2011 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá trimum tilvildarliga valdum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskrivini, prógvini o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

Verkætlanir, stovnsnummar 149180

Sambært fíggjarlógini 2011 eru 450 t.kr. játtaðar á undirkontu 27 til at lýsa, hvørji serlæknaøki natúrliga eru partar av føroyska heilsuverkinum, og hvørjar tænastur heilsuverkið eigur at keypa uttanlands. Eisini skal støða takast til, hvørji serlæknaøki skulu vera á teimum trimum sjúkrahúsunum, og hvussu tey skulu vera skipað. Umframt tað, skal gongd setast á arbeiðið at fyrireika sjúkrahúsini til eina góðskutryggingarskipan, sum m.a. skal hava við sær, at veitingar á føroysku sjúkrahúsunum skulu kunna samanberast við veitingar á sjúkrahúsum uttanlands.

Í 2011 vórðu 71,6 t.kr. brúktar av játtanini. Heilsumálaráðið kunnaði um, at gongd kom ikki á málið fyrr enn so seint í 2011, at tey náddu ikki tað, tey ætlaðu. Í fíggjarlógini 2012 er peningur aftur settur í Fíggjarlógina til endamálið.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard (ISSAI 1240) spurdi Landsgrannskoðanin, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki.

Eisini spurdi Landsgrannskoðanin leiðsluna, um hon hevði kunnleika um svik, illgruna um svik ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

Leiðslan svaraði, at hon hevði ikki kunnleika ella illgruna um svik, heldur ikki hevur hon hoyrt skuldsetingar um svik. Tey hava tikið spurningin upp beinleiðis við starvsfólkini.

7.2 KT-øki heilsuverksins (LG 2011/211-0111)

Landsgrannskoðanin vísti í seinastu ársfrágreiðing á ávís viðurskifti hjá KT-øki heilsuverksins. Samanumtikið helt Landsgrannskoðanin umsitingina vera trygga. Vit høvdu tó nakrar viðmerkingar og nøkur tilmæli, sum enn ikki eru komin upp á pláss.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglugerðin hjá Heilsumálaráðnum er galdandi fyri stovnin. Reglugerðin er frá 2008, og fevnir um táverandi Almanna- og Heilsumálaráðið. Tá ið

Almanna- og Heilsumálaráðið varð skilt sundur í september 2008, varð ikki gjørd nýggj reglugerð. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at dagføra roknskapar-reglugerðina.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið er í holt við at dagføra felags roknskaparreglugerðina, sum KT-øki Heilsuverkins er partur av, men komið er ikki á mál.

Ognaryvirlit

Stovnurin hevur onki ognaryvirlit. Onki yvirlit varð gjørt, tá ið Almanna- og Heilsumálaráðið varð skilt sundur í september 2008. Sambært roknskaparreglugerðini frá 2007 *"skrásetur Tænastueindin innbúgv v.m. Tá ið talan er um edv-útbúnað, er yvirlit gjørt í 2002 av uttanhýsis veitara. KT-eindin hevur ábyrgd av at viðlíkahalda hetta yvirlitið. Aðalstjórin hevur ábyrgd av einum fullfíggjaðum yvirliti yvir allan útbúnað í ráðnum."*

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið hevur eitt rokniark við yvirliti yvir ognirnar í B75[17], sum KT-øki heilsuverksins eisini er fevnt av. Landsnet umsitur yvirlitið yvir teldur.

7.3 Profylaksir (LG 2011/211-0201)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað útreiðslur til Profylaksir[18]. Landsgrannskoðanin heldur, at tað er als ikki er nøktandi, at hóast meira enn 10 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð reisti spurningin um vantandi heilsukanningar av skúlabørnum, er støðan versnað.

Lógargrundarlag

Koppsetingar

Lógargrundarlagið undir koppsetingum er Ll. nr. 118 frá 12. desember 2007 "um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum", og kunngerð nr. 7 frá 6. februar 2009 v.s.b., "um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum".

Upplýsing um gitnaðarfyribyrging

Lógargrundarlagið undir gitnaðarfyribyrging er "Anordning nr. 643 frá 9. desember 1982 om ikrafttræden på Færøerne af lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp", sum seinast broytt við A. nr. 398 frá 20. apríl 2010, og kunngerð nr. 96 frá 26. november 1987 "um leiðbeinandi reglur fyri upplýsing um gitnaðarverju".

Sambært K. nr. 96/1987 er "Vejledende retningslinier for oplysningsvirksomhed om svangerskabsforebyggende metoder" frá 8. september 1986 frá "Indenrigsministeriet" galdandi í Føroyum.

Heilsukanningar av barnakonum

Lógargrundarlagið fyri at heilsukanna barnakonur er "Anordning nr. 643 fra 9. desember 1982 om ikrafttræden på Færøerne af lov om svangerskabshygiejne og fødselshjælp" sum seinast broytt við A. nr. 398 frá 20. apríl 2010.

[17] Bygningurin, har Heilsumálaráðið húsast
[18] Heilsuvísindarligt heiti á fyribyrgjandi tiltøkum

Læknakanningar av børnum
Lógargrundarlagið at læknakanna børn er Ll. nr. 63 frá 17. mai 2005 "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung", og kunngerð nr. 88 frá 24. september 2007 "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung".

Mannagongdir
Kommunulæknarnir senda Heilsumálaráðnum uppgerðir og øll undirliggjandi skjøl, við undirskrift frá sjúklingunum, fyri hvørja sjúkravitjan. Læknarnir tøppa allar upplýsingarnar inn í talgildu heilsuskipanina THS. Eitt starvsfólk í Heilsumálaráðnum gjøgnumgongur skjølini og hyggur eftir, um takstirnir í skipanini samsvara við tað, sjúklingarnir hava skrivað undir.

Útgjald ikki um A-skattaskipanina
Samsýningar fyri profylaksir fara ikki um A-skattaskipanina, men verða fluttar sum bankaflytingar, tá ið "mál" eru avgreidd og eftirroknað. Soleiðis verða samsýningarnar ein B-inntøka hjá læknunum.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at sambært § 60, stk. 1, nr. 1, í skattalógini eru samsýningar at rokna sum A-inntøka, og sambært § 63, stk. 1, skal A-skattur avroknast í upphæddini, áðrenn A-inntøka verður goldin skattgjaldara.

Heilsumálaráðið hevur umrøtt spurningin við TAKS, sum eisini heldur, at sambært § 60, stk. 1, nr. 1, í skattalógini eru samsýningar at rokna sum A-inntøka.

Heilsumálaráðið vísir á:
- at kommunulæknar kunnu ikki (sambært dómi) skipa teirra virksemi í partafelag ella smápartafelag, og
- at kommunulæknar løna teirra viðtalustarvsfólkum, t.d. heilsurøktarfrøðingi og læknaskrivara.

Heilsumálaráðið heldur, at siðvenjan at gjalda eftir rokning eigur ikki at verða broytt nú.

Takstir
Samsýningar fyri viðgerðir fylgja takstunum hjá PLO[19]. Heilsumálaráðið fær takstirnar frá felagsskapinum, og teir eru eisini at finna á heimasíðuni hjá teimum. Takstirnir hækka hálvárliga.

Sambært Ll. nr. 28 frá 23. apríl 1999 v.s.b. "um kommunulæknaskipan" rindar landskassin hvønn mánað eina grundupphædd til kommunulæknar og til frítíðar- og langtíðaravloysarar. Løgtingslógin hevur ongar ásetingar um profylaksir ella um, nær takstirnir skuldu verið javnaðir.

Heilsumálaráðið hevur greitt frá, at ráðið í 1997 gjørdi av, at takstirnir fyri profylaktisku veitingarnar skuldu vera teir somu, sum í Danmark. Kommunulæknafelagið varð kunnað um hesa avgerð í 2001.

Sambært landsstýrismanninum ber landið sambært siðvenju útreiðslurnar av profylaksum. Í løgtingsfíggjarlógini er fýra lógarbundnar játtanir til endamálið.

Landsgrannskoðanin heldur, at ásetingar um profylaksir, og um hvussu takstirnir verða javnaðir, áttu at verið ásettar í løgtingslógini um kommunulæknaskipanina.

[19] Praktiserende Lægers Organisation

Fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 greiddu vit frá, at bert ein triðingur av næmingunum koma undir lógarásettu skúlalæknaskipanina av ósemju við Kommunulæknafelagið. Í august 2001 segði landsstýrismaðurin, at ætlanin var at samráðast við Kommunulækngafelagið, tá ið ein nýggj lóg var samtykt.

17. mai 2005 kom løgtingslóg nr. 63 "um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung" í gildi. Sambært § 2, stk. 3, skulu børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri fáa tilboð um tvær heilsukanningar. Fyrra kanningin skal verða bjóðað barninum, tá ið skúlatíðin hjá barninum byrjar. Seinna kanningin skal verða bjóðað barninum stutt fyri, at undirvísingarskyldan endar.

Sambært Heilsumálaráðnum eru heilsukanningarnar av skúlabørnum við skúla-byrjan og skúlaenda ikki komnar í rættlag, tí ósemja er um:

- hvør skal gera kanningarnar,
- tey skulu hava frálæru í at gera kanningarnar,
- hvør skal geva frálæruna, og
- hvussu kanningarnar skulu verða gjørdar.

Í 2011 vóru einans 64 børn í 1. flokki og 26 børn í 9. flokki kannað av skúlalækna. Sambært Hagstovu Føroya[20] vóru 734 næmingar í 1. flokki og 758 næmingar í 9. flokki skúlaárið 2011/12. Sostatt vórðu bert um 8,7% av næmingunum í 1. flokki, og um 3,4% av næmingunum í 9. flokki heilsukannað í skúlaárinum 2011.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er als ikki er nøktandi, at hóast meira enn 10 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð reisti spurningin um vantandi heilsukanningar av skúlabørnum, er støðan munandi versnað.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at skipanin við tilboðum um heilsukanningar hjá heilsufrøðingum, og heilsukanningar hjá børnum undir skúla-aldur hjá kommunulæknum, hevur stórt sæð virkað væl. Hinvegin hava sera fá børn og ung í undirvísingarskyldugum aldri tikið av tilboðnum um heilsukanningar hjá kommunulækna. Tað hevur havt við sær, at hesin parturin av skipanini hevur ikki virkað væl.

Við støði í hesum veruleika hevur landsstýrismaðurin gjørt av at fara undir at broyta galdandi skipan. Broytingin hevur við sær at umframt kommunulæknar, fara eisini heilsufrøðingar at fáa heimild at gera heilsukanningar við skúlabyrjan og skúlalok. Henda broyting fer væntandi at hava við sær, at fleiri børn og ung fara at taka av tilboðnum um heilsukanningar við skúlabyrjan og skúlalok. Broytta skipanin skal eftir ætlan koma í gildi 1. august 2013.

Úrslit av stakroyndum

Landsgrannskoðanin kannaði 16 uppgerðir (skjøl sum læknar hava sent inn) og samsvarandi uppgerðir hjá Heilsumálaráðnum. 10 teirra vóru uttan feilir, t.v.s. takstirnir vóru rættir, og samsvaraðu við uppgerðina hjá Heilsumálaráðnum.

Til hinar 6 stakroyndirnar hevur Landsgrannskoðanin hesar viðmerkingar:

[20] www.hagstova.fo

- Í einum føri fann Landsgrannskoðanin ikki uppgerðirnar frá læknanum. Tær vóru lagdar til viks, tí at tær ikki stemmaðu. T.v.s. at læknin hevði ikki fingið peningin.
- Í einum føri vóru læknaviðtalurnar gjørdar í januar - mars 2011, og læknin hevði skrivað takstir, sum vóru galdandi tá. Onkur hevði rættað takstirnar til takstir, sum vóru galdandi frá apríl 2011. Tískil hevði læknin fingið endurgjald eftir skeivum takstum.
- Í summum førum stemmaðu veitingarnummar og tal á veitingum ikki.
- Í summum førum hevði sjúklingurin ikki skrivað undir skjalið hjá læknanum, og tí vantaði váttan um, at viðkomandi hevði fingið viðgerð.

Vit eru komin fram á, at nakrar uppgerðir eru rættar frá læknunum, veitingarnar stemma við uppgerðirnar hjá Heilsumálaráðnum, men allir takstir eru rættaðir/yvirskrivaðir til nýggjar takstir, t.v.s. at læknin hevur fingið ov høga viðbót. Sambært Heilsumálaráðnum er tað ein feilur, og eigur ikki at koma fyri.

Ongar skrivligar mannagondir eru. Vit mæltu til at gera skrivligar mannagongdir. Eftirsíðan hevur Heilsumálaráðið boðað frá, at tey fara at gera skrivligar mannagongdir.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at skrivligar mannagongdir eru ikki gjørdar. Profylaktisku kanningarnar verða skrásettar í talgildu heilsuskipanini THS og í Heilsukanningarskipanini. Arbeitt verður við einari ætlan, ið skal skipa økið.

7.4 Fæið í føroysku sjúkrakassunum (LG 2011/211-0202)

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2010 umrøddu vit m.a., at eginognin 31. desember 2009 hjá sjúkrakassunum var um 36 mió.kr.

Í mai 2012 samtykti Løgtingið, at fæið skal verða latið Sjúkrakassagrunni Føroya, sum fyri 1. apríl 2014 skal hava goldið alt fæið út til Granskingargrunnin. Eftir hetta skal Granskingargrunnurin hava ábyrgd av umsitingini av fænum samsvarandi leiðreglunum, ið Sjúkrakassagrunnur Føroya hevur ásett.

Í § 30, stk. 7, í Ll. nr. 178 frá 22. desember 2009 “um almenna heilsutrygd” er ásett, at uppskot til løgtingslóg um fæið í føroysku sjúkrakassunum verður lagt fyri Løgtingið seinni í “hesari tingsetuni[21]”. Onki lógaruppskot bleiv lagt fyri Løgtingið.

Í oktober 2010 kunnaði landsstýrismaðurin um, at av tí at samráðingar vóru við Meginfelag Sjúkrakassa Føroya um fæið, varð lógaruppskot ikki enn lagt fyri Løgtingið, men fór væntandi at verða lagt fyri Løgtingið seinni í “hesari tingsetuni[22]”. Onki lógaruppskot bleiv lagt fyri Løgtingið.

Í august 2011 kunnaði landsstýrismaðurin um, at samráðingarnar við Meginfelag Sjúkrakassa Føroya høvdu tikið munandi longri tíð enn væntað. Tað hevði tikið sera drúgva tíð at fáa allar sjúkrakassarnar hvør sær at góðkenna samráðingarúrslitið.

[21] T.v.s. í tingsetuni 2009/10
[22] T.v.s. í tingsetuni 2010/11

Í februar 2012 legði landsstýrismaðurin uppskot fyri Løgtingið - Lm. nr. 129/2011: "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (sjúkrakassafæið)."

Sambært uppskotinum verður fæið[23], sum er eftir í føroysku sjúkrakassunum, tá ið øll viðurskifti sjúkrakassanna eru avgreidd, latið sum stovnsfæ í Sjúkrakassagrunn Føroya. Endamál grunsins er at veita stuðul til átøk og verkætlanir, sum kunnu menna heilsuøkið í Føroyum, men sum ikki eru partur av rakstrinum av heilsuverkinum annars.

Við 3. viðgerð varð soleiðis orðað broytingaruppskot samtykt:

> *"Grunnurin skal innan 1. apríl 2014 hava gjørt skrivligar leiðreglur fyri, hvat fæið skal latast sum stuðul til, og skal hava útgoldið alt fæið til Granskingargrunnin, ið hereftir hevur ábyrgd av umsitingini av fænum samsvarandi leiðreglunum, ið Sjúkrakassagrunnur Føroya hevur ásett."*

Sostatt virkar Sjúkrakassagrunnur Føroya bert til 31. mars 2014, tá ið fæið verður latið Granskingargrunninum.

[23] Væntandi um 30 mió.kr.

8 Almannamál

8.1 Almannastovan (LG 2011/212-0211)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin m.a. frá um grannskoðanina av rakstrinum á Almannastovuni, at Landsgrannskoðanin helt, at roknskapurin var ikki rættur, tí lønarkrøv vóru ikki skrásett í landsroknskapinum.

Sambært Almannastovuni eru rættingar gjørdar, og avtalur um at rinda aftur skyldugar tímar verða hildnar.

Í seinastu frágreiðing kunnaði Landsgrannskoðanin um, at starvsfólkini á Almannastovuni arbeiða flextíð. Arbeiðstíðin verður skrásett í Totalview. Starvsfólkini skráseta, nær tey koma til arbeiðis, og nær tey fara. Tey skráseta ikki, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Almannastovan hevur havt flextíð síðani 1992. Reglur um arbeiðstíðir eru ásettar í

- "Reglur fyri flexskipan" frá 1992,
- fráboðan "Til øll starvsfólk, viðvíkjandi klokkuskipanini" frá 1993, og
- "Innanhýsis boðum um flexsaldo" frá 1998.

Í reglunum er ásett, at flexsalda skal ikki vera meira enn +/- 20 tímar.

Almannastovan helt ikki reglurnar um +/- 20 tímar í flexsaldu. Dømi var um at fleiri starvsfólk skyldaðu fleiri ferðir loyvdu flexsaldu.

Landsgrannskoðanin helt hesar flexsaldur vera sera óhepnar, og mælti Almannastovuni til at taka spurningin upp við avvarðandi starvsfólk, fyri at fáa viðurskiftini í rættlag sum skjótast.

Sambært roknskaparkunngerðini § 5, stk. 3, skulu stovnsleiðslur skipa fyri, at hóskandi tíðarskrásetingar eru á stovnunum, og at tær tryggja, at lønarútgjaldingar eru rættar. Tíðarskráseting er skjalprógv fyri, at lønarútgjaldingar eru rættar. Tá ið Almannastovan hevði lønarkrøv, sum ikki vóru skrásett í roknskapinum, og rindaði fólki løn, sum skyldaðu arbeiðstíð upp til tveir mánaðir, helt Landsgrannskoðanin, at roknskapurin var ikki rættur.

Í september 2012 hevur Almannastovan (Almannaverkið) boðað frá, at avtalur eru gjørdar við starvsfólkini antin at draga frá í lønini ella at arbeiða tímarnar inn aftur. Í fleiri førum hava saldurnar verið skeivar, og rættingar eru gjørdar. Almannastovan ger vart við, at peningur er ikki mistur, tí starvsfólk er farin úr starvi, og at tær avtalur, ið eru gjørdar, verða hildnar.

8.2 Eldri og brekað (LG 2011/212-0216)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað Økisdepilin fyri sinnisveik, Verkstaðið á Bakka, Sambýlið á Bárðarfløtti og Hamragarð.

Landsgrannskoðanin hevði nøkur tilmæli um roknskaparviðurskiftini. Enn eru nakrir ósvaraðir spurningar, m.a. um persónsupplýsingar.

8.2.1 Økisdepilin fyri sinnisveik

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað umsitingina av Økisdeplinum í Vági. Endamálið við grannskoðanini var at kanna mannagongdir og innaneftirlit.

Økisdepilin er partur av Serforsorgini. Játtanin til stovnin er á høvuðskontu 12.21.6.01, "Serforsorg", undirkonta 29, "Bú- og stuðulstilboð". Í viðmerkingunum í fíggjarlógini verður sagt, at Økisdepilin hevur 8 búpláss og tvey umlættingarpláss.

Økisdepilin hevur ikki sett í verk reglur um mál og avrik. Landsgrannskoðanin mælti til at seta í verk stýringarmeginreglur sambært roknskaparkunngerðini.

Váðameting og KT-trgd

Spurd, um leiðslan hevði gjørt váðameting, kunnaði fíggjarleiðarin um, at KT-trygdin er felagsøki, og KT-deildini hjá Almannaverkinum umsitur hana. Landsgrannskoðanin mælti til, at váðameting verður gjørd.

Persónsupplýsingar

Sambært trygdarkunngerðini, K. nr. 28/2003, hevur dagliga leiðslan ábyrgdina av, at ásetingarnar í kunngerðini verða fylgdar. Eisini skulu eftirmetingar verða gjørdar minst eina ferð um árið.

Í einum skrivi "Mannagongd yvir samstarvsbøkur", sum Landsgrannskoðanin fekk avrit av, verður m.a. sagt, at upplýsingar viðvíkjandi búfólkunum verða skrivaðar í samstarvsbøkurnar. Síðani verður í fleiri punktum nevnt, hvørjar upplýsingar talan er um.

Landsgrannskoðanin hevur ikki kannað "samstarvsbøkurnar", men heldur út frá skrivinum, at her er talan um sera viðkvæmar persónsupplýsingar. Vit spurdu Almannaverkið, um:

- Almannaverkið heldur skrivið vera í samsvari við persónsupplýsingarlógina,
- hesar reglur eru generellar fyri stovnar undir Almannaverkinum,
- øll starvsfólk hava atgongd til bøkurnar,
- tað er nøktandi, at bøkurnar "eiga" at verða stongdar inni,
- hvussu starvsfólk verða kunnað um reglurnar, og
- hvussu leingi upplýsingarnar verða goymdar.

Í oktober 2012 greiddi Almannaverkið frá, at nýggja leiðslan á Almannaverkinum, sum fer at virka frá 15. oktober 2012, fer at taka spurningarnar frá Landsgrannskoðanini til viðgerðar. Landsgrannskoðanin heldur ikki svarið frá Almannaverkinum vera nøktandi. Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar.

Journalisering
Allur innkomandi og útfarandi postur verður sendar umvegis skrivstovuna í Tórshavn, og verður journaliseraður har. Økisdepilin hevur skrivligar innanhýsis mannagongdir fyri, hvussu upplýsingar, sum ikki verða journaliseraðar, skulu viðgerast.

Roknskaparviðurskifti
Økisdepilin nýtir roknskaparreglugerðina, sum er gjørd fyri sambýlir. Reglugerðin er frá 2006, og Almannamálaráðið hevur ongantíð góðkent hana. Landsgrannskoðanin mælti til, at Økisdepilin fær eina dagførda roknskaparreglugerð.

Í oktober 2012 hevur stjórin boðað frá, at Almannaverkið tekur tilmælið frá Landsgrannskoðanini til eftirtektar.

Húsaleiga
Standardleigusáttmáli er gjørdur ímillum Nærverkið og búfólk á Eiðisvegi 26 í Vági. Sambært sáttmálanum rinda búfólkini 4.500 kr. um mánaðin í húsaleigu. Olja og el eru ikki við í gjaldinum.

Spurd, hvussu tey eru komin fram til leiguupphæddina, hevur Almannaverkið svarað, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur ásett leiguna í august 2011.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2012 hevur Økisdepilin í Vági 8 búpláss og tvey pláss til umlætting. Sambært Búskaparskipan Landsins gjalda 6 fólk húsaleigu.

Í oktober 2012 hevur Almannaverkið kunnað um, at í løtuni búgva 6 fólk í Økisdeplinum. Leiðslan arbeiðir við at fáa øll plássini tikin í nýtslu.

Lønir og starvsfólkaviðurskifti
Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2011 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønin hjá einum starvsfólki var rætt. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmála. Vit høvdu onki at finnast at.

8.2.2 Verkstaðið á Bakka
Í 2012 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirlitið á Verkstaðnum á Bakka. Landsgrannskoðanin taldi peningin í forskotskassanum upp. Vit høvdu onki at finnast at.

Verkstaðið hevur eisini ein kassa til kontanta sølu. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at sølan verður skrásett, so til ber at stemma kassan av. Sambært leiðaranum eru tey nú farin at brúka talmerktar kvittanarblokkar til kontantsøluna.

Verkstaðið selur eisini upp á kreditt. Leiðarin hevur greitt frá, at tey nú eru farin at senda fylgiseðilin frá søluni til Almannaverkið, sum sendir rokning til keyparan. Sambært leiðaranum, eru ongir trupulleikar at fáa peningin inn.

Verkstaðið hevur eina bankakontu, sum verður nýtt til inngjøld frá søluni. Kontan verður tømd síðst í mánaðinum til Gjaldstovuna.

Verkstaðið á Bakka hevur dagført ognaryvirlit.

8.2.3 Sambýlið á Bárðarfløtti

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað Sambýlið á Bárðarfløtti í Vági.

Roknskaparreglugerð

Sambýlið hevur eina roknskaparreglugerð frá 2004, sum ikki er dagførd. Almannaverkið hevur í oktober 2012 kunnað um, at ætlanin er at dagføra roknskaparreglugerðirnar, tá ið nýggj leiðsla hevur tikið við á Almannaverkinum.

Forskotskassi, bankakonta og gjaldkort

Vit taldu forskotskassan upp og høvdu onki at finnast at.

Sambýlið hevur eina bankakontu og eitt gjaldkort. Tey høvdu ikki fingið til vega neyðugt loyvi til bankakontuna og gjaldkortið. Almannaverkið hevur í oktober 2012 kunnað um, at forskotskassin og kontan eru gjørd upp og gjaldkortið burturbeint.

Grannskoðaðir roknskapir av felagsrakstri o.a.

Við heimild í forsorgarlógini kann Landsstýrið stovna sambýli og góðkenna, at stovnar verða umskipaðir til sambýli. Búfólkini rinda húsaleigu, sum er fyri vistarhald og til felagsútreiðslur, men búfólkini rinda ikki fyri útreiðslur til starvsfólk, sum veita viðgerð og námsfrøðiligan stuðul. Hesar ásetingar eru útgreinaðar í rundskrivi Almannamálaráðsins “um skipan av sambýlum”, sum fekk gildi 1. januar 2009.

Roknskapirnir hjá búfólkunum verða grannskoðaðir av skrásettum grannskoðara. Sama er við roknskapinum fyri felagsraksturin. Grannskoðarin hevði sum heild onki at finnast at, men hevur mælt til, at stovnurin ger kassauppgerð hvønn mánað. Almannaverkið hevur í oktober 2012 kunnað um, at tilmælið er tikið til eftirtektar.

8.2.4 Hamragarður

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað fyrisitingina á Hamragarði í Vági. Endamálið við grannskoðanini var at kanna innanhýsis mannagongdir og innaneftirlit hjá stovninum.

Endamál, virksemi og uppgávur

Leiðslan á Hamragarði hevur ikki sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit, sum ásett er í K. nr. 22/2007. Í oktober 2012 hevur Almannaverkið kunnað um, at tey fara at taka málið um mál- og avrikssáttmála á røktarheimum upp í næstum.

Heimið hevur virkað síðani 1. juni 2011. Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur 18. august 2011 góðkent reglugerð fyri heimið. Sambært reglugerðini er heimið ætlað 24 búfólkum, harav seks pláss kunnu verða nýtt til umlætting. Búfólk á heiminum eru borgarar í Hovs-, Porkeris-, Vágs- og Sumbiar kommunum.

Nú eitt ár er liðið, síðani heimið var liðugt, hevur eitt árs eftirlit verið av bygninginum. Tað hevur víst seg, at hitaskipanin hevur ikki virkað nóg væl. Eisini vóru nakrir rútar brostnir og skiftir út, men tann trupulleikin er ikki endaliga loystur, og rútar bresta framvegis. Økisleiðarin hevur gjørt Landsverk varugt við trupulleikarnar.

Landsgrannskoðanin heldur, at manglar, ið verða staðfestir við eitt árs eftirlit, eiga at verða bøttir alt fyri eitt. Vit hava biðið landsstýrismannin í almannamálum um viðmerkingar.

Persónsupplýsingar

Persónsupplýsingar verða goymdar í tveimum arkivskápum á forskrivstovuni hjá leiðaranum. Í skjalagoymsluni eru eisini viðkvæmar persónsupplýsingar.

Vísandi til Ll. nr. 73 frá 8. mai 2001 "Um viðgerð av persónsupplýsingum v.s.b." og K. nr. 28/2003 "um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum" mælti Landsgrannskoðanin til, at arkivskápini verða læst, at lyklarnir verða goymdir á tryggum stað, og at reglur verða gjørdar fyri, hvør hevur atgongd til upplýsingarnar.

Roknskaparviðurskifti

Heimið hevur ikki sjálvstøðuga roknskaparreglugerð. Heimatænastan hevur eina felags reglugerð frá mars 2006, sum er fyri alla Heimatænastuna. Almannamálaráðið hevur ikki góðkent roknskaparreglugerðina. Landsgrannskoðanin mælti til, at roknskaparreglugerðin verður dagførd.

Í oktober 2012 hevur Almannaverkið greitt frá, at tey høvdu sent dagførda roknskaparreglugerð til Almannamálaráðið, men hon varð ikki góðkend. Nógvu broytingarnar í verkgongdum og bygnaði gera, at nú er aftur neyðugt at endurskoða roknskaparreglugerðina. Tað arbeiðið fer væntandi í gongd í heyst.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at so nógv ár ganga uttan at Heimatænastan fær eina dagførda roknskaparreglugerð. Vit hava biðið landsstýrismannin í almannamálum um viðmerkingar.

Inntøkur

Hamragarður selur døgurðar til pensjónistar í økinum. Inntøkurnar verða faktureraðar um Búskaparskipan landsins.

Heimið hevur ongan kassa við kontantum peningi og heldur onga peningastovnskontu.

Keyp av tænastuveitingum annars

Stovnurin hevur brúkt 120 t.kr. til skeiðsútreiðslur, har øll starvsfólkini hava verið á skeiði hjá Alzheimerfelagnum. Leiðslan kunnaði um, at tey frammanundan høvdu gjørt avtalu við Alzheimerfelagið, og at leiðarin fyri eldrarøktina hevði góðkent avtaluna. Vit bóðu Almannaverkið um avrit av avtaluni. Sum svar fingu vit avrit av skeiðsætlan frá Alzheimerfelagnum.

Stovnurin hevur goldið nøkrum persónum samsýningar, sum ikki eru farnar um skattaskipanina. Landsgrannskoðanin heldur, at peningurin átti at verið ávístur um skattaskipanina, vísandi til § 60 í skattalógini. Landsgrannskoðanin heldur tað vera av størsta týdningi, at almennir stovnar halda seg til reglurnar um at ávísa A-inntøku um skattaskipanina.

Innbúgv

Eftir at heimið var liðugt, hevur Hamragarður í 2011 keypt innbúgv og hvítvørur fyri 430 t.kr. Spurd, um innbúgvið ikki átti at verið partur av byggikostnaðinum, greiddi økisleiðslan frá, at eingin peningur var eftir av løgujáttanini, og tískil vórðu tey noydd at keypa írestandi innbúgvið umvegis raksturin.

Ognaryvirlit
Landsgrannskoðanin mælti til, at leiðslan fær ognaryvirlit til vega og dagførir tað, sambært reglunum í § 20, stk. 1-3, í roknskaparreglugerðini.

Lønir
Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2011 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá nøkrum tilvildarliga valdum starvsfólkum vóru rættar. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at annað enn tað, sum er nevnt niðanfyri.

Setanarskriv
Eitt tímalønt starvsfólk hevur ikki fingið setanarskriv. Viðkomandi fær løn sambært sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Økisleiðarin greiddi frá, at Almannaverkið ikki letur tímalønt starvsfólkum setanarskriv.

Landsgrannskoðanin mælti til, at starvsfólkið fær setanarskriv, vísandi til Ll. nr. 20/2008 "Um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakarum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum". Í oktober 2012 hevur Almannaverkið kunnað um, at tey fara at taka málið upp til viðgerðar.

Ein deildarleiðari hevur heldur ikki fingið setanarskriv. Leiðarin segði orsøkina vera, at Lønardeildin ikki enn hevði góðtikið, at viðkomandi fær leiðaraviðbót fyri at vera deildarleiðari á heiminum. Deildarleiðaraviðbót er ásett í sáttmálanum millum Heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Í oktober 2012 hevur Almannaverkið greitt frá, at tey í januar 2012 hava heitt á Almannamálaráðið um at taka málið uppaftur.

Í juli 2012 hava tey sent skriv til Almannamálaráðið viðvíkjandi flokking av deildarleiðarum innan Heimatænastuna, men tey hava ikki fingið svar. Vit hava biðið landsstýrismannin í almannamálum um viðmerkingar.

8.2.5 Roknskaparreglugerðir hjá stovnum undir Almannaverkinum

Landsgrannskoðanin heldur tað als ikki vera nøktandi, at ikki er komið á mál enn, hóast nærum 10 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð reisti spurningin um roknskaparreglugerðir.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2004 vístu vit á, at eftir okkara tykki vóru arbeiðsuppgávurnar hvørki nóg væl greinaðar ella lýstar í roknskaparreglugerðunum fyri bústovnar, sambýli, verkstaðir ella virknishús. Í fleiri førum er ikki greitt, hvørji starvsfólk hava ábyrgd av arbeiðsuppgávum, og í roknskaparreglugerðunum er ikki í nóg stóran mun tikið fyrilit fyri, at roknskaparligu arbeiðsuppgávurnar hjá stovnunum eru ymiskar.

Sambært Meginskrivstovuni fyri Nærverkið (nú Almannaverkið) varð uppskot til nýggjar roknskaparreglugerðir sent Almannamálaráðnum at góðkenna í mars 2006.

Almannamálaráðið góðkendi ikki roknskaparreglugerðirnar, tí ráðið vildi hava broytingar.

Í september 2009 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Almannamálaráðið í november 2008 hevði fingið uppskot frá Nærverkinum um roknskaparreglugerð fyri bústovnar undir Trivnaðartænastuni. Sambært Nærverkinum skuldu rokn-

skaparreglugerðir verða gjørdar fyri aðrar stovnar eftir sama leisti. Almannamálaráðið hevði ikki endaliga viðgjørt uppskotið, men fór at avgreiða málið skjótast til bar.

Landsgrannskoðanin heldur tað als ikki vera nøktandi, at ikki er komið á mál enn, hóast nærum 10 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð reisti spurningin um roknskaparreglugerðina.

Um ásetingarnar at gera og dagføra roknskaparreglugerðir skulu takast í álvara, mugu stovnsleiðslurnar taka hesa ábyrgd til sín og vísa áhuga fyri reglugerðunum. Reglugerðirnar eru jú ætlaðar sum amboð hjá leiðslunum at áseta reglur um innanhýsis ábyrgdar- og heimildarbýti.

8.3 Vanlig forsorg (LG 2011/212-0217)

8.3.1 Vanlig forsorg, hoyritól

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað útreiðslurnar til vanliga forsorg, hoyritól.

Landsgrannskoðanin hevði nøkur tilmæli, m.a. at bøta um og lýsa innanhýsis mannagongdir á nøkrum roknskaparøkjum, at tryggja at stuðul veruliga kemur brúkarunum til góðar, og at veitarar av hoyritólum eru góðkendir av Landslæknanum.

Játtanin er partur av játtanini til vanliga forsorg, sum Almannamálaráðið hevur ábyrgdina av. Í 2009 varð umsitingin flutt av Almannastovuni til Landssjúkrahúsið, og sjúkrahússtjórin er stovnsleiðari á kontuni.

Útreiðslur til lønir, konsulenttænastur og keyp av battaríum verða ikki bókaðar á játtanina til hoyritól, men á rakstrarjáttanina hjá Landssjúkrahúsinum.

Lógargrundarlag

Stuðulin til hoyritól verður veittur við heimild í “Lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. mars 1988 om offentlig forsorg” § 18. Kunngerð nr. 96/2008 “um stuðul til hoyritól” vísir til heimild í § 18, stk. 8, í forsorgarlógini, sum er strikað. Rætta heimildin skal vera § 18c, stk. 7. Almannamálaráðið ætlar at rætta kunngerðina í næstum.

Stuðul og egingjald

Niðan fyri er yvirlit yvir stuðul og egingjøld:

	Fyri 1/1-2009	Frá 1/1-2009	Frá 3/8-2010	Frá 24/12-2011
Stuðul pr. hoyritól	0	6.000	4.000	eisini objektivar heiliráðsábendingar
Egingjald pr. hoyritól	0	0	2.000	

Sambært K. nr. 96/2008 “um stuðul til hoyritól”, varð frá 1. januar 2009 veittur stuðul til at keypa frá privatum veitara, 6.000 kr. fyri hvørt hoyritól. Hoyritól frá almennu hoyriklinikkini vóru ókeypis. Ung undir 18 ár, fáa framvegis ókeypis hoyritól frá hoyriklinikkini.

3. august 2010 legði landsstýrismaðurin uppskot fyri Løgtingið um at broyta forsorgarlógina soleiðis, at ásett varð eitt egingjald, 2.000 kr. fyri hvørt hoyritól frá hoyriklinikkini, samstundis sum stuðulin at útvega hoyritól frá privatum veitara lækkaði niður í 4.000 kr. fyri hvørt hoyritól.

Í álitinum frá Trivnaðarnevndini helt meirilutin, at 2.000 kr. í egingjaldi fyri hvørt hoyritól var ov høgt sett sum varandi egingjald, og nevndin setti fram broytingaruppskot um, at lógin skuldi fara úr gildi aftur 1. januar 2012. Lógaruppskotið varð, saman við broytingaruppskotinum, endaliga samtykt 9. november 2010.

Allarhelst hevur broytingin havt við sær, at talið á útflýggjaðum hoyritólum er lækkað. Samstundis hevur egingjaldið og lækkaði stuðulin havt við sær, at eindarkostnaðurin eisini er lækkaður.

Í desember 2011 legði landsstýrismaðurin fram uppskot um at broyta forsorgarlógina, soleiðis at egingjaldið og stuðulin vórðu verandi óbroytt. Harafturat varð skotið upp at seta objektivar heiliráðsábendingar (indikatiónir) fyri, nær fólk hava rætt til stuðul ella ískoyti til hoyritól. Uppskotið varð samtykt, og kom í gildi 24. desember 2011.

Lógarbroytingarnar kunnu sigast at hava havt eina tálmandi ávirkan á útreiðslur landskassans. Útreiðslurnar eru lækkaðar úr 7,7 mió.kr. í 2009 og 6,7 mió.kr. í 2010 til 2,6 mió.kr. í 2011. Í september 2012 var nýtslan um 2 mió.kr.

Roknskaparreglugerð o.a.

Hoyriklinikkin hevur onga roknskaparreglugerð, men er partur av roknskaparreglugerðini hjá Landssjúkrahúsinum, sum er um generellar mannagongdir fyri bókhaldið hjá Landssjúkrahúsinum. Roknskaparreglugerðin hjá Landssjúkrahúsinum er frá 2009 og er ikki dagført.

Hoyriklinikkin hevur ongar skrivligar mannagongdir, sum lýsa mannagongdir/umsiting, skjøl, eftirlit, stuðul o.a. Í mai 2012 kunnaði Landssjúkrahúsið um, at nakrar gamlar mannagongdir eru, men tær svara ikki til nútíðarvirksemið.

Sambært Landssjúkrahúsinum verður roknskaparreglugerðin í løtuni endurskoðað, og hon skuldi eftir ætlan vera liðug í oktober mánaði í 2012. Í sambandi við endurskoðanina verður eisini hugt eftir serligum mannagongdum viðvíkjandi hoyriklinikkini, og tær verða tillagaðar viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini.

Mannagongdir

Kommunulæknin ávísir fólki til hoyriklinikkina. Hoyriklinikkin kannar, um treytirnar fyri at fáa hoyritól eru loknar. Eru treytirnar loknar, kunnu fólk útvega sær hoyritól antin frá almennu hoyriklinikkin ella frá privata veitaranum. Sambært § 18c, stk. 4, í forsorgarlógini kunnu fólk í fyrsta lagi fáa stuðul til nýtt hoyritól 4 ár eftir, at tey seinast hava fingið stuðul.

Besta og bíligasta hoyritólið

Sambært kunngerðini skal hoyriklinikkin útvega brúkaranum besta og bíligasta hoyritólið. Vit spurdu, hvussu hoyriklinikkin tryggjar sær, at tað eru bestu og bíligastu hoyritólini brúkarin fær.

Sambært bókhaldinum á hoyriklinikkini verður í høvuðsheitum keypt frá privatum veitarum so sum Siemens, Phonak, Widex o.ø. Vit spurdu, um keypsavtalur eru skjalfestar.

Almannamálaráðið hevur í oktober 2012 kunnað um, at sambært frágreiðing frá Landssjúkrahúsinum, hevur hoyriklinikkin munnligar avtalur við veitarar av hoyritólum. Eisini hevur Landssjúkrahúsið boðað frá, at tey hava verið í samband við

veitararnar, og teir eru sinnaðir at gera skrivligar keypsavtalur. Landssjúkrahúsið er í samráðingum við veitararnar.

Ískoyti at keypa hoyritól frá privatum veitara

Fyri at fáa stuðul til hoyritól krevst ávísing frá kommunulækna til oyralækna. Oyralæknin kannar, um treytirnar at fáa hoyritól eru loknar. Tá ið hoyritól eru latin brúkarum, sendir privati veitarin, sambært hoyriklinikkini, rokning til hoyriklinikkina fyri upphæddina, ið svarar til stuðulin. Brúkarin rindar munin millum stuðulin og kostnaðin.

Rokning frá privata veitaranum

Rokningarnar frá privata veitaranum eru stílaðar til hoyriklinikkina. Brúkararnir hava ikki altíð váttað fyri móttøkuna av hoyritólum.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til at seta í verk innanhýsis mannagongdir, sum skulu tryggja, at stuðulin veruliga er komin brúkarunum tilgóðar. Tað kundi t.d. verið, at brúkarin váttar at hava fingið hoyritólið. Landssjúkrahúsið tekur undir við tilmælinum og fer at gera váttanina til fasta mannagongd hjá hoyriklinikkini.

Landsgrannskoðanin hevur eisini mælt til, at mannagongdirnar verða lýstar í roknskaparreglugerðini ella á annan hátt. Sambært Almannamálaráðnum arbeiðir Landssjúkrahúsið við at endurskoða mannagongdirnar hjá hoyriklinikkini.

Góðkenning av privatum veitara

§ 10 í kunngerðini “um stuðul til hoyritól” ásetur, at stuðul eftir § 4, stk. 1, bert verður veittur, um Landslæknin hevur góðkent privata veitaran. Hoyriklinikkin kunnaði um, at privati veitarin er góðkendur av Landslæknanum, og tí verður stuðulin goldin brúkarunum umvegis privata veitaran.

Vit spurdu, hvussu hoyriklinikkin tryggjar sær, at privati veitarin er góðkendur. Landssjúkrahúsið sigur seg ikki fáa nakra kunning frá Landslæknanum um hesi viðurskifti.

Landsgrannskoðanin mælti til, at hoyriklinikkin veruliga tryggjar sær, at stuðul bara verður veittur góðkendum veitarum, t.d. við at biðja um avrit av góðkenning.

Almannamálaráðið hevur í oktober 2012 kunnað um, at Landssjúkrahúsið hevur vent sær til Landslæknan og privata veitaran og biðið um skrivliga váttan um góðkenningina, fyri at tryggja, at privati veitarin hevur neyðugu góðkenningina.

Bókhald o.a.

Sjúkrahússtjórin góðkennir mánaðarroknskapirnar í góðkenningarskipanini hjá Gjaldstovuni. Fíggjardeildin á Landssjúkrahúsinum stemmar av mótvegis kontuavritum. Vit valdu at hyggja eftir avstemmanini hjá einum veitara. Munur var á salduni 31. desember 2011.

Landsgrannskoðanin mælti til at greina munin, gera neyðugar rættingar, og at gera mannagongdir fyri regluliga avstemman, váttan og undirskrift.

Landssjúkrahúsið hevur í oktober 2012 kunnað um, at munurin nú er greinaður og samskifti hevur verið við veitaran um at rætta salduna. Eisini eru mannagongdirnar herdar viðvíkjandi avstemmman, sum nú verður váttað við undirskrift og dagfesting. Nýggju mannagongdirnar verða skjalfestar í endurskoðaðu roknskaparreglugerðini.

8.3.2 Dagføring av forsorgarlógini o.a.

Síðani níti-árini hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan innan fyri stutta tíð fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti. Ábøtur eru framdar, men enn er onki lógaruppskot lagt fyri Løgtingið um nýggja forsorgarlóg.

Í 2012 er nýggj lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk samtykt. Samstundis eru fylgibroytingar gjørdar í forsorgarlógini. Enn vantar at endurskoða ásetingarnar um fyribils og varandi hjálp, og um tilboð til børn við breki, og tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi.

17. mai 1995 kom í gildi "Lov om sociale ydelser på Færøerne". Talan er um rammulóg, sum áleggur/heimilar heimastýrinum at lóggeva á almannaøkinum. Sambært rammulógini verða gomlu donsku almannalógirnar í gildi, til nýggjar løgtingslógir loysa tær av.

Síðani hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggávan fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan fyri stutta tíð. Ábøtur eru framdar, men enn er onki lógaruppskot um nýggja forsorgarlóg lagt fyri Løgtingið.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2010 átalaðu løgtingsgrannskoðararnir enn einaferð harðliga, at so lítið ítøkiligt hendir við arbeiðinum at gera nýggja forsorgarlóg, hóast trupulleikarnir í áravís hava verið umrøddir í frágreiðingum.

Í juli 2011 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tey síðsta árið høvdu arbeitt við lóg um endurbúgving og vard størv, og væntandi fór uppskot til lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk at verða sent til hoyringar fyrst í tingsetuni 2011/2012. Lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk skal koma í staðin fyri §§ 18 og 18a í forsorgarlógini.

Av tí, at arbeiðið við endurbúgving og vardum størvum dró út, væntaðu tey ikki, at gongd kom á arbeiðið at endurskoða §§ 9 og 13 (fyribils og varandi hjálp) í forsorgarlógini fyrr enn seinni í 2011.

Landsstýrismaðurin helt ikki, at arbeiðið við at endurskoða tilboð til børn við breki, og tilboð til eldri og vaksin við serligum tørvi, kundi byrja fyrr enn í 2012.

7. mars 2012 legði landsstýrismaðurin fram "Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk". Sambært almennu viðmerkingunum er uppskotið ein liður í arbeiðinum hjá landsstýrismanninum at endurskoða forsorgarlógina. Tiltøkini í lógini eru serliga ætlað:

- at fyribyrgja avleiðingar av arbeiðsloysi og sjúku við virknisvenjing,
- at varðveita starvsfólk á arbeiðsmarknaðinum, sum eru í vanda fyri at verða uppsøgd av minkaðum arbeiðsførleika, og
- at rekruttera og integrera persónar, sum standa uttan fyri arbeiðsmarknaðin av minkaðum arbeiðsførleika.

Sama dag legði landsstýrismaðurin fram "Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg". Sambært almennu viðmerkingunum er uppskotið fylgibroyting til forsorgarlógina í sambandi við uppskotið til nýggja lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Uppskotini vórðu samtykt 2. mai 2012 og fáa gildi 1. januar 2013.

8.4 Løn, setanir o.a. í Nærverkinum (LG 2011/511-0000)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í mai 2011 vórðu ávís viðurskifti viðvíkjandi lønar- og setanarviðurskiftum í Nærverkinum umrødd. Enn eru øll viðurskiftini ikki komin í rættlag.

Skipanarligir skilnaðir og skrivligar mannagongdir

Landsgrannskoðanin helt, at tað kann vera eitt vandamál fyri lønarumsitingina hjá Almannaverkinum[24], at skipanarligir skilnaðir ikki eru. Tí mælti Landsgrannskoðanin til, at leiðslan ásetti skrivligar mannagongdir, sum á annan hátt tryggjaðu rættar lønarútgjaldingar. Vit vístu á, at leiðslan t.d. kann orða reglur og mannagongdir við krøvum um og treytum fyri, hvussu lønarumsitingin skal vera skipað.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin í almannamálum greitt frá, at skipanarligur skilnaður er enn ikki ímillum tann, sum skrásetur í lønarskipanina, og tann, sum flytur lønirnar. Eisini kunnar landsstýrismaðurin um, at tá ið leiðslan á samanlagda stovninum er sett, verður farið undir at ganga ígjøgnum vantandi mannagongdir.

Tulking av sáttmálum o.a.

Setanarskriv

Í 2010 mælti Landsgrannskoðanin Almannaverkinum til at lata øllum starvsfólkum setanarskriv, vísandi til § 2, stk. 1-4, í Ll. nr. 20/2008 “um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakarum treytirnar fyri setanarviðurskiftum”.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tímalønt framvegis ikki fáa setanarskriv, sum ásett er í lógini. Landsstýrismaðurin kunnar eisini um, at Almannaverkið heldur lógina vera sera trupla at umsita, og at lønardeildin hjá Almannaverkinum higartil hevur hildið seg til ásetingarnar í ymisku sáttmálunum um tímalønt.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera nøktandi, at Almannaverkið ikki heldur krøvini í lógini um setanarviðurskifti hjá tímaløntum, men umber seg við, at tey gera eftir avvarðandi sáttmálum. Mint verður á, at lógin er til fyrimunar fyri viðurskiftini hjá løntakarunum fram um sáttmálar.

Løn/samsýning fyri serstakar frí- og halgidagar

Í 2010 spurdi Landsgrannskoðanin Almannaverkið, um tað var rætt at rinda starvsfólkum 4% fyri frí- og halgidagar, tá ið tey frammanundan fáa fasta løn fyri fulla arbeiðstíð frá sama arbeiðsgevara.

Uppá fyrispurning frá Almannamálaráðnum svaraði Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum í 2011, at kunnu fastlønt arbeiða sum tímalønt, eiga tey eisini at verða viðgjørd sum tímalønt í sambandi við tey 4 prosentini.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at onki er hent í málinum. Landsstýrismaðurin vísir til svarið í 2011 frá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum um, at er tað so, at fastlønt eisini kunnu arbeiða sum tímalønt, eiga tey eisini at verða viðgjørd sum tímalønt í sambandi við tey 4 prosentini. Landsstýrismaðurin boðar eisini frá, at tað er Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum, sum tulkar sáttmálarnir. Tískil heldur Almannamálaráðið onga orsøk vera til at gera meira við málið.

[24] Til apríl 2012: Nærverkið

Landsgrannskoðanin heldur, at Almannamálaráðið má taka støðu til, um tað er rætt at rinda somu starvsfólkum tvær ferðir fyri serstakar frí- og halgidagar fyri at arbeiða hjá Almannaverkinum.

Samanhangandi setan

Spurningurin um samanhangandi setan hevur týdning, tá ið gjørt skal verða av, hvør lønin skal vera hjá starvsfólkum, sum arbeiða fulla tíð, og harumframt arbeiða sum tímalønt á sama stovni ella á øðrum stovni hjá Trivnaðartænastuni. Spurningurin kann eisini hava týdning, hvørt starvsfólkini hava rætt til gjøld fyri m.a. serstaka fríviku og serstakar frí- og halgidagar.

Í apríl 2011 greiddi Almannamálaráðið frá, at tá ið talan er um stovnar í Nærverkinum, er setanarøkið Nærverkið. Undantikið er, tá ið talan er um sjálvsognarstovnar. Tá ið ræður um arbeiðsuppgávur og lønargjalding, er setanarmyndugleikin viðkomandi stovnur.

Landsgrannskoðanin helt, at starvsfólk, sum eru sett í starv hjá t.d. "Trivnaðartænastuni ella stovnum undir henni", hava bara ein og sama arbeiðsgevara.

Í oktober 2012 greiddi landsstýrismaðurin frá, *"at tá talan er um starvsfólk, sum eru sett í starv hjá t.d. Trivnaðartænastuni ella stovnum undir henni, er setanarøkið Almannaverkið, og arbeiðs- og tænastustaður í løtuni ein stovnur. Sami persónur kann eisini arbeiða á øðrum stovni innan Trivnaðartænastuna ella á øðrum tænastum, og eru hesar setanir ikki samanhangandi."*

Landsgrannskoðanin heldur svarið frá Almannamálaráðnum vera ógreitt. Er tað so, at Trivnaðartænastan og stovnar undir henni eru *eitt* setanarøki, er talan bert um *ein* setanarsáttmála ímillum Almannaverkið og viðkomandi starvsfólk, sjálvt um viðkomandi skuldi gjørt tænastu á fleiri stovnum. Tískil halda vit, at Almannaverkið má taka støðu til, um til ber at arbeiða sum tímaløntur fyri Trivnaðartænastuna samstundis sum ein frammanundan er í fulltíðar fastløntum starvi hjá Trivnaðartænastuni.

Yvirtíð

Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var í tráð við § 12, stk. 2, í avtaluni 17. desember 2007 millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið, tá ið starvsfólk, sum eru í fulltíðarstarvi hjá Nærverkinum, harumframt arbeiða eyka hjá sama arbeiðsgevara uttan at fáa yvirtíð goldna. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur í februar 2011 greitt frá, at tað ikki heilt er í tráð við ásetingarnar í sáttmálanum, men at tað er til fyrimunar fyri bæði arbeiðsgevaran og lønmóttakaran.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at onki nýtt er hent í málinum. Landsstýrismaðurin greiðir frá, at sambært Almannaverkinum er tað leiðslan á viðkomandi stovni, ið umsitur arbeiðstíðina. Tað kemur fyri, at starvsfólk avtala við viðkomandi stovnsleiðara at arbeiða eyka uttan úrtíðargjald. Verður álagt starvsfólkunum at arbeiða yvir, verður úrtíðargjald latið.

Landsgrannskoðanin undrast á, at Almannamálaráðið ikki heldur tað hava størri týdning at fylgja sáttmálunum, men letur tað upp til stovnsleiðarar at gera av.

Eftirløn til tímaløntar heilsu- og heimahjálparar

Í 2010 staðfesti Landsgrannskoðanin, at í fleiri førum høvdu heilsu- og heimahjálparar ikki fingið eftirløn goldna fyri fyrsta árið, tey hava verið í starvi.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera í tráð við reglurnar í § 11 í sáttmálanum millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið. Eisini helt Landsgrannskoðanin, at Nærverkið átti at broytt mannagongdina og rinda starvsfólkunum tað, sum vantar í.

Í januar 2011 spurdi Landsgrannskoðanin Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, um hon var samd við Landsgrannskoðanina í, at samsvar ikki er millum ásetingina í § 11 í nevnda sáttmála og mannagongdina hjá Nærverkinum.

Í februar 2011 svaraði Lønardeildin, at ásetingin um eftirløn hjá heilsuhjálparum skal tulkast soleiðis, at heilsuhjálparar, sum hava verið í starvi í eitt ár, og sum lúka treytirnar at fáa eftirløn (miðaltímatalið 15 tímar ella meira um vikuna), skulu hava eftirløn afturvirkandi frá tí degi, tey vórðu sett í starv.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært frágreiðing frá Almannaverkinum fáa heilsu- og heimahjálparar, sum hava verið í starvi í eitt ár og lúka treytirnar annars, eftirløn afturvirkandi frá tí degi tey eru sett í starv. Tó verður eftirlønin roknað út eftir seinasta kalendaraári. Almannaverkið hevur biðið Lønardepilin á Gjaldstovuni um at fáa broytt lønarskipanina samsvarandi.

Heimatænastan

Mannagongd fyri tímaskráseting

Í 2010 staðfesti Landsgrannskoðanin, at Nærverkið hevði ikki mannagongdir, sum tryggjaðu munagott eftirlit við tímaskrásetingini. Landsgrannskoðanin mælti Nærverkinum til at gera skrivligar mannagongdir fyri tíðarskrásetingini.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannaverkið arbeiðir við skrivligum mannagongdum.

Gjald fyri heimahjálp

Hvørt ár ásetur landsstýrismaðurin í kunngerð “egingjald fyri heimahjálp”. Heimildin er í forsorgarlógini § 32A, stk. 3.

Í 2010 mælti Landsgrannskoðanin til, at Nærverkið gjørdi skrivligar mannagongdir fyri, hvussu tímarnir, sum móttakari av heimahjálp skal rinda fyri, verða gjørdir upp.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at mannagongdirnar nú eru, at heimahjálparar kvitta fyri veittar tímar. Tá ein mánaður er liðin verður ein koyring gjørd, ið byggir á inntøkuupplýsingar frá TAKS og kvittaðar minuttir í visitatiónsskipanini. Út frá hesari koyring verður gjaldið roknað samsvarandi kunngerðini. Í næstum fer Almannaverkið í holt við at gera vegleiðingar og mannagongdir til visitatiónsskipanina.

Rokning, ella draga frá í pensjón

Í 2010 spurdi Landsgrannskoðanin Nærverkið, hví móttakararnir av heimahjálp ikki fingu rokning fyri tænastuna, men at upphæddin varð trekt frá í pensjónini.

Eisini spurdi Landsgrannskoðanin landsstýrismannin í almannamálum um:

- móttakari av heimahjálp átti at fingið uppgerð yvir veittar tænastur, og
- hvussu Nærverkið fekk samtykki frá pensjónistinum at taka gjaldið av pensjónini.

Í november 2011 greiddi Almannamálaráðið frá, at higartil høvdu brúkarar av heimahjálp verið kunnaðir um gjaldið, tá ið Heimatænastan var á heimavitjan. Nærverkið arbeiddi við at broyta visitatiónsskipanina, so at móttakararnir skuldu fáa uppgerð yvir veittar tænastur. Almannamálaráðið greiddi eisini frá, at tey fóru at taka mannagongdirnar upp við Nærverkið og Almannastovuna til tess at tryggja, at skjalprógv vóru fyri samtykkinum.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tá ið ein borgari fær játtaða heimahjálp, kann viðkomandi velja at geva Almannaverkinum fulltrú, sambært § 8, stk. 7, í K. nr. 101/2000, at trekkja gjaldið av, áðrenn pensjónin verður goldin út. Teir borgarar, sum ikki hava givið Almannaverkinum hesa heimild, fáa nú eina útgreinaða rokning hvønn mánað. Teir borgarar, ið hava givið samtykki til at trekkja gjaldið av pensjónini, fáa onga uppgerð.

Landsstýrismaðurin kunnar um, at Almannaverkið fer at taka tann spurningin upp til viðgerðar í næstum, um hesir borgarar eisini skulu hava uppgerð sendandi.

Landsgrannskoðanin mælir til, at Almannaverkið sendir øllum, ið gjalda fyri heimarøkt, uppgerð fyri tímar, tey rinda fyri.

9 Innlendismál

9.1 Innlendismálaráðið (LG 2011/215-0111)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað fyrisitingina í Innlendismálaráðnum. Endamálið við grannskoðanini var at kanna mannagongdir og innaneftirlit.

Endamál, virksemi og uppgávur

Innlendismálaráðið hevur greitt frá, at tey eru í holt við at leggja seinastu hond á arbeiðið at yvirtaka útlendingamál. Nú, tá ið Løgtingið hevur samtykt uppskotið um at taka av rættarskipanarlógina, hevur landsstýrismaðurin gjørt av, at Innlendismálaráðið skal raðfesta uppgávuna at dagføra galdandi rættargangslóg og revsilóg. Onnur mál, ið ráðið arbeiðir við, er kommunubygnaðurin.

Innlendismálaráðið arbeiðir eisini við at gera rundskriv um lógarsmíð o.a. Tað fyrsta rundskrivið "um uppsetan av broytingum av løgtingslógum" varð sett í gildi 17. apríl 2012.

Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Innlendismálaráðið hevur ikki sett í verk stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit sambært roknskaparkunngerðini. Ráðið hevur gjørt avrikssáttmálar fyri 2012 við Akstovuna og Landsverk.

Leiðslan gjørdi vart við, at arbeiðið í Innlendismálaráðnum er av slíkum slag, at hon heldur tað ikki bera til at gera reglur um mál og nádd avrik fyri ráðið. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at hann og leiðslan javnan seta sær politisk og fyrisitingarlig mál, sum aðalráðið skal royna at náa og avgreiða. Sambært landsstýrismanninum ber ikki til at seta ítøkilig mál fyri málsøkið hjá t.d. lógardeildini.

Váðameting og KT-trygd

Innlendismálaráðið hevur ikki gjørt nakra váðameting. Leiðslan kunnaði um, at KT-fyrisitingin var farin undir at gera KT-trygdarpolitikk. Í 2008 segði Innlendismálaráðið, at tey vóru farin í holt við at gera eina trygdarhandbók.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Innlendismálaráðið og Gjaldstovan hava avtalað, at eitt starvsfólk á Gjaldstovuni ger váðametingina.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Innlendismálaráðið hevur gjørt eina nýggja roknskaparreglugerð í oktober 2012.

Ferðaútreiðslur og umboðan

Vit gjørdu nakrar stakroyndir av ferða- og umboðanarútreiðslum. Vit mæltu til at viðmerkja endamál við ferðunum og at greiða frá á skjølum fyri umboðan, hvør er við á matstovum o.a. Innlendismálaráðið rindar fyri eina starvsfólkaútferð um árið og fyri jólaborðhald.

Telefon

Innlendismálaráðið er við í telefonavgreiðsluni hjá Løgmansskrivstovuni, sum eisini fevnir um onnur aðalráð. Løgmansskrivstovan hevur greitt frá, at avtalan m.a. ber í sær, at ráðið rindar fast mánaðargjald á 339 kr. fyri hvørja telefon, sum starvsfólkini hava. Fasti prísurin er galdandi uttan mun til, hvussu nógv verður

tosað í telefon við allar far- og fastnettelefonir í Føroyum umframt fastnettelefonir í Europa. Við í prísinum er eisini fríur dátuflutningur í Føroyum upp til 1 GB.

Spurningurin um fría telefon

Í apríl 2012 hevur Innlendismálaráðið greitt frá:

> *"at í grundregluni ber ikki til at tryggja, at fartelefonir, sum meginregla, bert verða nýttar til samskifti, sum hava við arbeiðsuppgávur stovnsins at gera. Tað sama er galdandi fyri aðra telefonnýtslu og alt annað samskifti hjá aðalráðum landsins yvirhøvur.*
> *Starvsfólk í Innlendismálaráðnum eru kunnaði um galdandi reglur um nýtslu av fartelefon. Tað verður nú eisini ásett í roknskaparreglugerðini hjá Innlendismálaráðnum.*
> *Innlendismálaráðið hevur spurt seg fyri hjá Vinnumálaráðnum, Løgmansskrivstovuni, Mentamálaráðnum og Almannamálaráðnum, um goldið verður fyri fartelefonir, sum frían ágóða, men er bert eitt dømi um tað. Innlendismálaráðið og nevndu ráð hava samanlagt umleið 125 starvsfólk.*
> *Sum kunnugt verða fartelefonir ikki bert brúktar til vanligt telefoni, men eru eisini partur av "arbeiðsstaðnum", har nógvar telduskráir eru samskipaðar (koyra saman).*
> *Harafturat kemur, at eitt fast gjald verður goldið mánaðarliga fyri hvørja fartelefon, og at tað annars er ókeypis at ringja til allar telefonir í landinum. Møgulig privat nýtsla hevur tí ikki meirkostnað við sær."*

Landsgrannskoðanin mælti Innlendismálaráðnum til at taka málið upp við TAKS.

Í oktober 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá:

> *"at aðalráð í miðfyrisitingini, fleiri ferðir og í nógv ár, hava tikið málið upp við TAKS, um møguliga at skatta nýtslu av fartelefon, men verður tað at kalla ikki praktiserað. Innlendismálaráðið metir tí, at initiativið til gera leiðreglur á økinum, liggur hjá Fíggjarmálaráðnum/TAKS. Harafturat kemur, at eitt fast gjald verður goldið mánaðarliga fyri hvørja fartelefon, og at tað annars er ókeypis at ringja til allar telefonir í landinum. Møgulig privat nýtsla hevur tí vanliga ikki meirkostnað við sær."*

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at tað er ikki ein spurningur um meirkostnað hjá Innlendismálaráðnum, men um eina skattskylduga veiting sum Innlendismálaráðið letur sínum starvsfólkum. Sí eisini brotið um fartelefonir undir kap. 3 "Fíggjarmál".

Lønir og starvsfólkaviðurskifti

Starvsfólkini í Innlendismálaráðnum skráseta arbeiðstíðina, t.d. komu, fráveru, feriu o.a. Tey skráseta ikki, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Við støði í lønarútgjaldingum fyri november 2011 kannaði Landsgrannskoðanin, um lønirnar hjá trimum tilvildarliga valdum starvsfólkum vóru rættar. Landsgrannskoðanin hevur samanhildið setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard (ISSAI 1240) spurdi Landsgrannskoðanin, um leiðslan hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki.

Eisini spurdi Landsgrannskoðanin leiðsluna, um hon hevði kunnleika um svik, illgruna um svik ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

Aðalstjórin greiddi frá, at hann hevði ikki kunnleika ella illgruna um svik á arbeiðsplássinum. Hann hevði ikki beinleiðis tikið spurningin upp við starvsfólkini, hvørjir vandar kundu vera fyri møguligum mistøkum ella sviki. Hann helt ikki, at møguleikar vóru fyri sviki í roknskapinum.

9.2 Útlendingastovan (LG 2011/215-0141)

Landsgrannskoðanin hevur í 2012 grannskoðað Útlendingastovuna. Onki var at finnast at.

Í 2011 var Útlendingastovan sjálvstøðugur stovnur undir Innlendismálaráðnum.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2011 eru uppgávurnar hjá Útlendingastovuni serliga:

- at ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi og familjusameining,
- at vegleiða og vera útlendingum til hjálpar viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum, og
- at taka lut í arbeiðinum at yvirtaka útlendingaøkið.

Í viðmerkingunum verður eisini sagt, at arbeitt verður við at yvirtaka fyrisitingina av útlendingaøkinum. Tað fer at hava eina meirútreiðslu við sær, um 3 mió.kr.

Útlendingamál eru felagsmál. Útlendingastovan ger tilmæli til donsku myndugleikarnar. Stjórin kunnaði um, at ætlanin er at yvirtaka økið í 2014. Málini, sum viðvíkja føroyska partinum av útlendingamálum, hoyra undir Udlændingestyrelsen í Justitsministeriet.

Í Føroyum galda reglur í útlendingamálum, sum vóru galdandi til 2000 í Danmark. Broytingar, sum eru gjørdar í Danmark seinastu 12 árini, eru ikki galdandi í Føroyum. Misskiljingar koma ofta fyri, tá ið danskir myndugleikar skulu viðgera umsóknir frá útlendingum, sum eru í Føroyum. Útlendingastovan hevur saman við Udlændingeservice brúkt nógva orku at laga umsóknarbløð til reglurnar, sum galda í Føroyum.

1. juli 2012 varð Útlendingastovan løgd undir Umhvørvisstovuna í deildina Tinglýsing og Landsfólkayvirlit.

Í oktober 2012 boðar landsstýrismaðurin frá, at ætlanin er at yvirtaka útlendingamál 1. august 2013, og at peningur verður settur av í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2013.

Mál og avrik

Útlendingastovan hevur ikki sett í verk ítøkiligar stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit, men stovnurin hevur hvønn ársfjórðing gjørt hagtalsuppgerðir, har tal á málum og viðgerðartíð fyri hvørt mál verður gjørt upp, soleiðis at gongdin á stovninum er sjónlig. Uppgerðirnar og ársfrágreiðingar verða latnar Innlendismálaráðnum.

KT-politikkur og trygdarkunngerð

Í 2009 hevur Dátueftirlitið givið Útlendingastovuni loyvi at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í tilknýti til virksemi hennara. Dátueftirlitið helt, at fráboðanin viðvíkjandi at flyta persónsupplýsingar av landinum var fullfíggjað og nøktandi.

Í sínum reglum um KT-trygdarpolitikk hevur Útlendingastovan lýst yvirskipaða KT-trygdarpolitikkin hjá stovninum, sum skal verða endurskoðaður eina ferð um árið. KT-trygdarpolitikkurin er seinast góðkendur 25. mars 2010. Stovnurin hevur eisini reglur í KT-trygdarpolitikkinum, hvussu starvsfólk skulu bera seg at, um tey nýta teldurnar sum heimaarbeiðspláss.

Roknskaparviðurskifti

Útlendingastovan hevur gjørt eina roknskaparreglugerð, sum er send Innlendismálaráðnum. Í juni 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nú Útlendingastovan var løgd undir Umhvørvisstovuna, var roknskaparreglugerðin hjá Umhvørvisstovuni eisini galdandi fyri Útlendingastovuna.

Stovnurin hevur hvørki kassa ella peningastovnskontu. Stovnurin hevur yvirlit yvir ognir sínar.

Lønir og starvsfólkaviðurskifti

Við støði í lønarútgjaldingum fyri november mánað 2011 kannaði Landsgrannskoðanin lønirnar hjá tveimum starvsfólkum. Landsgrannskoðanin hevur samanhildið setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Vit høvdu onki at finnast at.

9.3 Landsverk (LG 2010/215-0381)

Landsgrannskoðanin hevur í 2011 og 2012 grannskoðað Landsverk. Vit hava m.a. grannskoðað mannagongdir og innaneftirlit.

Frágreiðingin er býtt sundur í fleiri partar, sum hoyra til virksemisøkini hjá Landsverk, m.a. høvuðskrivstovuna, byggideildina, goymslurnar og infrakervið á útoyggj.

Í frágreiðing okkara í januar 2012 greiddu vit frá einum parti av grannskoðanini.

Endamál, virksemi og uppgávur

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er Landsverk tøkniligur stovnur undir Innlendismálaráðnum og virkar sambært reglugerð frá 22. apríl 1998.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum boðað frá, at Innlendismálaráðið fer at dagføra reglugerðina soleiðis, at hon samsvarar betur við verandi virksemi hjá stovninum.

Stýringarmeginreglur um mál og nádd úrslit

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsverk og Innlendismálaráðið høvdu í februar 2011 gjørt fyrsta sáttmálan um mál- og avriksstýring. Í februar 2012 høvdu tey gjørt sáttmála fyri 2012 við støði í einari eftirmeting fyri 2011.

Roknskaparviðurskifti

Innlendismálaráðið hevur góðkent roknskaparreglugerðina hjá Landsverk, og hon er seinast dagført í juli 2012.

Innanvirkis roknskaparskipan
Sambært roknskaparkunngerðini § 4, stk. 4, hava allir almennir stovnar, sum eru á játtanarlóg og koma undir reglurnar um roknskaparverk landsins, skyldu til at nýta Búskaparskipan landsins. Fíggjarmálaráðið kann loyva stovnum at nýta sínar egnu búskaparskipanir, tó bert stovnum við serligum tørvi. Sambært § 11, stk. 2, skulu allar skrásetingar verða prógvaðar við einum skjali.

Umframt at brúka Búskaparskipan landsins til at skráseta útreiðslur o.a. brúkar Landsverk fíggjarskipanina Navision. Fíggjarmálaráðið hevur ikki formliga givið loyvi til tess, men Landsverk hevur samskift við Gjaldstovuna um skipanina. Sambært landsstýrismanninum er ætlanin at skjalfesta eina góðkenning av skipanini hjá Landsverk.

Tá ið inntøkurnar ikki verða skrásettar beinleiðis í Búskaparskipan landsins, ber ikki til at síggja undirskjølini har. Í februar 2012 hevur Landsverk greitt frá, at arbeiðið at fáa øll skjøl tøk í Búskaparskipan landsins var tarnað nakað, men at tey ætlaðu at taka tað upp aftur í 2012. Landsgrannskoðanin mælti til, at ásetingarnar í roknskaparkunngerðini verða fylgdar.

Í oktober 2012 greiðir landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið at fáa øll skjøl tøk í Búskaparskipan landsins er komið væl áleiðis.

Innanvirkis roknskapur
Landsverk ger innanvirkis roknskap við at skráseta á sundurgreiningarnar: stað, endamál og verkætlan. Á tann hátt kunnu skrásetingarnar eisini verða brúktar sum stýringaramboð og til at fakturera eftir. Øll arbeiði, so sum vegir, brúgvar, havnir, bygningar o.a., verða skrásett sum verkætlanir.

Tøkur peningur
Landsverk hevur tveir forskotskassar. Landsgrannskoðanin mælti leiðsluni til at gera ófráboðað kassaeftirlit, sum ásett í roknskaparkunngerðini.

Stovnurin hevur fimm peningastovnskontur. Konturnar eru stovnaðar, fyri at privatpersónar, sum keypa tilfar frá stovninum, kunnu rinda fyri vøruna, áðrenn hon verður flýggjað út. Leiðslan greiddi frá, at peningastovnskonturnar annars bert verða nýttar til smávegis keyp um alnótina og í undantaksførum til at rinda fyri rokningar, har skjót avgreiðsla er neyðug.

Hóast Landsverk hevur reglur og mannagongdir fyri, nær peningur kann verða goldin av peningastovnskontum, hevur stovnurin goldið nakrar størri rokningar av peningastovnskontunum, sum eins væl kundu verið avgreiddar um Búskaparskipan landsins.

Søla
Øll søla hjá Landsverk er kontantsøla, um ikki annað er avtalað skrivliga framm-anundan. Treytirnar fyri kredittkeypi eru í roknskaparreglugerðini.

Skulu feløg og einstaklingar fáa kreditt, sum er størri enn 50 t.kr., krevur Landsverk, at tey seta peningastovnstrygd. Upphæddin á trygdini verður avtalað við hvønn keypara sær. Landsverk kunnaði um, at tey higartil ikki hava kravt nakra trygd leysgivna. Kommunur og almennir stovnar seta ikki trygd.

Avstemman av skuldarum
Landsverk hevur greitt frá, at samlaðu skuldararnir einaferð um mánaðin verða stemmaðir av ímillum Navision skipanina og Búskaparskipan landsins.

Landsgrannskoðanin sendi saldufráboðanir til tríggjar skuldarar. Tveir stemmaðu. Hjá triðja skuldaranum var munurin ímillum salduna hjá Landsverk og salduna hjá skuldaranum stórur.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, hví samsvar ikki í øllum førum er ímillum saldu hjá Landsverk og saldu hjá einstøkum kundum, og hvør orsøkin er til, at søla ikki altíð verður bókað so hvørt. Landsverk eftirlíkar ynskjum frá kundum, ið vilja hava eina samlaða rokning, tá ið arbeiðið, tey keypa tilfar til, er liðugt.

Trygdir

Nakrir kundar hjá Landsverk hava sett trygd fyri kredittkeypi sínum. Landsgrannskoðanin kannaði trygdirnar, og tað vísti seg, at skuldin hjá einum skuldara var farin væl upp um hámarkið.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í slíkum førum ger Landsverk eina gjølliga meting av kredittvirðinum hjá kundanum, tá ið vøran verður latin. Hann leggur afturat, at havt verður í huga, at marknaðurin er rættiliga dynamiskur, og at Landsverk tí noyðist, innan fyri rímiligt mark, at laga seg til marknaðin.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at Landsverk hevur ikki mist nevnivert av peningi, og at tann, sum umsitur skuldararnar, hevur eina rættiliga góða hilling á, hvørjum skuldarum stovnurin hevur álit á.

Landsgrannskoðanin heldur tað kann vera óheppið, at Landsverk ikki fylgir sínari roknskaparreglugerð. Vit mæla til, at trygdirnar í minsta lagi svara til kredittháarkið.

Renta

Á fakturunum, sum Landsverk sendir kundunum, er boðað frá, at renta verður roknað eftir gjaldsfreist. Í roknskaparreglugerðini er ásett, at renta verður tilskrivað við einum prosenti um mánaðin. Hóast ásetingarnar, roknar stovnurin ikki rentur av falnari skuld. Landsgrannskoðanin mælti til, at Landsverk fylgir egnum ásetingum um at rokna rentu.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk hevur tikið av ásetingina um renturokning, tí Landsverk heldur, at umsitingarliga arbeiðið av hesari renturokning er í so stórt í mun til, hvat kann verða heintað inn, og at Landsverk *"arbeiðir á tí privata marknaðinum, sum krevur, at stovnurin hevur eina fleksibla skipan, eins og privata vinnulívið".*

Landsstýrismaðurin greiddi eisini frá, at Landsverk fer at taka spurningin um rentuáseting upp við Gjaldstovuna.

Keyp

Kreditorbókhaldarin konterar allar rokningar, eftir at deildarleiðarar og arbeiðsformenn hava váttað tær. Fíggjarleiðarin leysgevur.

Keyp av maskinum, bilum og amboðum

Leiðslan hevur greitt frá, at stovnurin útreiðsluførir keyp av tólum, tá ið avtalan um keyp er gjørd. Størri íløgur í maskinur og bilar verða ofta gjørdar seinast í árinum, tá ið Landsverk veit, um játtan er eftir til at keypa fyri. Eisini kemur fyri, at stórar maskinur, sum stovnurin skal hava, ikki eru á goymslu hjá veitaranum.

Sum høvuðsregla rindar Landsverk ikki fyri maskinur, fyrr enn tær eru í Føroyum. Tó er komið fyri, at veitarar krevja, at stovnurin skal rinda forskot. Í teimum førum tryggjar Landsverk sær váttan frá seljaranum, at hann kann lata maskinurnar.

Í desember 2010 hevur Landsverk bílagt eina maskinu fyri 3,3 mió.kr. Maskinan varð útreiðsluførd í 2010. Hon varð goldin fyrst í februar 2011, men fór ikki úr Danmark fyrr enn í mars mánaði, og var sostatt ikki komin til Føroyar, tá ið hon varð goldin.

Landsverk hevur greitt frá, at tað var eitt mistak, at maskinan varð goldin, áðrenn hon var komin til landið, og stovnurin hevur broytt mannagongdina soleiðis, at forskot verður ikki rindað.

Keyp av persónbili
Í mai 2011 keypti Landsverk ein nýggjan persónbil og bókaði keypið á stovnsnummar 138182 "Inntøkufíggjað virksemi".

Sambært Landsverk varð keypið bókað á stovnsnummar 138182, av tí at øll amboð, maskinur og bilar verða útreiðsluførd á hesum stovnsnummari. Høvuðsskrivstovan leigar bilin, eins og øll onnur amboð og maskinur, frá deildini. Landsverk leggur dent á, at øll starvsfólk kunnu brúka bilin í arbeiðstíðini, og at stjórin brúkar bilin til at koyra til og frá arbeiði, av tí at hann skal vera tøkur alt samdøgrið.

Ferðaútreiðslur
Landsgrannskoðanin kannaði nakrar ferðauppgerðir við stakroyndum. Vit høvdu onki at finnast at.

Húsaleiga
Leigusáttmálin um skrivstovuhølini hjá Landsverk á Tinghúsvegnum í Tórshavn er bindandi til 2017. Sambært Landsverk er orsøkin til langa leigumálið, at útleigarin hevur høvuðsumvælt bygningin.

Ognaryvirlit
Føstu ognirnar hjá Landsverk standa í ognaryvirlitinum í landsroknskapinum. Annars hevur stovnurin yvirlit yvir flestu fastognir hjá landinum í skipanini Frontinus, har egnu ognir teirra eisini eru skrásettar.

Bilar og maskinur hjá Landsverk eru skrásettar í roknskaparskipanini Navision. Skrásetingin er í samsvari við vegleiðingina frá Gjaldstovuni. Stovnurin hevur ikki skrásett teldur og innbúgv.

Í apríl 2012 hevur Landsverk kunnað um, at tey fara at skráseta smærru ognirnar.

Lønir
Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønir vóru goldnar út sambært sáttmálum, galdandi reglum og vanligum siði. Harumframt kannaðu vit, um lønirnar vóru bókaðar í røttum tíðarskeiði, um størvini vóru lýst leys, og um starvsfólkini høvdu fingið setanarbrøv. Út frá teimum stakroyndum, vit gjørdu, hevur Landsgrannskoðanin onki at finnast at.

Í sambandi við grannskoðanina viðgjørdu vit eisini spurningin um møguligar fríar ágóðar frá Landsverk. Leiðslan kunnaði um, at tá ið tað snýr seg um gávur til

starvsfólk í sambandi við serstøk høvi, heldur stovnurin seg til reglurnar hjá TAKS.

Fríur bilur

Leiðslan á Landsverk greiddi frá, at stjórin hevur frían bil frá stovninum, og at orsøkin til tað er, at hann skal vera tøkur alt samdøgrið.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað, at persónur hevur bil frá arbeiðsgevaranum at koyra til og frá arbeiði við, er at meta sum ein partur av lønini. Vit vístu á, at í setanarsáttmálanum millum Innlendismálaráðið og stjóran á Landsverk stendur onki um, at stjórin skal hava frían bil frá stovninum. Harafturímóti stendur, at stjórin fær endurrindað fyri nýtslu av egnum bili og telefon.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"sambært Lønardeildini verður tað ikki ásett í stjórasáttmálum, at stjórin hevur frían bil. Tað verður rætt og slætt ikki brúkt."* Landsstýrismaðurin leggur afturat, at Innlendismálaráðið er samt við Landsverk í, at stjórin eigur at hava frían bil, av tí at hann skal vera tøkur alt samdøgrið.

Landsgrannskoðanin skilir ikki svarið frá landsstýrismanninum og hevur tí spurt Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, hvat tey meina við í svarinum.

Lønardeildin hevur greitt frá, at hon hevur ongan sáttmála, ið gevur stjóranum frían bil frá arbeiðsgevaranum. Lønardeildin kennir ikki til, at tað í øðrum málum er góðkent at stjóri hevur frían bil.

Frí telefon

Landsverk legði niður fastnet telefonskipanina fyri fleiri árum síðani, av tí at tað var bíligari fyri stovnin. Tað vil siga, at starvsfólk í dag brúka bert fartelefon. Leiðslan kunnaði um, at verða telefonirnar nýttar privat, verður privata nýtslan kravd goldin aftur. Deildarleiðararnir gjøgnumganga rokningarnar, um tær fara upp um 500 kr. um mánaðin.

Løgmansskrivstovan hevur í rundskrivi nr. 1 frá 7. februar 2002 m.a. ásett, at telefonirnar hjá tí almenna sum meginregla einans verða nýttar til samskifti, sum hevur við arbeiðsuppgávur at gera. Um so er, at almennur arbeiðsgevari letur starvsfólki sínum fría telefon, hevur arbeiðsgevarin, í hesum føri Landsverk, skyldu at boða TAKS frá sambært reglunum í skattalógini um fráboðanarskyldu.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað í grundregluni ikki ber til at tryggja, at fartelefonir bert verða nýttar til samskifti, sum hevur við arbeiðsviðurskifti stovnsins at gera. Hann vísir eisini á, at fartelefonir verða ikki bert brúktar til vanligt telefonsamskifti, men eru eisini partur av arbeiðsstaðnum, har nógvar telduskráir eru samskipaðar við fartelefonina.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at Innlendismálaráðið hevur spurt fleiri onnur aðalráð, um goldið verður fyri fartelefonir sum frían ágóða. Tey fingu at vita, at av teimum 135 starvsfólkunum í hesum ráðunum vóru tað bert tvey, sum rindaðu fyri fartelefon sum frían ágóða.

Landsstýrismaðurin sigur víðari í svarinum, at *"samanumtikið er líkt til, at sjálvt um ráðini hava sett seg í samband við TAKS um fartelefonir, so hendir ikki meira við málinum."*

Landsgrannskoðanin heldur, at svarið frá landsstýrismanninum er ikki serliga ítøkiligt. Vit halda, at Landsverk eigur at avgreiða spurningin við TAKS.

9.3.1 Byggideildin

Byggideildin hjá Landsverk er byggiharri, tá ið nýggir vegir, bygningar, havnir og tyrlupallar verða gjørdir, og somuleiðis tá ið størri umbyggingar og umvælingar hjá landinum fara fram. Deildin tekur sær av øllum viðlíkhaldi av almennum bygningum og skal góðkenna allar leigusáttmálar hjá landinum.

Landsverk bjóðar arbeiðsuppgávur út bæði í almennari og bundnari útbjóðing. Reglurnar - at heinta inn boð á arbeiði og veitingar innan byggivirksemi - eru í Ll. nr. 106/1984 "Um útbjóðing v.m./om licitation m.v."

Landsverk greiddi frá, at krøv um eftirlit við verkætlanum eru allýst í útbjóðingartilfarinum. Byggileiðsla og fakeftirlit kunnu vera sami persónur ella felag, og tey umboða altíð byggiharran. Byggileiðslan hevur heimild at gera avtalur við arbeiðstakarar um arbeiði, so sum meir- og minniveitingar, sum ikki eru við í verkætlanini.

Tá ið ein verkætlan er boðin út, og tikið er av tilboði, gera partarnir ein arbeiðstakarasáttmála. Sáttmálin verður gjørdur á standardskjali hjá FHMF[25] og BSF[26]. Avtalugrundarlagið í arbeiðstakarasáttmálanum er m.a. ABF 06[27].

Í flestu førum tekna arbeiðstakararnir trygging fyri arbeiðini, men í onkrum føri teknar Landsverk tryggingina. Sambært ABF 06 skal arbeiðstakari, um ikki annað er ávíst í útbjóðingartilfarinum, í seinasta lagi 8 dagar eftir, at arbeiðstakarasáttmáli er gjørdur, seta trygd fyri, at hann lýkur sínar skyldur mótvegis byggiharranum. Er tilboðsupphæddin minni enn 300 t.kr., er ikki neyðugt at seta trygd.

Landsvegir

Játtanin til nýggjar landsvegir er á høvuðskontu 15.38.1.07. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini verður játtanin latin fyri at útbyggja og bøta um vegakervið kring landið við tí endamáli at fáa eina so munadygga og trygga ferðslu sum gjørligt.

Tøl úr Búskaparskipan landsins seinastu 5 árini:

t.kr.

Undirkonta	Heiti	2007	2008	2009	2010	2011
10 (107610)	Nýgerð av landsvegum	124.564	30.246	37.243	23.299	39.600

Landsgrannskoðanin valdi at kanna tvær verkætlanir.

Rituvíkarvegurin

Í 2009 og 2010 vórðu játtaðar ávikavist 2 og 3 mió.kr. til verkætlanina. Játtanin í 2009 varð við eykajáttan hækkað til 5 mió.kr., og játtanin í 2011 var 6,5 mió.kr. Tilsamans eru sostatt játtaðar 14,5 mió.kr. Arbeiðið er gjørt í tveimum byggistigum. Allar arbeiðsuppgávurnar vórðu bodnar út.

Arbeiðstakarasáttmálar vórðu gjørdir ímillum Landsverk og arbeiðstakararnar. Avtaluseðlar vóru um eykaarbeiðini. Trygdirnar, sum skuldu setast sambært

[25] Føroya Handverksmeistarafelag
[26] Byggiharrasamtak Føroya
[27] Almindelige betingelser for arbejder og leverancer i bygge- og anlægsvirksomheder

arbeiðstakarasáttmálunum, vórðu ikki settar fyrr enn í september og oktober 2011, sum er eftir at Landsgrannskoðanin bað um at síggja málið.

Landsverk hevur greitt frá, at trygdirnar vórðu ikki settar, av tí at táverandi verkætlanarleiðari fór úr starvi, og nýggi verkætlanarleiðarin helt, at viðurskiftini vóru í lagi, tá ið hann tók við. Landsverk ger vart við, at í ávísum føri kann tað vera trupult at fáa arbeiðstakarar at seta trygd rættstundis, og verður Landsverk varugt við tað, hava tey møguleika at afturhalda eina upphædd, sum svarar til trygdarupphæddina. Landsverk hevur tikið eina nýggja skipan í nýtslu, sum skal tryggja, at slíkt helst ikki skal koma fyri.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at arbeiðstakarin legði Rituvíkarvegin í skeivari linjuføring á einum strekki á 120 metrar. Tá ið Landsverk varnaðist feilin, varð tað fráboðað, og arbeiðstakarin varð biðin um at leggja vegin har, sum hann skuldi vera.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at feilurin hevur havt eina meirútreiðslu á 185 t.kr. við sær. Tað gjørdi eisini, at arbeiðið varð seinkað 3 mánaðir. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at arbeitt verður við at finna út av, hvør skal rinda meirkostnaðin, og vísir tað seg, at arbeiðstakarin skal gjalda, kann Landsverk krevja trygdina nýtta til tað.

Brúgvin um Streymin

Tilsamans 14 mió.kr. vórðu játtaðar til hesa verkætlanina sambært Ll. nr. 43/2009. 7 mió.kr. vórðu brúktar í 2009 og 7 mió.kr. í 2010. Umframt tær 14 mió.kr. vórðu í 2010 brúktar 270 t.kr. av "Trygdartiltøk, størri ábøtur og umvælingar" til Brúnna um Streymin.

Í fyrsta umfari varð umvælingin av brúnni mett at kosta um 12 mió.kr. Tilboðið, sum Landsverk tók av, var 10,6 mió.kr. Eftirsíðan vórðu nakrar tillagingar framdar, sum gjørdu, at kostnaðurin lækkaði 2,8 mió.kr.

Eftir avtalu við arbeiðstakaran, og við váttan frá eftirlitinum og teimum, sum høvdu gjørt útbjóðingartilfarið, varð gjørt av at lækka verkætlanina við nevndu upphædd. Samstundis gjørdi Landsverk av at gera gongubrúgv uttan á sjálvari brúnni fyri 2,5 mió.kr. Eisini vórðu avtalur gjørdar um aðrar tillagingar av verkætlanini, sum høvdu við sær, at samlaði kostnaðurin fyri partin hjá arbeiðstakaranum varð 12,8 mió.kr.

Landsverk hevur greitt frá, at tey við hesum tiltøkum eisini hava fingið størri ferðslutryggleika. Ein partur av kostnaðinum fyri gongubreytina er tí tikin av kontuni hjá Landsverk, sum er roknað til trygd í ferðsluni.

Landsgrannskoðanin hevur kannað tilfarið viðvíkjandi Brúnni um Streymin við at samanbera avtaluseðlarnar við útreiðslurnar til eykaarbeiði, sum eru bókaðar í Búskaparskipan landsins. Avtaluseðlar eru um allar eykaveitingarnar og upphæddirnar samsvara. Landsgrannskoðanin hevði onki at finnast at.

Almennir bygningar

Síðani 2009 hevur serstøk játtan verið á fíggjarlógini til umvæling og bjálving av almennum bygningum á serstakari høvuðskontu 15.11.1.56 “Umvæling av almennum bygningum”. Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2011 stendur, at bygningar landsins eru yvirhøvur í ringum standi, m.a. tí at í nógv ár hevur alt ov lítið verið játtað til viðlíkahald.

Roknskaptøl seinastu árini:

t.kr.

Stovnsnr.	Heiti	R 2009	R 2010	R 2011	J 2012
149450	Umvæling av almennum bygningum	27.365[28]	14.900	24.137	25.500

Landsverk umsitur umvælingar og umbyggingar av almennu bygningunum og hevur ræðisrætt á høvuðskontu 15.11.1.56.

Umvælingar ella viðlíkahald

Okkara grannskoðan vísir, at umvælingarútreiðslur eru bókaðar lutvíst á StRk. 1651 "umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur bygningar" lutvíst á standardkontu 14 "keyp av vørum og tænastum" hjá stovnunum hvør sær, og lutvíst á standardkontu 31, undir høvuðskontu 15.11.1.56.

Verkætlanir við serstøkum løgujáttanum

Innlendismálaráðið hevur kunnað um, at ráðið og Landsverk hava tikið atfinningarnar hjá Landsgrannskoðanini til eftirtektar, og at ongin peningur nú verður brúktur av høvuðskontu 15.11.1.56 til verkætlanir, har serstøk løgujáttan til almennar bygningar er frammanundan.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk á hvørjum ári ger eina nágreiniliga ætlan fyri, hvussu játtanin til umvæling av almennum bygningum verður brúkt, lutað út á verkætlanir (bygningar). Í sambandi við at landsstýrismaðurin skal góðkenna ætlanina, hyggur Innlendismálaráðið eftir, um viðkomandi verkætlanir hava fingið aðra játtan í fíggjarlógini. Um so er, verður onki játtað av hesari kontuni.

9.3.2 Hvat er ein almennur bygningur

Sambært viðmerkingunum í løgtingsfíggjarlógini fevnir játtanin um umvælingar og bjálving av almennum bygningum. Í veruleikanum verður játtanin brúkt til bygningar, sum landið ikki eigur. M.a. er peningur brúktur til at umvæla bygningar hjá sjálvsognarstovnum.

Landsverk helt, at talan var um ein prinsippiellan spurning, og tí høvdu tey spurt Fíggjarmálaráðið.

Í svari í juli 2012 til fyrispurning um *"viðlíkahald av kommunalum røktarheimum"* ger Fíggjarmálaráðið eina greining av játtanarreglunum. Fíggjarmálaráðið vísir til Ll. nr. 42/2009, § 22, stk. 1, um, at løgujáttan skal nýtast *"í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði".* Eisini vísir Fíggjarmálaráðið til § 1 í kunngerð nr. 83/2011 "um løgujáttan" har ásett er, at løgujáttan verður brúkt í sambandi við bygging, ognan ella avhendan av bygningum, løgum, skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði, sambært § 22, stk. 1, í lógini.

Í viðmerkingunum í 2012 til høvuðskontu 15.11.1.56 "Umvæling av almennum bygningum" stendur:

> *"Henda játtan fevnir um bæði umvæling og bjálving av almennum bygningum. Dentur verður lagdur á at samstarva við aðalráðini um, hvussu játtanin skal brúkast.*

[28] Íroknaðar 15 mió.kr., sum vórðu játtaðar á høvuðskontu 15.37.4.10 "Orkunýtsla í alm. bygningum"

Bygningar landsins eru yvirhøvur í ringum standi, tí alt ov lítið hevur verið játtað til viðlíkahald í nógv ár. Harafturat eru nógvir bygningar illa bjálvaðir, soleiðis at orkunýtslan er óneyðuga stór. Tí er stórur tørvur á at umvæla og bjálva nógvar av landsins bygningum. Tað skapar virksemi um alt landið, betrar bygningar landsins, og minkar eisini um orkunýtsluna. Samfelagsbúskaparliga er hetta stimbrandi."

Til spurningin frá Landsverk, um heimild er sambært fíggjarlógini at brúka játtanina til at halda viðlíka bygningar, sum eru ogn hjá sjálvsognarstovnum ella kommunum, svarar Fíggjarmálaráðið, at *"Mett verður, at tann fyrri parturin av tekstinum ikki útilokar heimildini, meðan seinni partur kann sigast at innihalda einans bygningar landsins. Hetta er tó ikki einsamalt avgerandi í hesum føri."* Sambært Fíggjarmálaráðnum hevur verið siðvenja, at peningur hevur verið játtaður til at viðlíkahalda bygningar hjá sjálvsognarstovnum og kommunal røktarheim.

Almannamálaráðið hevur gjørt Fíggjarmálaráðið varugt við, at landið rindar onga húsaleigu til sjálvsognarstovnarnar ella til kommunurnar. Tað er gomul siðvenja, sum hevur verið galdandi í fleiri áratíggju. Almannamálaráðið hevur eisini víst á, at játtanin hjá ráðnum á høvuðskontu 12.11.1.37 til viðlíkahald varð niðurløgd í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini 2010. Samstundis varð játtanin til høvuðskontu 15.11.1.56 "umvæling av almennum bygningum" hækkað.

Fíggjarmálaráðið heldur tað hava verið eitt politiskt ynski at samla alt størri viðlíkahald av almennum bygningum undir eina leiðslu, í hesum føri Landsverk. Tí er játtanin broytt frá rakstrarjáttan til løgujáttan, og samsvarar tað við játtanarskipanina og kunngerðina um løgujáttan.

Í svarinum í juli 2012 gevur Fíggjarmálaráðið Innlendismálaráðnum og Almannamálaráðnum eitt tilmæli, hvussu stovnarnir skulu orða meginreglur fyri, hvørjar bygningar játtanin kann verða nýtt til.

Meginreglurnar hava 10 punkt, og í stuttum kann játtanin verða nýtt til allar bygningar uttan til stovnar og sambýli, har íbúgvararnir rinda húsaleigu, og kommunurnar varða av øllum viðlíkahaldi. Avmarking er eisini, at játtanin kann ikki verða brúkt til verkætlanir, sum kosta meira enn 10 mió.kr., sí § 4 í K. nr. 83/2011. Til verkætlanir, sum verða bygdar eftir Ll. nr. 48/2009 "um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli" v.s.b., kann nýtslan ongantíð fara upp um helvtina av kostnaðinum av verkætlanini.

Niðurstøðan hjá Fíggjarmálaráðnum er, at samanumtikið hevur Landsverk heimild at brúka játtanina á høvuðskontu 15.11.1.56 "Umvæling av almennum bygningum" (løgujáttan) til bygningar, sum eru ogn hjá sjálvsognarstovnum ella kommunum, og Almannamálaráðið kann halda fram við gomlu siðvenjuni at fíggja viðlíkahaldsútreiðslur av ellis- og røktarheimum. Treytin er, at ráðið útgreinar, hvat slag av viðlíkahaldi talan er um, og at tað ikki er talan um størri ytri viðlíkahald.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at svarið frá Fíggjarmálaráðnum gevur nakra greiða fatan av, hvat ein almennur bygningur er.

9.3.3 Bygningsverkætlanir

Landsgrannskoðanin hevur kannað tríggjar verkætlanir, har Landsverk hevur umvælt bygningar í 2010. Vit kannaðu, um uppgávurnar vóru bodnar út, um samsvar var millum tilboð og kostnað, og um avtalur vóru gjørdar við arbeiðstakararnar um eykaarbeiði. Vit kannaðu eisini, um sáttmálarnir vóru undirskrivaðir, og um avtalaða trygdin var sett o.a.

Í einari verkætlan var trygdin ikki sett fyrr enn beint áðrenn arbeiðið var liðugt. Vit høvdu ikki aðrar atfinningar.

Landsverk hevur greitt frá, at allar verkætlanirnar verða bodnar út. Í hvørjum einstøkum føri metir Landsverk um, hvørt tað loysir seg at bjóða út í almennari licitatión, innbodnari licitatión, undirhondsboði ella tílíkum. Landsverk ger metingina út frá, hvat loysir seg best fyri tað almenna.

Sjóndepilin (sjálvsognarstovnur)
Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er Sjóndepilin skipaður sum ein sjálvsognarstovnur, og so at siga alt virksemið hjá stovninum er fíggjað úr landskassanum.

Av høvuðskontu 15.11.1.56 "Umvæling av almennum bygningum" eru 1,2 mió.kr. brúktar til at umvæla Sjóndepilin. Landsgrannskoðanin hevur samanhildið kostnaðin av arbeiðinum við tilboðið. Vit høvdu onki at finnast at.

Trygdin, ið sambært ABF 06 eigur at verða sett í seinasta lagi 8 dagar eftir at arbeiðstakarasáttmáli er gjørdur, varð ikki sett, fyrr enn beint áðrenn arbeiðið var liðugt. Orsøkin var, at Landsverk onkursvegna hevði gloymt tað.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk hevur tikið eina nýggja eftirlitsskipan í nýtslu í ár. Skipanin skal tryggja, at viðurskiftini viðvíkjandi verkætlanum eru í lagi, áðrenn farið verður undir arbeiðið, eitt nú trygd, ognartøka, gjaldingar o.a.

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim (interkommunalur sjálvsognarstovnur)
Røktar- og Ellisheimið í Runavík er ein interkommunalur sjálvsognarstovnur. Stovnurin fær eina rakstrarjáttan í fíggjarlógini, og so at siga allur kostnaðurin verður fíggjaður úr landskassanum. Um 500 t.kr. eru í 2010 brúktar at umvæla heimið.

Í tilfarinum, sum Landsgrannskoðanin kannaði viðvíkjandi tilboði og kostnaði av umvælingini, sæst, at stýrið fyri Røktar- og Ellisheimið í Eysturoynni í 2008 hevur søkt Nærverkið um at fáa 500 t.kr. um árið til at gera ábøtur á gamla bygningin, so leingi tørvur er á tí. 2010 er fyrsta árið, heimið hevur fingið tillutað part av játtanini til at umvæla almennar bygningar.

Landsgrannskoðanin kannaði, um kostnaðurin av arbeiðinum samsvaraði við tilboðini. Vit høvdu onki at finnast at.

Studentaskúlin í Hoydølum
1,7 mió.kr. eru brúktar av høvuðskontu 15.11.1.56 “Umvæling av almennum bygningum” at umvæla Studentaskúlan í Hoydølum. Harumframt er peningur brúktur av øðrum høvuðskontum hjá Mentamálaráðnum. Sostatt eru í 2010 samanlagt um 6,5 mió.kr. brúktar at umvæla skúlan.

Partar av arbeiðinum vórðu bodnir út sum undirhondsboð til somu arbeiðstakarar, ið umvældu bygningarnar í 2009. Landsgrannskoðanin hevur kannað skrivligu avtalurnar við arbeiðstakararnar og samanborið tær við kostnaðin í landsroknskapinum. Vit hava onki at finnast at.

Í september 2011 greiddi Landsverk frá, at arbeiðsgongdin í stóran mun hevði verið at kanna/umvæla stig fyri stig. Tey hildu, at higartil hevði tað eydnast at koma trupulleikunum við lekum o.ø. til lívs og fingið teir loystar við útvaldum arbeiðstakarum og ráðgevum, ið Landsverk hevði álit á, og sum høvdu sett seg væl inn í tingini og arbeitt undir truplum umstøðum.

Landsverk kunnaði samstundis um, at tey vóru fullgreið yvir, at henda mannagongd ikki var ynskisverd, men undir givnum umstøðum var tað einasta gongda leið, skuldi skúlin framhaldandi vera opin.

9.3.4 Góðkenning av leigumálum

Landsverk hevur myndugleika at góðkenna leigumál, men stovnurin heldur, at hann kann ikki áleggja øðrum stovnum nakað í sambandi við leigumál. Landsverk hevur ikki skrivligar reglur um, hvussu leigumál skulu metast.

Samanumtikið heldur landsstýrismaðurin, at fyrisitingin av leigumálum er nøktandi.

Sambært fráboðan nr. 148 frá 14. november 2011 “um býti av málsøkjum millum landsstýrismenninar” v.s.b. hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum, eftir at hava fingið samtykki til tess á landsstýrisfundi, heimild at geva øllum stjórnarráðum og stovnum undir landinum tænastuboð um:

- leigumál og keyp av fastogn,
- ný- og umbygging,
- nýtslu av byggiráðgeving,
- viðgerð av studningsmálum viðvíkjandi fastogn, og
- viðlíkahald

Sambært heimasíðuni hjá Landsverk góðkennir stovnurin leigumál út frá hesum grundarlagi:

- í hvørjum standi leigumálið er í,
- um leigumálið er egnað til endamálið,
- um leigumálið fylgir reglum og krøvum til sjálvan bygningin og ætlaða virksemið, og
- um kostnaðurin fyri leigumálið er hóskandi.

Í februar 2012 greiddi Landsverk frá, at leigumálini verða býtt í ymisk sløg, so sum vanligir skrivstovubygningar, parkeringsøki, goymsluhøli o.a. Afturat tí verða atlit tikin at, hvar bygningarnir standa, hvussu atkomuviðurskiftini eru, hvørjum standi bygningarnir eru í o.s.fr. Landsverk kunnaði eisini um, at við tað at leigumál kunnu vera sera ymisk í dygd, er tað sera trupult at gera generellar mannagongdir.

Í september 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Landsverk hevur talvur at ganga eftir, tá ið leigukostnaðurin skal metast. Talvurnar eru grundaðar á, hvat tað hevði kostað at bygt ein tilsvarandi bygning. Umframt eina afturgjaldstíð á 30 ár og diskonteringsrentu á 7% roknar Landsverk við einum árligum viðlíkahalds-kostnaði á 150 kr. fyri fermeturin. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at leigu-

marknaðurin er sera ymiskur, og at tað tí er neyðugt at taka støðu út frá hvørjum leigumáli sær. Samanumtikið heldur landsstýrismaðurin, at fyrisitingin av leigumálum er nøktandi.

9.3.5 Inntøkufíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin hevur m.a. kannað innaneftirlit og mannagongdir í sambandi við framleiðslu og sølu av gróti, skervi og asfalti. Landsverk selur til privatpersónar, virkir, kommunur, almennar stovnar og til sínar egnu verkætlanir.

Heimildin til inntøkufíggjað virksemi er í Ll. nr. 42/2009, § 19. Eftir gomlu játtanarskipanini, sum var galdandi til 31. desember 2009, var heimildin í pkt. 5.3. Í kunngerð nr. 84/2011, kap. 6, eru neyvari reglur um inntøkufíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin viðgjørdi fyri nøkrum árum síðani spurningin um inntøkufíggjaða virksemið hjá Landsverk. M.a. varð víst á, at greiður skilnaður var ikki millum vanliga raksturin hjá stovninum og inntøkufíggjaða virksemið.

Í 2011 staðfestu vit, at Landsverk var farið at skilja ímillum vanligan rakstur og inntøkufíggjað virksemi, men enn var ivasamt, hvussu skuldi vera við innanhýsis søluni, um hon skuldi vera partur av inntøkufíggjaða virkseminum.

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum boðað frá, at eftir hansara fatan lýkur Landsverk krøvini í játtanarlógini. Eftir § 19 í lógini kann landsstýrismaðurin loyva inntøkufíggjaðum virksemi, um tað er sprottið nátúrliga úr vanliga rakstri stovnsins. Landsstýrismaðurin vísir á, at í viðmerkingunum til uppskotið um játtanarlóg eru ongar avmarkingar settar til virksemið.

Landsstýrismaðurin vísir á, at roknskaparhátturin hjá Landsverk merkir:

- gjøgnumskygni í roknskapinum,
- prísáseting og kapping, og
- góða innanhýsis fíggjarstýring.

Landsstýrismaðurin sigur, at tá um inntøkufíggjað virksemi ræður, heldur Landsverk seg til játtanarlóg landsins, kontuskipan landsins og tilmælið frá Gjaldstovuni um bókingar og mannagongdir í sambandi við inntøkufíggjað virksemi yvirhøvur.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landsverk biðið Gjaldstovuna um at greina spurningin, hvussu søla av vørum og tænastum hjá Landsverk skal takast við í landsroknskapin.

Sambært skrivinum frá landsstýrismanninum og svarinum frá Gjaldstovuni letur tað til, at Innlendismálaráðið og Gjaldstovan eru samd um, at sølan hjá Landsverk til egnar verkætlanir eisini er at rokna sum inntøkufíggjað virksemi

Henda mannagongd er ein broyting frá tí mannagongd, sum Fíggjarmálaráðið legði upp til fyri nøkrum árum síðani, at tað einans er uttanhýsis søla, sum kemur undir reglurnar um inntøkufíggjað virksemi.

Roknskapur fyri inntøkufíggjað virksemi

Í frágreiðing okkara til Løgtingsgrannskoðararnar í januar 2012 greiddu vit í einum broti m.a. frá, at sambært landsroknskapinum 2010 hevði Landsverk eina minninýtslu á 3,4 mió.kr.

Landsgrannskoðanin staðfesti, at hevði sami roknskaparháttur verið nýttur í 2010, sum árini frammanundan, hevði nýtslan hjá Landsverk á høvuðskontu 15.38.1.02 verið 7,4 mió.kr. størri, enn hon annars var, ella ein meirnýtsla á um 4 mió.kr.

Orsøkin til munin er, at Landsverk hevur gjørt Bitumengoymsluna í Hósvík upp og støðlað virðið, og harvið broytt roknskaparmeginreglu.

Landsgrannskoðanin helt, at tað var ikki í tráð við ásetingina í § 14 í roknskaparkunngerðini, um broytingar í skrásetingarmannagongdum, at Landsverk broytti roknskaparmannagongd uttan at gera kravdu tillagingar.

§ 14 í roknskaparkunngerðini er soleiðis orðað:

> *Tá ið skrásetingarmeginregla verður broytt, fer tað, treytað av, hvør broytingin er, at bera í sær tøkniliga treytaðar meirútreiðslur/meirinntøkur ella minniútreiðslur/minniinntøkur. Hesar tøkniliga treytaðu útreiðslur/inntøkur skulu ikki verða tiknar við sum útreiðslur/inntøkur í játtanarroknskapinum. Í staðin fyri skulu roknskaparpostar fyrst í tí fíggjarárinum, tá broytingin verður gjørd, verða tillagaðir soleiðis, at teir vísa ta upphædd, sum teir høvdu havt, um so var, at broytingin varð gjørd, frammanundan viðkomandi fíggjarári. Føroya Gjaldstova ger hesa tillaging eftir einari frágreiðing frá tí aðalráði, sum broytingin viðvíkur, og tillagingin skal vísast við einari notu til fíggjarstøðuna í landsroknskapinum fyri ávísa fíggjarárið eftir neyvari støðutakan, sum Føroya Gjaldstova ger.*

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at hann hevur somu áskoðan sum Landsgrannskoðanin, at meirnýtslan hjá Landsverk í 2010 var 4 mió.kr. Landsstýrismaðurin sigur víðari, at tað var ein bókingarfeilur sum hendi, tá ið roknskaparhátturin varð broyttur, og at avtala er gjørd við Gjaldstovuna um roknskaparmeginreglu, soleiðis at tað ikki hendir aftur.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera eina týðandi broyting, tá ið endaliga nýtslan í roknskapinum verður 63,9 mió.kr. í staðin fyri 71,3 mió.kr.

Sambært reglunum í § 14 í roknskaparkunngerðini er tað púra greitt, at tøkniligar broytingar, so sum aktivering av goymsluni, skulu ikki verða tiknar við sum minniútreiðslur. Í minsta lagi skal verða kunnað um tað í landsroknskapinum t.d. við einari notu til fíggjarstøðuna.

Umframt kunningina um aktivering av goymsluni, skuldi ein tillaging verið gjørd í primosalduni, soleiðis at roknskaparposturin vísti ta upphæddina, hann hevði havt, um so var, at broytingin varð gjørd frammanundan 2010. Ein slík tillaging eigur ikki at verða gjørd av stovninum, men av Gjaldstovuni í samráð við aðalráðið.

Roknskapurin fyri Bitumengoymsluna 2011

Í landsroknskapinum er úrslitið av rakstrinum av inntøkufíggjaðum virksemi 619.793 kr. Parturin hjá Bitumengoymsluni í Hósvík er um 121 t.kr. við einari goymslubroyting á -367.165 kr.

Í oktober 2012 hevur grannskoðaravirkið Spekt gjørt roknskap fyri Bitumengoymsluna í Hósvík. Í grannskoðanarprotokollini greiðir grannskoðaravirkið frá, at virðið á goymsluni, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins við ársenda 2011, er sett 820 t.kr. ov høgt. Høvuðsorsøkin er, at Landsverk í sínari uppgerð hevur broytt prísásetingina á petroleum frá upprunaliga metta útveganarprísinum

til ein mettan dagsprís. Varð frávikið viðvíkjandi goymsluuppgerðini rættað í landsroknskapinum 2011, hevði tað ávirkað roknskapin við um 820 t.kr.

Grannskoðaravirkið ger vart við, at sum heild vanta skrivligar mannagongdir viðvíkjandi Bitumengoymsluni í Hósvík. Vantandi skrivligu mannagongdirnar gera tað trupult at fylgja við, hvørt innanhýsis eftirlitið viðvíkjandi inntøkufíggjaða virkseminum er nøktandi. Grannskoðaravirkið mælir til, at Landsverk ger skrivligar lýsingar av mannagongdunum á øllum týðandi økjum.

Í oktober 2012 greiðir landsstýrismaðurin frá, at Landsverk arbeiðir við at endurskoða mannagongdirnar viðvíkjandi inntøkufíggjaða virkseminum, herímillum eisini viðvíkjandi Bitumengoymsluni.

Broytingin av goymsluvirðinum ger, at í staðin fyri ein vinning á um 620 t.kr. hevur inntøkufíggjaða virksemið í 2011 havt eitt hall á um 200 t.kr. Hallið hjá Bitumengoymsluni er um 1,5 mió.kr.

Eftir at grannskoðaravirkið hevur rættað goymsluvirðið, hevur Landsverk gjørt eina rætting í Búskaparskipan landsins í oktober 2012, har 819.725 kr. eru bókaðar sum "rætting til goymslubroyting" í 2012.

Í oktober 2012 hevur Landsverk kunnað um, at talan ikki var um nakra prinsippbroyting, *"men at hann, sum hevur gjørt goymsluna upp, hevur brúkt ein prís á petroleum á 9 kr. liturin, ístaðin fyri 4 kr. liturin, sum Landsverk brúkti árið fyri."*

Landsgrannskoðanin heldur tað vera álvarsamt, at Landsverk enn eina ferð ger broytingar í goymsluni, sum hevur við sær, at roknskapurin, sum verður lagdur fyri Løgtingið, ikki er rættur.

Søla – Bitumen (kapping við privata vinnu)

Í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í januar 2012 greiddu vit frá á síðu 130 og frameftir, at P/f Asfaltverkið hevði í 2009 kært Landsverk til Kappingarráðið fyri ikki at lata privatum kundum tilfar undir somu treytum, sum Landsverk letur tilfar til sítt egna asfaltvirki. Felagið helt eisini, at Landsverk møguliga hevði brotið reglurnar í kappingarlógini.

Í juni 2009 gjørdi Kappingarráðið av at gera tilsøgn hjá Landsverk galdandi:

- at inntøkufíggjað virksemi hjá Landsverk skal fylgja teimum ásetingum, ið eru at finna í pkt. 5.3 í játtanarskipan landsins, og
- fyri at sleppa undan, at Bitumengoymslan verður rikin við halli, verður prísurin ásettur eftir sama leisti, sum áður, tó við teirri broyting at goymslan við ársenda rindar aftur møguligan vinning til sínar kundar.

Kappingarráðið álegði eisini Landsverk at býta møguligt yvirskot á Bitumengoymsluni lutfalsliga millum kundarnar.

Í 2010 var úrslitið av sølu av Bitumen eitt hall á 66.931 kr. Hallið er ikki býtt millum Landsverk og privatu veitararnar. Í 2009 var yvirskot av søluni av Bitumen, og tað varð býtt ímillum Landsverk og privatu veitararnar eftir sølulutfallinum.

Landsverk hevur greitt frá, at teirra fatan er, at symetriur átti at verið í, soleiðis at skilja, at tá ið yvirskot skal verða býtt millum kundarnar, eigur hall eisini at vera tað.

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann er samdur við fatanina hjá Landsverk um, at hall eisini átti at verið býtt ímillum Landsverk og privatu kundarnar. Innlendismálaráðið heldur tað tó vera trupult at fremja í verki, av tí at tað má verða gjørt við einari heilt greiðari avtalu ímillum Landsverk og privatu vinnuna.

Roknskapurin 2011 fyri Bitumengoymsluna vísir eitt hall á 1.532.674 kr. Bruttovinningurin er lækkaður við um 1,7 mió.kr. ella 68% sammett við árið fyri. Sambært grannskoðaravirkinum hevur Landsverk greitt frá, at høvuðsorsøkin til gongdina er, at í 2011 varð søluprísurin fyri asfalt ásettur við støði í einari mettari sølu á 3.000 tons, men veruliga sølan varð um 2.000 tons.

Sambært § 23 í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan" skal inntøkufíggjað virksemi í størst møguligan mun javnviga ella geva yvirskot. Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur, at raksturin av inntøkufíggjaðum virksemi skal hvíla í sær sjálvum.

Úrslitið av virkseminum hjá Bitumengoymsluni ger, at vanligi raksturin hjá Landsverk fíggjar eitt hall hjá Bitumengoymsluni á um 1,5 mió.kr. Var sama útgangsstøði nýtt at býta hallið, sum varð nýtt at býta yvirskotið í 2009, so skuldu privatu keypararnir rinda um 600 t.kr. av hallinum.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera óheppið, at Landsverk letur landskassan fíggja undirskot av sølu av Bitumen til privat virki.

Kostnaður fyri ráðgeving

Landsverk hevur greitt frá, at tá ið stovnurin ger "ráðgevingararbeiði fyri onnur", verða rokningar sendar, har tímalønin er ásett sambært takstinum í pkt. 4.3. í roknskaparreglugerðini. Útrokningarhátturin er:

- samlaða mánaðarlønin hjá teknikaranum *12/1637.

Tá ið verkfrøðingar á Framleiðsludeildini gera arbeiði fyri aðrar deildir hjá Landsverk, verða tímarnir faktureraðir til ta deildina. Tímataksturin í 2010 var 330 kr. Taksturin verður roknaður út frá lønini hjá viðkomandi við 30% løgdum afturat. Sama er galdandi, tá ið rokningar verða skrivaðar fyri handverkarar og arbeiðsmenn. Fyri tilfar verða 10% løgd afturat prísinum.

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at allýsingin hjá Landsverk av innanhýsis arbeiði er tað arbeiði, sum stovnurin fremur, og har stovnurin sjálvur hevur ræðisrættin á játtanini.

Allýsingin av uttanhýsis arbeiði er arbeiði, sum Landsverk fremur uttan at hava ræðisrætt til kontuna, har peningurin er játtaður. Tað kunnu vera uppgávur fyri kommunur, so sum vegagerð.

Sambært landsstýrismanninum er prísásetingin nú ásett í roknskaparreglugerðini hjá stovninum. Prísurin í 2012 fyri ráðgeving er 380 kr. um tíman.

Goymslur

Í einum broti í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í januar 2012 umrøddu vit goymslurnar hjá Landsverk.

Niðurstøðan var, at út frá teimum samrøðum vit høvdu við leiðsluna, og teimum eygleiðingum vit gjørdu á staðnum, er Landsgrannskoðanin av teirri fatan, at Landsverk ger nógv fyri at halda skil á goymslunum og roynir at tryggja tær ímóti óreglusemi. Vit gjørdu tó vart við, at vit hildu tað ikki vera nøktandi, at goymslurnar ikki vóru taldar upp.

Sambært § 19 í roknskaparkunngerðini áliggur tað stovnunum at føra serstøk yvirlit yvir vørugoymslur, uttan so at goymslurnar ongan týdning hava.

Í roknskaparreglugerðini hjá Landsverk, pkt. 9, stendur, at goymslurnar ikki verða taldar, mest út frá tí fatan, at upphæddirnar eru ikki tær stóru. Landsverk ætlar at telja allar týðandi goymslur.

Landsverk hevur trý sløg av goymslum:

- skerv og grót í Hundsarabotni og á Hústoft,
- asfalt (Bitumen) í Hósvík, og
- eykalutir, maskinur, bilar o.a. á maskinmiðstøðini í Kollafirði

Eisini hevur Landsverk smærri goymslur av skervi og asfalti í Suðuroy og á Sandoy.

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at í 2008 varð ein nýggj goymsluskipan tikin í nýtslu á Maskinmiðstøðini, og at síðani tá er alt keyp skrásett í skipanini. Stovnurin skrásetur lutirnar so hvørt, sum teir verða latnir av goymsluni. Vøran, sum var á goymslu, tá ið nýggja skipanin varð tikin í nýtslu, er ikki tald upp. Goymslurnar av asfalti og skervi verða taldar upp eftir tørvi og í øllum førum við árslok.

Landsstýrismaðurin greiðir eisini frá, at fíggjardeildin hjá Landsverk er farin í holt við at gera mannagongdir fyri, hvussu tann gamla goymslan skal verða gjørd upp, og at tað arbeiðið væntandi verður liðugt seinni í 2012.

9.3.6 Infrakervið á útoyggj

Landsverk umsitur játtanina á høvuðskontu 15.38.1.18 “Stuðul til infrakervið á útoyggj”. Endamálið við lógini og við játtanini er at skapa fyritreytir fyri at betra trivnaðin og vinnuligu møguleikarnar á útoyggjum.

Sambært § 1, stk.1, í Ll. nr. 137/2005 “um at veita stuðul til íløgur í infrakervið á útoyggjum” og § 2, stk. 2, í K. nr. 10/2006 kunnu ávísar kommunur søkja um og fáa útgoldnan stuðul. Landsverk ger tilmæli um stuðul til kommunurnar, sum verður góðkent av landsstýrismanninum.

Í flestu førum senda kommunurnar uppgerð yvir gjørd arbeiði til Landsverk, sum so rindar kommununi stuðulin. Í nøkrum førum sendir veitarin rokningarnar beinleiðis til Landsverk, sum síðani rindar tær og bókar tær á stuðulskontuna. Grundgevingin er, at kommunurnar eru smáar og hava onga umsiting, sum tekur sær av at avgreiða rokningar.

Spurt, um tað er í tráð við reglurnar um stuðul:

at Landsverk, vegna kommunurnar, rindar veitarum av vørum og tænastum, og
at Landsverk bókar rokningar fyri kommunurnar,

hevur Landsverk svarað, at *"Landsverk metir at hetta er ein rationellur máti at arbeiða uppá, tá ið nú Landsverk sjálvt ger uppgávuna."*

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tað, at Landsverk bókar útreiðslur beinleiðis á játtanina til infrakervið á útoyggj, er ein góð loysn, tá ið Landsverk sjálvt er arbeiðstakari.

Alternativur tyrlupallur í Mykinesi

Landsverk greiddi frá, at Sørvágs kommuna hevði biðið stovnin kanna møguleikarnar fyri at gera ein alternativan tyrlupall. Tilsamans eru goldnar 193.964 kr. til "alternativan tyrlupall í Mykinesi".

Vísandi til, at játtanin at reka tyrlupallar kring oyggjarnar er partur av játtanini til Landsverk (undirkonta 38), spurdi Landsgrannskoðanin:

- um útreiðslan til tyrlupallin ikki er partur av rakstrarjáttanini hjá Landsverk, og
- um heimild er at brúka stuðulsjáttanina til tyrlupallar.

Landsverk hevur greitt frá, at rakstrarjáttanin hjá stovninum er ætlað til at reka og viðlíkahalda verandi tyrlupallar og ikki at gera kanningar um alternativar tyrlupallar, sum talan er um í hesum føri.

Landsverk vísti á, at í § 2, stk. 2, í K. nr. 10/2006 stendur: *"kommunur, sum koma undir lógina, kunnu søkja um stuðul til íløgur í infrakervið til byggi- og løguarbeiði viðvíkjandi samferðslu og samskifti og byggi- og løguarbeiði til vinnulig, mentanarlig...".*

Tað er fatanin hjá Landsverk, at ein kanning av alternativum tyrlupalli í Mykinesi kemur undir hesa grein, tí ein slík kanning er partur av einari møguligari íløgu. Stovnurin vísir eisini á, at Innlendismálaráðið hevur góðkent tilmælið, sum á hvørjum ári verður sent til landsstýrismannin at góðkenna.

Í apríl 2012 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at lógargrundarlagið og reglugerðin fyri játtanina eru ógvuliga breitt orðað, og í royndum ber til at stuðla øll endamál til íløgur í infrakervið á útoyggj umframt vinnulig, mentanarlig, ítróttalig og onnur endamál.

Vandi fyri mistøkum og sviki

Vísandi til altjóða grannskoðanarstandard (ISSAI 1240) spurdi Landsgrannskoðanin, um leiðslan á Landsverk hevur mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki. Eisini spurdi Landsgrannskoðanin leiðsluna, um hon hevur kunnleika um svik, illgruna um svik ella hoyrt skuldsetingar um svik.

Í september 2011 hevur leiðslan greitt frá, at hon hevur mett um vandan fyri mistøkum ella sviki. Leiðslan hevur gjørt nógv seinastu árini fyri at betra um innaneftirlitið og hevur í tí sambandinum sett ein kontrollara í starv í 2011. Í sambandi við gjøgnumgongd og góðkenning av mánaðarroknskapum hevur Landsverk eisini tey viðurskiftini í huga.

Leiðslan kunnaði um, at tey hava ikki kunnleika um, at svik hevur verið framt móti stovninum seinastu árini. Leiðslan hevur ikki kunnleika til, ella hoyrt um skuldsetingar um svik.